# Búskaparfrágreiðing 2002

BÚSKAPARRÁÐIÐ

# Partar:


| | |
|---|---|
| **Konjunkturfrágreiðing** | **síða 4** |
| **Vinnupolitikkur** | **síða 43** |
| **Búskaparligur javnvágsmyndil** | **síða 64** |

# Búskaparráðið

Búskaparráðið er sett sambært løgtingslóg nr.120 við seinni broytingum um búskaparráð. Ráðið, sum nú situr, er sett at virka frá 1. januar 2000 til 31. desember 2002. Limir ráðsins eru:

Vald eftir grein 2a. (formansskapurin):

*Hermann Oskarsson, cand. polit, stjóri á Hagstovu Føroya, formaður*

*John P. Danielsen, cand. polit., fíggjarstjóri á SEV*

*Una Joensen, cand. oecon., Føroya Tele*

Vald eftir grein 2b:

*Marner Jacobsen, cand. oecon., forstjóri í Føroya Sparikassa*

*Anfinn Olsen, reiðari*

*Anna Kass, M.Sc. í búsk., fíggjarfulltrúi í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum*

*Elisabeth Gaardbo, siviløkonom, stjóri í ALS*

Skrivari hjá ráðnum er *Jóannes Jacobsen, cand. oecon*.

# Konjunkturfrágreiðing 2002

*Innihaldsyvirlit*


*Formæli* ..... 5
*Konjunkturfrágreiðing* ..... 5
*Bygnaðarviðurskifti* ..... 5
*Vinnupolitikkur* ..... 5
*Javnvágsmyndil* ..... 6
*Niðurstøður og tilmæli* ..... 7
*Niðurstøður* ..... 7
*Tilmæli* ..... 7
*Frágreiðing um búskapargongdina* ..... 10
*Fleiri orsøkir til framgongdina* ..... 10
*Bruttotjóðarúrtøkan 1995-2001* ..... 11
*Býtislutfallið* ..... 12
*Útlitini fyri fiskivinnuna* ..... 13
*Tað almenna* ..... 14
*Samandráttur um búskapargongdina* ..... 14
*Sparing og íløgur* ..... 15
*Marknaðarliga skipanin avgerandi fyri produktivitetin* ..... 16
*Stórur vøxtur – ikki ríkidømi kortini* ..... 17
*Eitt val millum lívshættir* ..... 19
*Gjaldsjavnin* ..... 20
*Arbeiðsmarknaður og arbeiðsloysi* ..... 22
*Arbeiðsmarknaðurin* ..... 22
*Miðallønir* ..... 23
*Arbeiðsloysi* ..... 23
*Forðingar fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin* ..... 25
*Bústaðir* ..... 26
*Barnagarðar* ..... 27
*Røktarheim* ..... 28
*Brúkarapristal og húsaprísir* ..... 28
*Prístalið í Føroyum samanborið við grannalondini* ..... 29
*Vinnurnar* ..... 30
*Útflutningsprísir 2001 og útlit fyri 2002* ..... 30
*Avreiðingar, avreiðingarprísir og útflutningur av óvirkaðum* ..... 31
*Rækjuflotin* ..... 34
*Fiskavirking* ..... 34
*Alivinnan* ..... 35
*Byggivinna* ..... 36
*Tað almenna* ..... 39
*Landskassin* ..... 39
*Kommunurnar* ..... 40
*Skattatrýstið* ..... 41
*Ríkisveitingin* ..... 41

# Konjunkturfrágreiðing 2002

## Formæli

Frágreiðingin frá Búskaparráðnum er hesa ferð í trimum pørtum.

*Konjunkturfrágreiðing*

***Konjunktur – frágreiðing***

Fyrsti partur er ein meting av støðuni í búskapinum og búskaparligu gongdini sum heild. Haraftrat verða útlitini viðgjørd, eins og nakrar niðurstøður og tilmæli eisini verða førd fram.

Serliga trupult er í Føroyum at gera búskaparfrøðiligar metingar av búskaparligu gongdini, tí vanligu metingartólini eru ikki tøk, sum eiga at vera grundarlagið undir slíkum metingum.

Hagtalsuppgerðirnar, sum resta í, eru serliga tjóðarroknskapur í føst-um prísum, nakrir búskaparligir indikatorar og arbeiðsmarknaðar- og lønaruppgerðir.

*Bygnaðarviðurskifti*

Frágreiðing um búskapargongdina er bara ein partur av uppgávuni hjá Búskaparráðnum. Ein annar partur av uppgávuni er at kanna bygnaðin í búskapinum og at kunna almenningin um búskaparfrøðiligu greiningina av samfelagsbygnaðinum.

***Útflutningurin er óstøðugur . . .***

Yvirhøvur er útflutningurin tann parturin av búskaparliga virkseminum í Føroyum, sum ávirkar konjunkturgongdina mest. Hetta kemst av, at samstundis sum útflutningurin er so stórur partur av búskapinum, er hann er ein tann mest óstøðugi parturin. Tí merkjast broytingar har sera týðiliga, viðhvørt eisini sum ógvusligar fram- og afturgongdir í konjunkturinum. Hetta leiðir til tað vanligu fatan, at útflutningurin heldur øllum øðrum vinnum uppi. Av somu orsøk hugsa vit ofta minni um aðrar vinnugreinir.

***. . . men hevur ikki størri týdning enn onnur framleiðsla***

Men hetta er ikki røtt uppfatan. Tað ber ikki til at siga, at útflutnings-vinnurnar hava størri týdning fyri vælferðina enn aðrar vinnur, heldur enn at tað ber til at siga at húsasmíð hevur størri ella minni týdning fyri samfelagið enn barnaansing, hóast vit hvør sær kunnu halda, at samansetingin av framleiðsluni átti at verið øðrvísi.

*Vinnupolitikkur*

***Serstakur partur um vinnupolitikk***

Umframt lýsingina av búskaparstøðuni, hevur ráðið tí hesa ferð lagt dent á at koma við viðmerkingum til ta sonevndu merkantilistisku uppfatanina av føroyskum búskapi, tí búskaparpolitikkur grundaður á ta misfatan, at vøxtur í útflutningsvinnum er betri fyri samfelagið, enn vøxtur í heimamarknaðarvinnum, hevur sera óhepnar avleiðingar.

***Betri vinnupolitikkur enn áður . . .***

Vinnupolitikkurin er skilabetri í dag, enn hann var undan kreppuni, tí rakstrarstudningar og kapitalstudningar til vinnulívið eru meiri sjáld-

samir, enn teir vóru. Tessvegna er hugburðurin í vinnuni eisini broyttur, so at virkini leggja størri dent á kapitalstyrki og sunnan rakstur.

***. . . men framvegis vinnupolitiskur mismunur***

Framvegis eru tað tó í fleiri førum serstaki vinnupolitiski hugburðurin, og almennu regluverkini, ið standast av honum, sum eru til bága fyri framgongd. Vinnupolitikkurin er framvegis bendur ímóti at lívga ávísum vinnugreinum. Enn eru serligar fyriskipanir, sum draga kapital og arbeiðsorku til útflutningsvinnurnar, og sum tí forða fyri, at íleggjarar og arbeiðsfólk fara til tær vinnur, sum av egnum mátti kasta mest av sær.

Vinnupolitiska hugsjónin byggir á merkantilistisku misfatanina av týdninginum, ríkisveitingin og útflutningsvinnurnar hava fyri búskapin. Greiningar bygdar á hesa hugsjón fara tí grundleggjandi skeivar í sínum útleggingum av búskaparligum samanhangum og í sínum beinleiðis og umvegis tilmælum.

Hetta skal ikki skiljast soleiðis, at Búskaparráðið heldur útflutningsvinnurnar hava minni týdning fyri samfelagið enn aðrar vinnur. Útflutningsvinnurnar spæla ein stóran leiklut í menningini av samfelagnum, serliga sum veitarar av valutainntøkum, men eisini sum ein drívmegi í búskaparvøxtrinum.

Útflutningsvinnurnar skulu tó ikki berast uppi av almennum tiltøkum, men av egnum mátti. Tað eigur í stórstan mun at standa til gjaldsviljan hjá keyparunum, hvør vinna vexur ella minkar. Vinnupolitiskir mismunir eiga at verða endurskoðaðir, so at samfelagið alla tíðina kann laga seg til skiftandi viðurskiftini.

## *Javnvágsmyndil*

***Serstakur partur um búskaparfrøðiligan javnvágsmyndil***

Umframt at viðgera vinnupolitikkin í einum serstøkum parti, er skrivaður og viðlagdur sum skjal ein triðji partur, sum m.a. setir vinnupolitikkin inn í ein heildarbúskaparligan myndil – ein sonevndan javnvágsmyndil.

Hetta skjalið er ein roynd at seta út í kort eitt nýtt grundarlag fyri lýsingum av føroyska búskapinum, nevniliga eitt grundarlag undir ein ástøðiligan javnvágsmyndil.

Ein nýggj tilgongd til lýsingar av føroyska búskapinum leiðir fram til nakrar niðurstøður, sum kunnu brúkast til at koma við skilligum útsagnum um nøkur evni, sum eru frammi í løtuni. Sum dømi verður víst, at javnvágsmyndilin saman við nøkrum rætt valdum eyka myndlafortreytum kann brúkast sum amboð til at hyggja at búskaparligu ávirkanini av minkandi ríkisveiting, ætlaða Skiftisgrunninum hjá landsstýrinum og møguligum oljuinntøkum.

Hetta eru alt ávirkanir, sum hagfrøðiligir myndlar í búskaparpartinum av Hvítubók hava verið brúktir til at lýsa, men sum teir í veruleikanum ikki eru førir fyri at lýsa. Av somu orsøk eru fleiri av niðurstøðunum í Hvítubók ikki rættar.

## Niðurstøður og tilmæli

### *Niðurstøður*

Samanumtikið eru vaxtrartrekleikar at hóma, sum helst fara at seta mark millum tíðarskeiðið 1995 til 2001 og so árini komandi. Tey viðurskiftini, sum seinastu árini hava elvt til vaxandi inntøkur og stórt virksemi, eru framvegis til vildar, men eru helst undir broyting.

Talan er ikki um nakra stórkreppu, elvda av okkum sjálvum, sum er á veg. Men um eina minking í vøxtri vegna altjóða konjunkturar og trekleikar í tillagingini.

Talan er partvíst um viðurskifti, vit onga ávirkan hava á – so sum útflutningsprísir og innflutningsprísir, rentustøði og annað, sum stavar frá búskapargongdini á heimsmarknaðunum.

***Minni vaxtraríkast frá útflutningi***

Útflutningsprísirnir – og nær tengt at teimum, avreiðingarprísirnir – eru falnir munandi hetta seinasta árið. Og hóast prísirnir á avgerandi fiskasløgum eru farnir nakað upp aftur seinastu tíðina, so er lítið at ivast í, at útflutningurin fer ikki framhaldandi at geva sama vaxtraríkast, sum árini frammanundan.

Tað er ikki víst, at útflutningurin verður so nógv minni enn árini frammanundan. Tað er heldur ikki víst, at býtislutfallið versnar so nógv í mun til undanfarin ár. Heldur sýnist tað at vera so, at tað íkastið til vøxtur, sum komið er úr útlendska eftirspurninginum og tessvegna útflutningsframleiðsluni, ikki fer at vara við.

Eftir nøkur ár við munandi vøxtri í útflutningsvirði og flestu avgerandi fiskaprísum, er altso talan um eitt skifti. Eitt skifti til eina tíð við ongum ella minni vaxtraríkasti frá útflutningsframleiðsluni.

Væntandi er kortini enn vøxtur í framleiðsluni til heimamarknaðin. Hóast ongin vøxtur er í útflutningsinntøkunum, so er hópin av uppgávum innanlands, sum eftirspurningur er eftir at fáa loystar.

***Framleiðsla til húsarhaldið framvegis í vøxtri***

Eingin orsøk er til at vænta, at eftirpurningurin hjá húsarhaldinum fer at minka, og tí fer tann parturin av innlendsku tænastunum valla at merkja nakað serligt til bakkastið í útflutningsframleiðsluni. Henda meting er tó grundað á, at prísfallið í útflutninginum ikki verður meira enn tað longu er. At inntøkuvøxturin í samfelagnum sum heild higartil í ár hevur verið 11% týðir eisini uppá, at samfelagið sum heild ikki í serligan mun er merkt av minkingini í útflutningsprísunum.

***Byggivinnan heldur tørn***

Byggivinnan hevur eisini uppgávur at loysa, sum í stóran mun eru óheftar av bráðfeingis sveiggjunum í útflutningsprísum. Her er talan um bygningar og byggiverk til bæði vinnuna, tað almenna og húsarhaldið.

### *Tilmæli*

Uttan tøku arbeiðsorkuna heima og stóra heimflyting av arbeiðsfólki, var minni búskaparligur vøxtur vorðin burtur úr útflutningsfram-

leiðsluni. Tá var inntøkuvøxturin í útflutningsvinnunum meira vorðin til inflasjón enn til vøxtur í sjálvum búskaparliga vavinum.

Útflutningsprísirnar hava vit onga ávirkan á. Men vaxtrarsteðgurin, sum vit eftir øllum at døma hava møtt, kann partvíst loysast ella bøtast, við at veita borgarunum betri sømdir.

***Minkingin í vøxtri kann bøtast***

Tey viðurskifti, vit sjálvi hava ávirkan á, eru serliga tey kor, vit hava at bjóða teimum, sum skulu liva og arbeiða í Føroyum – bæði okkum sum eru her og teimum, sum ætla sær at koma higar um korini vit bjóða eru teimum til vildar. Hesi mál má tað almenna ganga á odda at loysa.

***Rúm má skapast fyri arbeiðsfólki***

Avgerandi fyri at vit framyvir fara at hava vøxtur í búskapinum er, at rúm er fyri fleiri í landinum til at nøkta tørvin á arbeiðsmarknaðinum. Framleiðsluvøxturin higartil hevur verið grundaður á, at fleiri fólk sluppu til arbeiðis. Tað andarhaldið, sum nú er, loyvir okkum at skapa tær umstøðurnar, sum skulu til fyri at geva rúm fyri enn fleiri fólkum í landinum.

***Bústaðir vanta***

Sethúsabyggingin er langt frá komin upp á tað støðið, sum eftir øllum at døma er neyðugt, skulu umstøðurnar vera nøktandi hjá fólki at støðast ella hjá fólki at koma heim. Tørvur er tí bæði á menning av bústaðarøkjum til sethús og øðrum almennum tiltøkum fyri at betra býlismøguleikarnar hjá ymsu samfelagsbólkunum.

***Ansingarmøguleikar vanta***

Heilt greiður tørvur er somuleiðis á at betra sosiala umhvørvið í aðrar mátar. Serliga er tað trotið á barnaansing og býlis- ella ansingarmøguleikum fyri eldri fólk, sum bæði leggur eitt órímuligt trýst á familjurnar og er ein sannur arbeiðsmarknaðartrupulleiki.

Heldur enn at hugsa um vanlig fíggjarpolitisk tiltøk, eigur tað almenna at fáa loyst trupulleikarnar við bústaðarmálum, ansingarmálum og øðrum sosialum niðursetumálum, so at fólk kann støðast ella hætta sær til Føroya at virka og liva.

Størsti búskaparligi trupulleikin er tó framvegis, at vit ikki eru so produktiv, sum vit kundu verið. Til dømis eru vit eftir øllum at døma væl minni produktiv og tessvegna hava minni inntøku, roknað upp á íbúgvan, enn hini norðurlondini.

***Økja produktivitetin í fiskiskapi***

Sum frá líður er tað produktiviteturin í vinnunum, sum leggur botnin undir vælferðastøðið. Sum Búskaparráðið áhaldandi hevur víst á, ber til at økja produktivitetin í fiskivinnuni og vinnulívinum sum heild, um tað verður boðið fiskiskapi og aling marknaðarlig kor, tá talan er um atgongd til havtilfeingið og skipan av vinnuligum fiskiskapi.

***Fleirfalt gagn til borgararnar***

Í hesum tiltøkum liggur bæði ein beinleiðis og ein óbeinleiðis øking av inntøkustøðinum. Í fyrsta lagið verður minni orka brúkt til at veiða somu nøgd. Av tí sama verða fleiri hendur tøkar til at framleiða vørur og tænastur beinleiðis til gagns til føroyska brúkaran. Og í øðrum lagi gevur hetta rúm til at minka skattainntøkurnar hjá tí almenna, og tessvegna veita borgarunum vælferðagagn sum skattalætta.

Í heila tikið er tað so, at fyri at produktiviteturin í samfelagnum øllum skal verða størst møguligur, er neyðugt, at býtið av vinnugøgnunum millum vinnurnar bara verður avgjørt av virðinum á íkastinum til framleiðsluna, hesi kunnu skapa. Ein avgerandi fortreyt fyri hesum er, at allar vinnur hava somu politisku treytir at arbeiða undir.

***Allar vinnur somu politisku treytir***

Almenn "satsing" upp á úrvaldar vinnur, so sum fiskivinnuna og nú eisini KT, biotøkni osfr. er úrslit av eini misskiljing av leiklutinum hjá tí almenna í samband við vinnulívið. Almenni vinnupolitikkurin skal júst virka á ein slíkan hátt, at hann onga ávirkan hevur á, hvat framleiðslu, vinnulívið velur at fara undir. Vinnupolitikkurin skal hinvegin virka fyri, at tað bara eru marknaðarútlitini og ikki útlitini til studning ella marknaðaravlagandi tiltøk av øðrum slag, sum avgera, hvar vinnulívið leggur leiðina.

***Vinnupolitikkurin ikki avgera, hvør framleiðslan er***

Vanliga fatanin, at útflutningsvinnurnar - og serliga fiskivinnan – hava størri týdning enn aðrar og tí skulu stuðlast á ymsan hátt, er skeiv. Henda misfatan eigur ikki at vera grundarlag undir almenna vinnupolitikkinum.

## Frágreiðing um búskapargongdina

*Fleiri orsøkir til framgongdina*

***Fleiri viðurskifti virka til stóra framgongd***

Seinastu nógvu árini hevur búskaparliga rákið verið við okkum. Talan er um fleiri viðurskifti, sum virka til hesa sera stóru framgongd.

***Útlendskur eftirspurningur***

Í fyrsta lagið hevur útlendski eftirspurningurin eftir fiski givið betri fiskaprísir og tessvegna vaxandi inntøkur hjá fiskivinnuni sum heild.

Í øðrum lagi hevur í búskapinum verið stórt ónýtt tilfeingi árini millum 1990 og 1994, sum kundi fara til verka aftur, tá fyrsta framgongdin var at hóma. Tí hevur verið stórur tørvur á og møguleiki fyri eini skjótari nýtslu av óbrúktu orkuni í seinnu helvt av 90 unum og fyrst í nýggju øldini.

***Ónýtt tilfeingi***

Um øll arbeiðsorka og øll vinnutól vóru virkin frammanundan, høvdu vaxandi fiskaprísir og harav vaxandi inntøka og handilsjavnaavlop ikki fingið ta ávirkan á búskaparliga konjunkturin, tey nú hava fingið. Tá høvdu vaxandi inntøkurnar í størri mun ført til prísvøxtur og í minni mun til vøxtur í búskapinum.

***Minni vøxtur framyvir***

Enn er henda seinna keldan til skjótan vøxtur í framleiðsluni helst ikki tømd. Men so hvørt sum hon tømist, kunnu vit rokna við, at vøxturin fer at minka.

***Mynd 1****: Nettoflyting til Føroya 1970 til 2001*




*Kelda: Hagstova Føroya*

***Tilgongd til arbeiðsmarknaðin***

Tilgongdin til arbeiðsmarknaðin uttaneftir hevur eisini verið ein av keldunum til vøxturin í búskapinum.

Á myndini omanfyri er netto tilflytingin avmyndað frá 1970 til 2001.

Sum myndin vísir, ber til at býta gongdina í tríggjar partar. Frá 1970 og fram til 1988 er íkastið frá nettoflytingini lítið og einki – samanlagt fyri alt hetta skeiðið er netto tilflytingin góð 300 fólk.

***7.200 fólk netto fráflutt***

Næsta skeiðið er so fráflytingarskeiðið frá 1989 til 1995, tá samanlagda nettofráflytingin var sløk 7.200 fólk.

***2.100 "afturkomin"***

Triðja skeiðið er so frá 1996 til 2001, við einari samanlagdari netto-tilflyting upp á sløk 2.100 fólk. Út frá hesum kann sigast, at vit enn hava eitt "nettoundirskot" av fólki upp á góð 5.000 fólk, sum fluttu av landinum undir kreppuni, og enn ikki eru flutt heim aftur.

Sjálvandi ber ikki til at rokna við, at øll flyta heimaftur, tí nógv fráflutt seta búgv í øðrum londum og hava ikki hug at venda heimaftur. Men hinvegin eru tað onnur enn føroyingar, sum flyta til Føroya, so tað ber saktans til, at nettotilflytingin heldur fram – serliga um bústaðar-, ansingar- og arbeiðsviðurskiftini í Føroyum batna framyvir.

## *Bruttotjóðarúrtøkan 1995-2001*

***5 prosent realur vøxtur í miðal***

2001 var sjeynda árið á rað við stórum vøxtri í framleiðsuvirðinum. Bruttotjóðarúrtøkan vax góð 7 prosent, sum er eitt sindur lægri vøxtur enn undanfarin ár, men sum framvegis er væl hægri, enn vit síggja flestu aðrastaðni. Miðalvøxturin í BTÚ í ársins prísum hevur síðan 1995 verið sløk 10% um árið. Í føstum prísum hevur miðalvøxturin verið góð 5%.

***Talva 1:*** *Bruttotjóðarúrtøkan í ársins prísum og 1988 prísum*

| BTÚ | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Milj.kr.** | | | | | | | |
| Í ársins prísum | 5.322 | 5.788 | 6.175 | 6.940 | 7.402 | 8.116 | 9.357 |
| Í 1988 prísum | 4.059 | 4.303 | 4.439 | 4.826 | 4.918 | 5.173 | 5.540 |
| **Index1995 = 100** | | | | | | | |
| Í ársins prísum | 100 | 109 | 116 | 130 | 139 | 152 | 176 |
| Í 1988 prísum | 100 | 106 | 109 | 119 | 121 | 127 | 136 |
| **Prosentvøxtur** | | | | | | | |
| Í ársins prísum | | 8,8 | 6,7 | 12,4 | 6,7 | 9,6 | 15,3 |
| Í 1988 prísum | | 6,0 | 3,2 | 8,7 | 1,9 | 5,2 | 7,1 |

*Kelda: Landsbankin*

Hóast talgrundarlagið undir útrokningini av reala vøxtrinum er veikt, so sýnist metingin rímulig.

***Vaxandi tal av arbeiðsplássum***

Vøxturin í BTÚ síðani 1995 er í mestan mun komin frá øktum arbeiði, t.e. fleiri arbeiðstímum, heldur enn øktari framleiðslu fyri hvønn arbeiðstíma. Arbeiðsleys eru komin í starv, útlagnir føroyingar eru fluttir heim at arbeiða, náttúrligur vøxtur er í arbeiðsorkuni og síðstu tíðina eru eisini útlendingar komnir til Føroya at arbeiða.

Av hesum keldunum til framhaldandi vøxtur, eru arbeiðsleysir føroyingar tíbetur farnir at ganga undan, meðan tilflytingin framvegis

tykist vera stór.

***Mynd 2**: Býtislutfall og eindarvirði í inn- og útflutningi*




*Kelda: Hagstova Føroya*

### *Býtislutfallið*

***Býtislutfallið vaxið 26% síðan 1996***

Býtislutfallið er eitt mát, sum sigur hvat eindirnar í útflutningi eru verdar í mun til eindirnar í innflutningi. At býtislutfallið vax frá 100 til 126 frá 1996 til 2001 sigur tí, at hvørt einstakt kilo, sum vit útfluttu í 2001, kann keypa 26% meira av innflutningi enn í 1996.

Av tí at fiskiskapur, aling og fiskaframleiðsla hava framleitt rímuliga støðugar ella vaxandi nøgdir hesi árini, hevur betraða býtislutfallið givið stór handilsjavnaavlop, tá skip ikki eru tald uppí.

***Avleidd árin***

Prísvøxturin á útflutningi hevur givið betri lønarinntøkur og størri avlop í øllum útflutningsvinnunum, sum eisini vísir seg í lønarhagtølum og roknskapum í útflutningsvinnunum.

Inntøkuvøxturin hjá bæði løntakarum og fyritøkum gevur í øðrum umfari størri eftirspurning – bæði innanlands og frá útlondum – sum sæst aftur í øktum virksemi og hægri prísum innanlands. Eisini sæst tað aftur í størri og dýrari innflutningi.

Innflutningsprísirnir vóru samanlagt í 2001 at kalla óbroyttir í mun til 2000. Hóast vanligan makan prísvøxtur í fleiri av innfluttu vørubólkunum, so var tað serliga fallið í miðal oljuprísinum millum 2000 og 2001, sum fekk miðal eindarvirðisvísitalið at falla eitt lítið vet.

***Ongin broyting í býtislutfallinum***

Útflutningsprísirnir í 2001 stóðu samanlagt í stað. Prísvøxtur var á flestu fiskavørum. Men av tí at útflutningsprísirnir á óvirkaðum

ísaðum fiski - bæði hýsu og toski – fullu millum 10 og 15% í 2001, og prísfallið á alifiski og rækjum haraftrat var so ógvusligt, var úrslitið eitt samanlagt fall í eindarvirðisvísitalinum fyri útflutning.

Saman við fallinum í eindarvirðisvísitalinum fyri innflutning var úrslitið av hesum, at ongin broyting var í býtislutfallinum í 2001.

***Útlit til fall í 2002***

Í 2002 eru útlit til at býtislutfallið fellur. Hvussu nógv, er ilt at siga enn, men um prísirnir í bæði innflutningi og útflutningi í 2002 verða teir somu restina av árinum, sum teir vóru fyrstu 5 mánaðarnar, so fellur býtislutfallið eini 5%.

*Útlitini fyri fiskivinnuna*

***Øktar inntøkur hóast prísfall á fiski***

Betri fiskiskapur seinasta árið hevur givið øktar inntøkur í fiskivinnuni, hóast prísfallið seinastu mánaðirnar av 2001 og inn í 2002 var eitt tað ógvusligasta, sum verið hevur í langa tíð.

Útlitini fyri fiskiskapin í ár eru sambært fiskifrøðingum rímuliga góð, hóast mælt verður til minking í fiskidagatalinum. Mett verður at avgerandi stovnarnir eru væl fyri, men at meira kann fáast burtur úr, um stovnarnir sleppa at vaxa seg størri, enn verandi fiskiskapur loyvir. Minni fiskidagatal førir til minni fiskiskap í fyrsta umfari, men førir til javnari fiskiskap ár um ár og til betri úrtøku sum frá líður.

***25% minni fyri tosk í apríl 2002***

Avreiðingarprísirnir á botnfiskasløgunum fylgdu ikki heilt fallinum í útflutningi tíðliga á árinum í fjør, men fóru ikki at falla fyrr enn nakað seinni. Tá var prísfallið eisini so mikið meira, at avreiðingarprísirnir fyri tosk í apríl 2002 vóru sløk 25% minni enn í sama mánaða í 2001.

Av tí at framleiðsluvirði hjá fiskivinnuni er so óstøðugt, og tí hendan stendur fyri so stórum parti av samlaðu framleiðsluni í Føroyum, er konjukturávirkanin frá hesi vinnuni á restina av búskapinum sera týðulig. Afturgongd í hesi vinnuni kann tí skjótt føra til óheppin árin á konjunkturgongdina.

Partar av útflutningsvinnunum hava trupulleikar, serliga rækjuflotin. Eisini alivinnan, har lágir prísir og ILA sjúka hava tyngt raksturin seinastu tíðina, hevur ávísar trupulleikar at dragast við. Alivinnan er tó á ongan hátt í kreppu. Meira er um hetta seinni í ritinum.

Ósemjurnar um svartkjaftabýtið millum londini, sum fiska svartkjaftin, kunnu skapa trupulleikar fyri fiskiskapin, av tí at partar av kvotunum hjá føroyskum skipum í fremmandum sjógvi verða keyptar fyri svartkjaft í føroyskum sjógvi. Úrslitið kann gerast eitt slag av handilskríggi, har hvørt land bara fiskar heima hjá sær sjálvum. Hetta kann skapa trupulleikar fyri fiskivinnuna og serliga flakatrolararnar, sum fiska tosk í Barentshavinum.

Men sum heild kann sigast, at flestu fyritøkurnar eru fíggjarliga sterkari enn fyrr. Tað fer í sær sjálvum vera við til bøta um eina møguliga afturgongd. Ein møgulig afturgongd í eftirspurninginum fær tí ikki ávirkan á virksemið alt fyri eitt, hóast tað sjálvsagt fer at

merkjast fyrr ella seinni, um afturgongdin stendur við.

### Tað almenna

***Skilagóð almenn útreiðslustýring . . .***

Almenna útreiðslustýringin hevur í mangar mátar verið passaliga varislig. Stóru landskassainntøkurnar standast sjálvandi av vaxandi inntøkum í samfelagnum sum heild, men hinvegin hevur tað eydnast væl at tálma útreiðsluvøxturin, so at avlopini hava bøtt um almennu skuldarstøðuna.

***. . . men bústaðir og ansingarmøguleikar mangla***

Men á nøkrum økjum er tørvur á almennum tiltøkum, sum kosta. Tað er serliga veitingin av bústaðarmøguleikum og ansingarmøguleikum til børn og eldri, sum haltar aftaná og er ein forðing fyri menningini av samfelagnum.

### Samandráttur um búskapargongdina

Samanumtikið var stór búskaparliga framgongd í 2001. Men samstundis vóru tekin um, at búskaparliga framgongdin fer at fjarða út, ella at búskaparliga framgongdin í minsta lagi ikki verður eins góð og árini frammanundan.

***Fyritøkurnar sterkari enn áður***

Kortini eru tað viðurskifti, sum virka til áhaldandi vøxtur. Eitt er, at fyritøkurnar sum heild eru fíggjarliga sterkari enn áður hevur verið. Hetta hevur við sær, at tær hava nakað at standa ímóti við, so at lækkandi inntøkur ikki í so stóran mun fáa ávirkan á tali av fólki í arbeiði.

Haraftrat eru byggivinnan og aðrar privatar og almennar vinnur í holt við uppgávur, sum ikki steðga upp, hóast inntøkurnar aðrastaðni í búskapinum ikki vaxa við somu ferð, sum frammanundan.

Nógv veldst í løtuni um hvussu langt útflutningsprísirnir falla, og hvussu leingi prísfallið stendur við. Haraftrat veldst sjálvandi um eitt nú oljuprísir og rentuna, og aðrar kostnaðir í útflutningsvinnuni. Somuleiðis veldst um sjálvan fiskiskapin – um hann heldur sær á verandi støði.

***Laga okkum til lægri útflutningsprísir***

Um prísfallini á týdningarmestu fiskasløgunum eru varandi ella bráðfeingis er ilt at vita, men nógv er, sum bendir á, a prísirnir koma ikki upp á sama støði sum seinastu tvey árini. Helst verður neyðugt, at útflutningsvinnurnar laga seg til hesar lægru prísirnar.

***Spælireglurnar ikki tær somu sum í 8o'unum***

Tað týdningarmesta í hesum samanhangi er, at spælireglurnar eru munandi annaðleiðis í dag enn tær vóru, tá samfelagið seinast varð rakt av afturgongd í konjunkturunum. Hóast stóru útflutnings-vinnurnar framvegis eru langt frá at arbeiða uttan studning og eftir vanligum marknaðartreytum, er tó ein munandi broyting farin fram seinastu árini. Broytingar í búskaparliga umhvørvinum føra tessvegna til skjótari tillagingar til marknaðarviðurskiftini, soleiðis at kósin verður rættað skjótari.

## Sparing og íløgur

Í talvuni niðanfyri er víst, hvussu tøka bruttotjóðarinntøkan er samansett, eins og bruttosparingin er víst.

***Talva 2:*** *Bruttotjóðarinntøka og sparing*

| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ***Milj.kr.*** | | | | | | | |
| Bruttotjóðarúrtøka | 5.322 | 5.788 | 6.175 | 6.940 | 7.402 | 8.116 | 9.357 |
| Rentur | -420 | -330 | -320 | -70 | 10 | 40 | 80 |
| Lønarinntøkur | -30 | -28 | -25 | -23 | -20 | -18 | -15 |
| Danska ríkið | 1.111 | 1.122 | 1.154 | 1.180 | 1.206 | 1.236 | 1.264 |
| **Tøk bruttotjóðarinntøka** | **5.983** | **6.552** | **6.983** | **8.027** | **8.598** | **9.375** | **10.686** |
| | | | | | | | |
| Nýtsla | 4.711 | 4.977 | 5.192 | 5.768 | 6.221 | 6.830 | 7.785 |
| **Bruttosparing** | **1.271** | **1.576** | **1.791** | **2.259** | **2.377** | **2.545** | **2.901** |
| | | | | | | | |
| Uppsparing uttanlands | 674 | 811 | 799 | 1.166 | 898 | 434 | 1.010 |
| **Innanlands íløgufígging** | **597** | **765** | **992** | **1.093** | **1.479** | **2.111** | **1.891** |
| ***Prosent av tBTI*** | | | | | | | |
| Bruttotjóðarúrtøka | 89 | 88 | 88 | 86 | 86 | 87 | 88 |
| Rentur | -7 | -5 | -5 | -1 | 0 | 0 | 1 |
| Lønarinntøkur | -1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Danska ríkið | 19 | 17 | 17 | 15 | 14 | 13 | 12 |
| **Tøk bruttotjóðarinntøka** | **100** | **100** | **100** | **100** | **100** | **100** | **100** |
| | | | | | | | |
| Nýtsla | 79 | 76 | 74 | 72 | 72 | 73 | 73 |
| **Bruttosparing** | **21** | **24** | **26** | **28** | **28** | **27** | **27** |
| | | | | | | | |
| Uppsparing uttanlands | 11 | 12 | 11 | 15 | 10 | 5 | 9 |
| **Innanlands íløgufígging** | **10** | **12** | **14** | **14** | **17** | **23** | **18** |

*Kelda: Landsbanki Føroya*

Í føroyskum búskapi er ofta rættast at vísa viðurskiftini í mun til tøku bruttotjóðarinntøkuna – tBTI, í teimum førum tá onnur lond vísa viðurskiftini í mun til bruttotjóðarúrtøkuna – BTÚ. Orsøkin er, at vit fáa ein so mikið stóran part av okkara vælferð goldna av donsku ríkisveitingini, at tBTI er tann støddin, sum gevur rættastu myndina av føroysku vælferðini.

***Nettorentuinntøkur síðani 1999***

Fram til 1997 fóru í miðal meira enn 5% av tøku bruttotjóðarinntøkuni til at gjalda rentur av lánum, sum flest øll vóru vorðin almenn lán eftir kreppuna. Hóast stóra vøxturin, sum var hesi árini, so fór altso ein stórur partur av framleiðsluni til at gjalda fyri eitt kapitalapparat, sum fyri stóran part var mist. Síðani 1999 eru henda útreiðsla vend til nettorentuinntøku.

***Stór sparing . . .***

Bruttosparingin hevur hesi árini verið bæði stór og vaxandi. Í miðal hevur sparingin síðani 1995 ligið umleið 26% av tøku bruttotjóðarinntøkuni. Hetta er munandi størri sparing, enn vanligt er,

hóast onnur lond meta sparingina í mun til BTÚ.

***. . . men íløgurnar í Føroyum smáar***

Men sparingin er bara í minni mun farin til íløgur í føroyska búskapinum. Miðal árligu íløgurnar eru hesi árini góð 15% av tBTI. Hetta má metast at vera heldur lágur íløgupartur, tá havt verður í huga, at bara fáar og lítlar íløgur vóru gjørdar tey 5 árini frammanundan hesum skeiðinum.

Harafturímóti eru 10% av tBTI árliga farin av landinum í fíggjarliga sparing – sum eisini sæst av, at avlopið á gjaldsjavnanum er so stórt hesi árini. Sparingin, sum fer av landinum er mest fíggjarsparing uttanlands – ikki til beinleiðis føroyskar íløgur í útlondum.

Vøxturin, sum verið hevur í framleiðsluvirðinum seinastu árini, er fyri mesta partin komin av góðum útflutningsprísum og so av tillagingini eftir kreppuna – og ikki av at vit eru vorðin so nógv meira produktiv.

Tann vøxturin, sum skal vera í búskapinum, tá hetta skjóta vaxtrar-skeiðið er av, skal koma frá nýíløgum í eitt kapitalapparat, sum er meira produktivt enn tað gamla. Enn verður búskaparliga framgongdin borin uppi av vaxandi tali av arbeiðsfólki, men tað kann ikki væntast at hetta verður keldan til vøxtur fleiri ár aftrat. Tá skal vøxturin koma frá moderniseringini av kapitalapparatinum, sum ger arbeiðsplássini meira produktiv, enn tey vóru frammanundan.

***Íløgurnar avgerandi fyri vøxturin***

Framyvir fer tað at hava týdning, at íløgur verða gjørdar – bæði føroyskar og útlendskar, fyri at økja um produktivitetin í privatu framleiðsluvinnunum og privatu tænastuvinnunum.

### *Marknaðarliga skipanin avgerandi fyri produktivitetin*

Tað eru góðar grundir til at endurskoða marknaðarligu skipanina av útflutningsvinnunum í hesum sambandi. Endurskoðast má, um tann leistur, vit hava valt at skipa útflutningsvinnurnar eftir, er tann besti fyri at fáa mest møguligan produktivitet og effektivastu framleiðsluna.

Lógin um vinnuligan fiskiskap er helst tann vinnulógin í landinum, sum leggur flest marknaðarligar forðingar í vegin fyri fyritøkunum. Har eru reglur um, hvussu stóran part einstøku veiðihættirnir eiga av hvørjum týðandi fiskaslag. Har eru reglur um, hvat ið henda skal við tillutaðum fiskidøgum, um skip fara úr flotanum, ella um skip gerast meira effektiv. Har eru reglur um í hvønn mun skip sleppa at viðgera fiskin umborð. Har eru reglur um, hvussu leingi skip kunnu fiska.

Fyrilitini, sum tikin eru, tá reglurnar vórðu smíðaðar hava helst verið ymiskar. Neyðsemjur av ymsum slag eru helst gjørdar millum bæði veiðihættir og politiskar flokkar. At reiðararnir tóku undir við skipanini sýntist at hava eina størstan týdning.

Men um hetta er frægasta marknaðarliga skipanin til framburð í framleiðsluni og tessvegna frægasta skipanin til at menna framleiðsluna í vinnuni og í landinum sum heild, er ikki tikin støða til.

Tað besta fyri búskaparliga vøxturin í landinum og tessvegna fyri

gagnið hjá borgarunum øllum í landinum er, at so fáar forðingar sum gjørligt eru fyri vøxtri í produktiviteti í útflutningsvinnunum.

Hetta er nóg góð orsøk til at endurskoða alla lógina um vinnuligan fiskiskap. Tí produktiviteturin í fiskiskapi og útflutningsframleiðslu annars er so sera týðandi fyri framleiðslustøðið í landinum sum heild.

## Stórur vøxtur – ikki ríkidømi kortini

Hóast stórur vøxtur hevur verið í búskapinum hesi seinastu árini, er ongin orsøk til at seta seg upp afturá. Higartil hava vit bara sligið fast, at stórur vøxtur hevur verið síðan 1995.

***Real BTÚ framvegis minni enn í 1988***

Men rokna vit longur aftur sæst, at BTÚ upp á fólkið, mett í føstum prísum í 2001, framvegis liggur 15% niðan fyri BTÚ í 1988 – altso fyri 14 árum síðani. Satt er, at vit hava havt stóran vøxtur seinastu árini, men rokna vit árliga miðal reala vøxturin í BTÚ frá 1988 til 2001, var hann negativur (-1%). Seta vit BTÚ upp á íbúgvan í 1988 til vísital 100, so var talið í 2001 ikki komið longur upp enn á 85 – altso 15% niðanfyri støddina í 1988.

***Vælferðin eini 30% afturútsigld***

Undir øðrum umstøðum skuldi BTÚ upp á íbúgvan verið vaxin eini 15-20% í 14 ár, so við tí huga liggja vit í virðisøking eini 30-35% niðanfyri tað, sum vit áttu at verið komin upp á, var ongin kreppa í 90 árunum.

Vælferðin í landinum kann mátast upp á nógvar mátar. Men tá talan er um materiellu vælferðina, verður hon ofta roknað við støddum úr tjóðarroknskapinum.

***Arbeiðsfjøldin vexur***

Í løtuni vexur føroyska framleiðslan helst fyrst og fremst av, at talið av arbeiðsfólki økist – at arbeiðsfjøldin økist, og at arbeiðsloysið minkar.

***. . . tað økir framleiðsluna***

Tað eru fleiri tekin um, at skjóti vøxturin saktans kann halda áfram. Tað veldst sjálvsagt um nógv ymisk viðurskifti, um vøxturin veruliga heldur fram. Til dømis veldst um útlendska eftirspurningin eftir fiski og tessvegna útflutningsprísirnar, um sjúkutrupulleikarnar í alingini, um oljuprísirnar og onnur viðurskifti.

Somuleiðis veldst um, hvørt tað fer at bera til at økja talið av arbeiðsplássum, og um til ber at manna hesi nýggju størvini við føroyingum í útlegd, sum flyta heimaftur, ella við útlendingum, sum hava hug at koma til Føroya at arbeiða.

***. . . men ikki í fyrsta umfari um vælferðina hjá tí einstaka***

Men talið av arbeiðsplássum økir í fyrsta umfari bara um samanløgdu framleiðsluna og harvið samanløgdu inntøkuna – ikki inntøkuna hjá hvørjum einstøkum, sum er tað vanliga mátið av materiellari vælferð. Um talið av arbeiðsplássum í sær sjálvum hevur avleidda ávirkan á framleiðsluna og inntøkuna hjá tí einstaka er ein ógreiddur spurningur.

Tá talan er um vøxtur í BTÚ upp á íbúgvan, veldst serliga um produktivitetin – um støddina av framleiðslu, sum kemur burtur úr hvørjum arbeiðstíma.

Í stóran mun veldst eisini um tað ber til at fáa fleiri fólk upp í arbeiðsorkuna. Hetta kunnu t.d. vera fólk, sum eru heimabundin av ansingaruppgávum, bundin av bústaðar-trupulleikum ella eru uttanfyri arbeiðsorkuna av øðrum ávum.

Tað veldst altso um produktivitet og arbeiðsluttøku.

***Mynd 3:*** *Føroysk og donsk BTÚ og tBTI samanborin*




*Kelda: Hagstova Føroya*

Á myndini omanfyri eru okkara BTÚ og tBTI fyri hvønn íbúgva sett í mun til somu støddir fyri Danmark. Donsku BTÚ og tBTI er sett til 100%, og vístir eru so stabbar, sum vísa, hvussu okkara inntøkur eru í mun til tær donsku í prosentum.

Tá vit seta okkara BTÚ fyri hvønn íbúgva upp ímóti tí danska, ber til at máta, hvussu nógv ein miðal føroyingur er førur fyri at framleiða í mun til miðal danan.

***Framleiða 20% minni enn danir***

Stabbarnir vísa at miðal føroyingurin framleiddi í 1995 góð 60% av tí, sum miðal danin framleiddi. Í 2001 var hetta komið upp á sløk 80%.

Máta vit tBTI, harafturímóti, so vísir myndin, at íroknað ríkisveitingina og onnur útlendsk viðskifti er samanlagda inntøkan fyri hvønn føroying komin upp um 90% í mun til miðal danan.

***Inntøkan tó bara 10% lægri***

Hetta sigur okkum, at hóast vit, roknað upp á íbúgvan, ikki megna at framleiða eins nógv og danir, so er materiella vælferðin ikki eins nógv aftanfyri tað donsku, tí vit fáa slaka miljard krónur í ríkisveiting. Men sjálvt íroknað ríkisveitingina er materiella vælferðin ikki fult so stór sum í Danmark.

At framleiðslan, roknað upp á íbúgvan, í 2001 ikki var meira enn 80% av tí donsku framleiðsluni, kann hava nógvar orsøkir.

Ein orsøk kann vera, at mátið ikki er heilt rætt. Um prísirnir í Danmark í miðal eru hægri enn í Føroyum, so ber ikki heilt til at samanbera framleiðsluvirðið í londunum báðum, uttan at javna út fyri prísmunirnar. Men prísirnir skulu í miðal vera 20% hægri í Danmark, fyri at allur hesin munurin skal hvørva – og tað er valla sannlíkt.

Ein onnur orsøk kann vera, at stór lond hava ein fyrimun, tí størri eindir av ymsum orsøkum eru meira produktivar enn smærri eindir. Stórar fyritøkur framleiða ofta meira effektivt enn smáar, sum fáast við sama slag av framleiðslu.

***Smá lond kunnu vera produktiv***

Men hetta er bara satt í ein ávísan mun. Í norðurlondum – sum jú eru smá lond – er inntøkan upp á fólkið størri enn í nógvum stórum londum. Og inntøkan í Íslandi er farin upp um tað donsku, hóast Ísland er nógvar ferðir minni.

Tað er lítið sum talar ímóti, at framleiðslan fyri hvønn íbúgva í Føroyum kann vera á hædd við framleiðsluna í hinum norðurlondum. Fólk í Føroyum er ikki langt aftanfyri fólk í øðrum norðurlondum, tá talan er um almennan kunnleika, verkliga útbúgving og arbeiðslag. Vit hava í flestu førum atgongd til somu verkligu tøknina og evnini at handfara hana.

### *Eitt val millum lívshættir*

Vit hava víst á, at avgerandi fyri materiellu vælferðina er, at hvørt einstakt arbeiðspláss er so effektivt og produktivt, sum tøka tøknin loyvir.

***Val millum ymsar lívshættir***

Men í hesum máli er talan um at velja millum tveir lívshættir. At velja millum øðrumegin tað, sum skal til fyri at økja egna framleiðslu av materiellari vælferð, og hinumegin at halda fram við at bera okkum at, sum vit hava gjørt higartil.

Her verður ikki tikin støða til tann spurningin. Her skal bara umrøðast tað, sum skal til, fyri at økja materiellu vælferðina.

Helst kann so nógv gerast meira effektivt, enn tað er í løtuni, bæði í almennum og privatum virksemi. Men tað, sum verður gjørt so seinført, kemst ofta av at vit hava ætlað tað at vera so.

***Almenn arbeiðspláss til økistrivnað***

Politikararnir hava tikið avgerðir um, at vit t.d. skulu hava 3 sjúkrahús, spjaða almenna fyrisiting út á oyggjarnar, tunnlar til smápláss o.s.fr. Og hesar avgerðir eru umvegis Løgtingið tiknar av okkum borgarum, sum vilja tað soleiðis. Á henda hátt velja politikararnir millum økistrivnað og effektivitet, sum so aftur hevur ávirkan á effektivitetin í almennu arbeiðsplássunum.

Somuleiðis hava vit umvegis politikararnar tikið avgerð um, at útflutningsvinnan partvíst skal tæna økis- ella bygdamenningarligum trivnaðarmálum, og ikki vera reint marknaðarstýrd.

Tað er lítil ivi um, at vilja vit hava støðuga framgongd í materiellari vælferð, krevst at vit skifta hugburð um hesi viðurskifti. Vøxtur í

produktiviteti krevur, at tað almenna fyri sín part leggur dent á effektiva nýtslu av sínum íløgu- og arbeiðsorkutilfeingi. Haraftrat eiga politikararnir at halda seg til at seta karmarnar um vinnuligt og alment virksemi, heldur enn at fara ov nógv í smálutir í dagliga rakstrinum av stovnum og fyritøkum.

***Fiskivinna undir marknaðarligum treytum***

Serliga útflutningsvinnurnar eiga í størri mun at verða sleptar leysar í marknaðarligari kapping. Materiellur vælferðarvøxtur krevur, at útflutningsvinnurnar verða loystar frá økismenningarligum trivnaðarmálum. Avgerðir um hvar fiskavirkini skulu liggja, hvussu nógv tey skulu vera, hvussu nógv fólk skal arbeiða í fiski, og avgerðir um hvussu fiskiskipaflotin skal verða samansettur, um framleiðast kann umborð á skipunum, um hvør reiðskapur skal nýtast – slíkar avgerðir verða í dag tiknar partvíst av politikarunum og ikki av privatu vinnuni einsamallari.

***Fyriskipanarligar reglur . . .***

Í summum førum eru tað almennar fyriskipanarligar reglur, sum avmarka vinnuliga frælsið fyri at tryggja økismenningarliga trivnaðin. Eitt nú eru reglur fyri hvussu miðal býtið av fiskiskapi skal vera millum skipabólkar. Reglur eru eisini, sum geva smábátum fríari træsur enn størri fiskifør fáa í fiskidagaskipanini.

***. . .og studningar darva effektivitetin,***

Í øðrum førum tryggjar tað almenna økismenningarliga trivnaðin við studningum ella avgjøldum. Studningur til flutning av fiski millum virki og stuðul til lønina hjá fólki á fiskavirkjum, sum ikki fáa fulla arbeiðsviku.

***eins og ókeypis fiskirættindi***

Ikki minst er tað restandi marknaðarliga skipanin av fiskiskapi, sum elvir til at binda størri kapital og meiri arbeiðsorku í fiskiskap, enn neyðugt. Kravdi tað almenna gjald fyri fiskin, so varð flotin óiva vorðin meira effektivur, serliga um avmarkingarnar hjá fiskivinnuni sjálvari at velja vinnutólini so búskaparliga skilagott sum møguligt samstundis vórðu tiknar av.

Ongin ivi er um, at ætla vit sjálvi at framleiða eina materiella vælferð á hædd við hini norðurlondini, so má alt hetta takast til umhugsan. Bæði skipanin av tí almenna verkinum og skipanin av marknaðum fyri privata vinnu.

Sum nú er, hava vit í mongum førum valt økismenningarligan trivnað fram um at stevna ímóti effektiviteti í skipanini av almennum verkum og marknaðum fyri privata vinnu. Fyri at bøta um inntøkuávirkanina av ov lítla produktivitetinum, hava vit valt at hava donsku ríkisveitingina sum ískoyti til vælferðina hjá borgarunum.

## Gjaldsjavnin

***Stórt avlop á gjaldsjavnanum***

Avlopið á gjaldsjavnanum hevur síðani 1997 verið í miðal 11% av tøku bruttotjóðarinntøkuni - tBTI. Samstundis skulu sjálvsagt havast í huga stóru hallini á gjaldsjavnanum í áttati árinunum. Nøkur ár við avlopi á gjaldsjavnanum hava tí verið neyðug fyri at fáa javnvág á varandi viðskiftini við umheimin.

*Talva 3: Gjaldsjavnin 1997 til 2001*

| mió. kr. | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|
| RAKSTRARVIÐSKIFTI GJALDSJAVNANS | | | | | |
| Útflutningur skip ikki roknað uppí, fob | 2.506 | 2.862 | 3.171 | 3.613 | 4.258 |
| Útflutt skip o.t. | 88 | 91 | 118 | 258 | 55 |
| Inntøkur á handilsjavna | 2.594 | 2.953 | 3.289 | 3.871 | 4.313 |
| Innflutningur skip ikki roknað uppí, cif | 2.243 | 2.496 | 2.862 | 3.516 | 4.036 |
| Innflutt skip o.t. | 120 | 99 | 418 | 790 | 231 |
| Útreiðslur á handilsjavna | 2.363 | 2.595 | 3.280 | 4.307 | 4.266 |
| Vøruhandilsjavni | 231 | 358 | 9 | -436 | 46 |
| Veitingar úr útlondum, netto | 1.154 | 1.180 | 1.206 | 1.236 | 1.264 |
| Skrásett rakstrarviðskifti | 1.385 | 1.538 | 1.215 | 800 | 1.310 |
| Mettar rentuútreiðslur, netto | -320 | -70 | 10 | 40 | 80 |
| Restbólkur, netto | -183 | 27 | -427 | -506 | -480 |
| **Rakstrarviðskifti samanlagt** | **882** | **1.495** | **798** | **334** | **910** |

*Kelda: Landsbanki Føroya*

***Avlopið fer at minka***

Væntast kann, at nú netto uttanlandsskuldin er vend til nettoogn uttanlands, fer avlopið á gjaldsjavnanum at minka aftur. Hetta kann partvíst henda av ávirkan uttaneftir, av tí at útflutningsprísirnir falla, sum tekin longu eru um.

***Tillaging til prístekin***

Men partvíst fer tað at henda av innlendskum ávum. Í fyrsta lagi tí at innflutningurin vexur, so hvørt sum inntøkurnar og fíggjarognirnar vaxa, og inntøkuvánirnar gerast betri og meira álítandi. Í øðrum lagi tí at kapitalur og arbeiðsorka verða drigin úr útflutningsvinnunum til heimamarknaðarvinnurnar, so hvørt sum innlendski eftirspurningurin økist í mun til útlendska eftirspurningin.

***Innflutningurin vexur***

Innflutningurin vexur av fleiri orsøkum. Ein er, at vit verða fleiri íbúgvar, sum øllum tørvar nakað av innflutningi. Ein onnur orsøk er, at so hvørt sum inntøkurnar hjá húsarhaldunum verða betri, so økist serliga innflutningurin av varandi nýtsluvørum.

Men mest vexur innflutningurin í slíkum tíðum av, at tá inntøkuvánirnar verða betri, so økist innflutningurin av rávørum til framleiðslu av alskyns slag, og íløguvørum, bæði maskiníløgum og tólbúnaði av ymsum slag.

***Heimamarknaðar-vinnur vinna fram***

Minkandi avlop á rakstrarviðskiftum gjaldsjavnans koma eisini av, at útflutningsvinnurnar fáa trupulleikar við at halda fast í arbeiðsorkuni, so hvørt sum arbeiðsinntøkuvánirnar í heimamarknaðarvinnuni økjast í mun til inntøkurnar í útflutningsvinnunum. Tað verða serliga flakavirkini, sum merkja hesa kappingina um arbeiðsorkuna, men

eisini alivirkini og kryvjivirkini.

Hetta er alt partur av náttúrligu tillagingini til broytt sínámillum skuldarviðurskifti millum Føroyar og umheimin. Alt tað, sum hevur við marknaðarliga partin av gjaldsjavnatillagingini at gera, lagast sum frá líður á henda hátt eftir netto skuldarviðurskiftunum.

**Arbeiðsmarknaður og arbeiðsloysi**

***"Fløskuhálsar" kunnu boða frá góðum***

Meiningin við greiningunum niðanfyri er at vísa á, at skiljast má ímillum fløskuhálsar á arbeiðsmarknaðinum alt eftir, hvaðan teir stava. Ein fløskuhálsur nýtist ikki vera ein samfelagsligur trupulleiki, um trotið á arbeiðsmegi í summum vinnum stendst av stórum eftirspurningi eftir arbeiðsmegi í samfelagnum sum heild. Tvørturímóti er tað í sjálvum sær ein heppin støða, at arbeiðsfólkið hevur nógvar og góðar møguleikar til størv og tí heilt einfalt velur eitt starv fram um annað.

***. . . men kunnu eisini vera tekin um tillagingar-trupulleikar***

Hinvegin er ein fløskuhálsur altíð óheppin og ein samfelagsligur trupulleiki, um hann stendst av, at útboðið av arbeiðstímum er minni, enn tað kundi verið, um umstøðurnar vóru betri. Í hesum samanhangi er atgongdin til skipaða arbeiðsmarknaðin avgerandi spurningurin. Um fólk eru forðað í at taka av tilboðnum um rætta starvið, antin tí tey ikki hava ráð til ella hava møguleika fyri at skaffa sær bústað nærhendis, ella tí tey mugu vera heima og passa børn ella gomul, er tað ein trupulleiki fyri allar partar, t.e. arbeiðstakara, arbeiðsgevara og samfelagið sum heild. Í hesum føri hevur tað almenna ein leiklut í royndunum at minka um forðingarnar fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin.

## Arbeiðsmarknaðurin

***Tal av størvum økt millum 4 og 7% árliga***

Frá eini støðu við sera avmarkaðum virksemi hava positivu broytingarnar í búskaparliga umhvørvinum ført til, at búskaparliga virksemið í samfelagnum sum heild er vaxið nógv seinastu árini. Av tí sama er talið av størvum økt munandi. Síðan 1997 er talið av størvum økt við millum 4 og 7 prosentum um árið. Talið av størvum er soleiðis økt úr 24.354 í 1997 upp í 30.602 í 2001.

Ansast má eftir, tá hesi tølini skulu tulkast, tí tølini eru ikki umroknað til heiltíðarstørv. Tað vil siga, at øll størv telja eins nógv í uppgerðini, uttan mun til um talan er um heiltíðarstørv, hálvtíðarstørv ella skúlanæmingar, sum arbeiða aftan á skúlatíð. Haraftrat telur hvør einstakur við fleiri ferð, um hann fær løn frá fleiri arbeiðgevarum. Tí er torført at meta um, hvussu nógv virksemið í veruleikanum er økt, tað vil siga hvussu nógv fleiri tímar verða brúktir í løntari framleiðslu í dag sammett við fyri nøkrum árum síðan. Men tølini geva hóast hetta eina greiða ábending um, at samlaða tíðin, sum verður brúkt á løntum arbeiðsplássum, er økt nógv seinastu árini.

***Helst størri***

Ábendingar eru enntá um, at virksemið fer at gerast størri, enn tøka arbeiðsframboðið kann nøkta yvir longri tíð. Møguliga fer

***eftirspurningur***

arbeiðsframboðið og virksemið sum frálíður ikki at vaxa meira, meðan inflatiónin vegna framhaldandi vøxtur í eftirspurninginum fer at vaxa.

***Føroyingar í útlegd teljast partvíst uppí***

Men ivasamt er, um hetta veruliga er støðan, tí møguliga skulu føroyingar uttanlands roknast upp í tøku føroysku arbeiðsfjøldina. Verða føroyingar uttanlands roknaðir upp í, við teirri grundgeving, at nógvir av teimum vilja flyta heim, um høvi býðst, er framvegis stórt pláss fyri øktum arbeiðsframboði og harvið øktum virksemi, uttan vanda fyri stórvegis inflatión.

### *Miðallønir*

***Miðalløn pr. starv vaxin millum 2 og 6%***

Saman við økingini í talinum av løntum størvum eru miðallønirnar eisini øktar rættiliga fitt hesi seinastu árini. Serliga hækkaðu miðallønirnar fyrraárið og í fjør. Hesi bæði seinastu árini er miðallønin vaxin 6 prosent um árið. Frá 1997 til 1998 og frá 1998 til 1999 vax miðallønin ikki líka nógv, nevniliga við 2 prosentum um árið.

***Serliga í útflutnings-vinnunum***

Innanfyri høvuðsbólkarnar er tað serliga miðallønin í aling og fiskavirking, sum er vaxin nógv. Miðallønin í fiskiskapi er økt sera nógv tvey tey seinastu árini, men frá 1997 til 1998 og frá 1998 til 1999 fullu lønirnar í hesum høvuðsbólkinum, so sæð yvir øll 4 árini eru lønirnar í hesum bólki ikki øktar meira enn í hinum bólkunum.

***Talva 4**: Tal av miðal løntakarastørvum og miðallønir í vinnubólkum 1997 til 2001*

| | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 97/98 | 98/99 | 99/00 | 00/01 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ***Tal av størvum*** | | | | | | | *% broyting* | | |
| **Tilsamans** | **24.354** | **26.163** | **27.461** | **28.550** | **30.602** | **7** | **5** | **4** | **7** |
| Fiskiskapur | 2.791 | 3.383 | 3.545 | 3.395 | 3.572 | 21 | 5 | -4 | 5 |
| Aling og fiskavirking | 2.616 | 2.754 | 2.953 | 3.153 | 3.378 | 5 | 7 | 7 | 7 |
| Heimaframleiðsla | 9.727 | 10.297 | 10.945 | 11.954 | 12.709 | 6 | 6 | 9 | 6 |
| Alment | 9.220 | 9.729 | 10.018 | 10.048 | 10.942 | 6 | 3 | 0 | 9 |
| | | | | | | | | | |
| ***Miðallønir (kr.)*** | | | | | | | | | |
| **Tilsamans** | **12.859** | **13.150** | **13.427** | **14.212** | **15.098** | **2** | **2** | **6** | **6** |
| Fiskiskapur | 20.420 | 19.849 | 17.718 | 20.239 | 22.672 | -3 | -11 | 14 | 12 |
| Aling og fiskavirking | 10.024 | 10.652 | 11.816 | 12.404 | 13.104 | 6 | 11 | 5 | 6 |
| Heimaframleiðsla | 12.124 | 12.487 | 13.068 | 13.443 | 14.437 | 3 | 5 | 3 | 7 |
| Almennar lønir | 12.166 | 12.247 | 12.839 | 13.671 | 14.020 | 1 | 5 | 6 | 3 |

*Kelda: Hagstova Føroya*

## Arbeiðsloysi

***Arbeiðsloysið minkað 1% um árið***

Arbeiðsloysið, roknað sum øll skrásett tøk í ALS og hjá Almannastovuni sett í mun til arbeiðsfjøldina, er fallið frá 4,4% í 2000 til 3,6% í 2001 og niður á 2,3% í 2002 – mátað í februar mánaða øll árini. Hesi tøl skulu takast við fyrivarni, tí talið av arbeiðsførum er ikki serliga neyvt uppgjørt. Men hóast hesi fyrivarni, so er eingin ivi um, at arbeiðsloysið í løtuni er sera avmarkað.

***Mynd 4**: Arbeiðsloysið februar 2000 til februar 2002*




*Kelda: Hagstova Føroya*

***Arbeiðsloysið má metast at vera burtur***

Um føroyingar uttanlands ikki vera taldir upp í møguligu føroysku arbeiðsfjøldina, eru vit helst um at vera í eini støðu við ongum arbeiðsloysi, tað vil siga í eini støðu, har alt arbeiðsloysi, ið ber til at fáa burtur við verandi arbeiðsmarknaðarviðurskiftum, er burtur. Tey sum eru skrásett sum arbeiðsleys, eru í nógvum førum bráðfeingis arbeiðsleys, sum bara eru arbeiðsleys nakrar fáar mánaðar, meðan tey eru ávegis úr einum starvi í eitt annað. Skiljast má ímillum hesi arbeiðsleysu, og so tey varandi arbeiðsleysu, sum av ymsum orsøkum hava trupulleikar við at halda eitt fast tilknýti til skipaða arbeiðsmarknaðin. Tað er støðan hjá hesum seinnu, sum er ein samfelagsligur trupulleiki. Hesi eru í dag helst ikki meira enn umleið 1 prosent av arbeiðsfjøldini

***Varandi arbeiðsleys helst ikki meira enn 1% av arbeiðsfjøldini***

Í nógvum londum, serliga í Europa, er tað nærum ógjørligt at fáa arbeiðsloysi niður um 5-6 prosent, og í summum londum hevur arbeiðsloysið ligið upp ímóti og omanfyri 10 prosent, líkamikið hvussu konjunkturstøðan hevur verið. Um roknað verður við, at ymisk sløg av bráðfeingis arbeiðsloysi telur umleið 2 prosent, kann varandi arbeiðsloysið í hesum londum metast til 4 prosent og meira. Hetta er sjálvsagt ein stórur samfelagsligur trupulleiki hjá samfeløgum, har flestu viðurskifti eru innrættað eftir, at fólk eru virkin á skipaða arbeiðsmarknaðinum.

***Varandi arbeiðsleys eru ein vælferðatrupulleiki***

Orsøkin til stóra arbeiðsloysið í hesum londum er serliga at finna í stirvnum arbeiðsmarknaðarviðurskiftum, sum minka um fleksibilitetin á arbeiðsmarknaðinum. Ofta eru krøvini, um hvar og hvørji arbeiði ein

*Varandi arbeiðsleys av stirvnum arbeiðsmarknað*

má góðtaka, ikki serliga víðfevnd. Haraftrat er tað ofta lutfalsliga høgligt ikki at hava arbeiði sammett við at hava arbeiði. Hetta skal ikki takast fyri at merkja, at eitt lív sum arbeiðsleysur er ein dansur á rósum, men bara at munurin millum tøka inntøku hjá teim arbeiðsleysu, og tí lønarinntøku, fólk við fáum arbeiðsmarknaðar-ligum førleikum vanliga hava møguleika fyri at vinna, um tey koma í lønt starv, ikki er so stórur.

Tí er tað ofta ikki serliga kostnaðarmikið at vera umhugsin við, hvørjum tilboðum um starv, ein skal taka av. Hetta inniber bæði fyrimunir og vansar. Í øllum førum merkir hetta, at bráðfeingis arbeiðsloysið er størri, enn í londum við størri muni millum arbeiðsloysisstuðulin og eina láginntøku.

*Væl virkandi føroyskur arbeiðsmarknaður*

At tað í Føroyum ber til at fáa arbeiðsloysið so langt niður, at tað stórt sæð ikki er til longur, er fyrst og fremst ein ábending um, at føroyski arbeiðsmarknaðurin virkar væl. Við hesum verður meint við, at tað tykist sum um samskipanin av teimum, sum ikki eru forðað orsakað av trupulleikum uttanfyri skipaða arbeiðsmarknaðin, sum til dømis manglandi røktarheimspláss fyri avvarandi, virkar væl. Fólk tykjast ikki ganga leingi arbeiðsleys vegna vantandi kunnleika hjá pørtunum á skipaða arbeiðsmarknaðinum um, hvørjum uppgávum arbeiðsgevarar leita eftir fólki til, og hvar arbeiðstakarar við passandi førleika til uppgávurnar eru at finna.

*Føroyski bygnaðurin eggjar til arbeiði*

Haraftrat er lága arbeiðsloysið tekin um, at vit hava arbeiðsmarknaðarviðurskifti, sum eggja fólki til at bjóða seg fram á arbeiðsmarknaðinum heldur enn at halda seg uttanfyri. Sammett við londini rundan um okkum er arbeiðsloysisstuðulin lágur. Lutfalsliga stórur munur er á arbeiðsloysis- ella almannastuðuli og eini lágari lønarinntøku. Hetta eggjar fólki til at koma skjótt í starv aftur, um tey hava mist ella hava sagt seg úr einum starvi. Hesar báðar nevndu orsøkir eru helst orsøkin til, at bráðfeingis arbeiðsloysið í Føroyum er ógvuliga lítið.

### Forðingar fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin

*Arbeiðsfør sleppa ikki framat*

Omanfyri hava vit víst á, at skipaði arbeiðsmarknaðurin í sær sjálvum letur til at virka væl. Men orsakað av viðurskiftum uttanfyri sjálvan tann skipaða arbeiðsmarknaðin er framboðið av arbeiðsmegi á hesum marknað minni, enn tað kundi verið. Orsøkin er trupulleikar við atgongdini hjá nøkrum arbeiðsførum til skipaða arbeiðsmarknaðin.

*Heimabundin vegna bústaðartrot*

Framvegis er tøk arbeiðsmegi, sum ikki hevur umstøður at bjóða seg fram á skipaða arbeiðsmarknaðinum. Tann tøka arbeiðsorkan, sum skal vera partur av grundarlagnum undir framburðinum, finnst bæði heima og uttanlands. Partvíst eru tað fólk, sum eru skerd á skipaða arbeiðsmarknaðinum, tí tey ansa børnum ella gomlum, ella tey eru skerd, tí tey ikki fáa bústað, har arbeiðið er at fáa. Hetta er galdandi bæði fyri føroyingar heima og føroyingar í útlegd – og helst eisini útlendingar, sum kundu hugsast at komið til Føroya at arbeiða.

*Heimabundin vegna ansingartrot*

Ein partur av teimum, sum ikki hava møguleikar at flyta, har røttu størvini eru, finnast í Føroyum. Arbeiðsfør mugu ganga heima, tí tey noyðast at ansa børnum ella gomlum, ella mugu lata sær lynda eitt arbeiði, sum ikki hóskar væl til teirra førleika, tí tey ikki hava møguleika fyri at fáa bústað nærhendis tí rætta starvinum.

*Størsti parturin er uttanlands*

Størri parturin av teim arbeiðsføru, sum ikki eru tøk á arbeiðsmarknaðinum vegna manglandi umstøður, eru at finna uttanlands. Hesi standa ikki uppskrivað nakrastaðni og tí er ógjørligt at meta um, hvussu nógv høvdu flutt til Føroya, um útboðið av bústaðum var størri og møguleikarnir fyri at fáa børnini í barnagarð ella dagrøkt betri. Men netto heimflytingin í 2001 størri enn nakrantíð áður, og helst er lítil ivi um, at enn fleiri høvdu flutt til Føroya, um bústaðarmøguleikarnir vóru betri og barnagarðsplássini fleiri.

*Onki yvirlit finnst um skerda útboðið av arbeiðsorku*

Um umstøðurnar vóru betri, vóru hesi partur av tøku arbeiðsorkuni. Men orsakað av forðingum fyri teirra atgongd til skipaða føroyska arbeiðsmarknaðin, halda tey seg burtur, og eru tey tí ikki partur av føroysku arbeiðsorkuni.

### *Bústaðir*

Í fyrsta lagi hava atgongd til bústaðarmøguleikar og til arbeiðsmarknaðin týdning fyri gagnið hjá tí einstaka. Veruligur møguleiki at velja um og hvar ein vil bjóða seg fram á arbeiðsmarknaðinum hevur týdning fyri frælsi hjá tí einstaka at skapa sær sína tilveru. Í øðrum lagi er hetta ein týðandi fortreyt fyri at skipaði arbeiðsmarknaðurin skal virka væl. Tað hevur tí eisini týdning fyri framleiðsluna av vørum og tænastum í samfelagnum sum heild.

*Húsaprísirnir hækkaðir 10% í miðal*

Á húsamarknaðinum hevur verið serligur prísvøxtur. Sambært hagtølum frá Føroya Sparikassa eru húsaprísirnir hækkaðir eini 10% í meðal um árið síðani 1995. Her hava greið tekin verið um ein marknað, har prísvøxturin – saman við øðrum teknum í samfelagnum - hevur sagt frá manglandi framboð av býlismøguleikum í mun til vaxandi eftirspurningin. Bíðilistarnir til grundstykkir í Havn og fleiri av størru bygdunum eru langir, sethúsaprísirnir skjótt hækkandi, og í pørtum av landinum eru íbúðir sera ringar at fáa fatur á.

*Trupult at flyta heim*

Hetta ger tað dýrt ella ógjørligt at flyta, har møguleikarnir fyri teim røttu størvunum eru at finna. Aftrat at virka sum ein forðing fyri flyting innanlands, hava manglandi íbúðarmøguleikarnir og harvið høgu prísirnir á íbúðum og sethúsum uttan iva við sær, at fleiri ikki halda seg til at flyta til Føroya, tí tað ikki loysir seg fíggjarliga ella beinleiðis ikki letur seg gera.

Hetta skapar óneyðugar trupulleikar fyri arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar, tí samskipan av røttu starvsfólkunum til røttu uppgávurnar gerst truplari, og góðskan á avrikunum kann gerast verri, enn hon annars hevði verið. Úrslitið verður sjálvsagt eisini ein negativ ávirkan á effektivitetin í framleiðsluni av vørum og tænastum í samfelagnum

sum heild.

***Almenna uppgávan á íbúðarmarknaðinum forsømd***

Tað almenna hevur verið ov seint á sjóvarfallinum til at veita tann almenna partin av loysnini til at nøkta bústaðartørvin. Serliga útstykkingin av grundstykkjum hevur verið og er ov lítil, og tí er atgongdin til bústað avmarkað serliga vegna manglandi útstykking og byggibúning av grundstykkjum. Men hugsast kann saktans, at tað almenna eisini eigur at vera við til at loysa aðrar partar av íbúðartørvinum. Skúlaheim, eldraíbúðir og avlamisíbúðir eru mál, sum helst tørvur er á, at tað almenna er við til at loysa.

***Húsaprísurin í Havn tvær ferðir so stórur sum aðrastaðni . . .***

***. . . og vax tvær ferðir so skjótt***

Í Havn er prísurin væl omanfyri prísin í øðrum pørtum av landinum. Í 2001 vóru prísirnir í Havn í miðal tvær ferðir prísin í restini av landinum. Haraftrat vax prísurin hesi seinastu 3 árini slakar tvær ferðir so skjótt í Havn sum hann gjørdi í restini av landinum. Hetta er marknaðartekin um, at tað er í Havn at størsti tørvurin er, og at tað er her tann almenni leikluturin viðvíkjandi framboð av grundstykkjum og møguliga eisini skúlaheimum og íbúðum til eldri haltar mest aftaná.

### *Barnagarðar*

***Maðurin til arbeiðis og konan ansar børnum***

Ein onnur forðing fyri atgongd til arbeiðsmarknaðin, og sum serliga rakar kvinnurnar, er, at arbeiðsfør fólk mugu ganga heima, tí tey vegna manglandi barnagarðs- ella dagrøktarpláss verða noydd til at ansa børnum. Vanliga mynstrið í løtuni er, at hjá teimum sum eiga børn, men sum ikki fáa barnagarðs- ella dagrøktarpláss, fer maðurin út á arbeiðsmarknaðin, meðan kvinnan fer heim at passa børnini.

Hetta er eingin trupulleiki, um talan er um eitt frítt val hjá fólki at skipa seg soleiðis. Men oftast er hetta ein neyðloysn, tí ikki ber til at fáa barnagarðs- ella dagrøktarpláss. Í hesum føri verður tað ein trupulleiki, í fyrsta lagi hjá tí, sum ikki sleppur út á arbeiðsmarknaðin, og í øðrum lagi hjá fyritøkum og samfelagnum sum heild, sum missir tað virðisskapan, ið hesi fólkini kundu verið við til at skapt.

***Kvinnur sleppa ikki til arbeiðis***

Her er talan um ein óhepna nýtslu av tøku arbeiðsorkuni. Tøka arbeiðsmegin hevði verið gagnnýtt betur, um ansingin av børnum og gomlum hevði verið skipað øðrvísi. Í fyrsta lagi verður alt ov nógv arbeiðsført fólk brúkt til at passa børn og gomul, tí hvørt fólk bara passar síni egnu børn, sum ofta bara eru 1 ella 2 í tali.

***. . . og útbúnir føroyingar sleppa ikki heim***

Haraftrat koma so tey, sum í løtuni búgva uttanlands, og eru áhugað í at flyta til Føroya at arbeiða, men sum ikki koma, tí tey ikki hava møguleika fyri at fáa børnini ansaði. Í hesum føri er talan ofta um tvey fólk, sum kundu verið virkin á føroyska arbeiðsmarknaðinum, men sum ikki eru tað, tí hvørki maður ella kona koma heim, um so er, at bæði ikki sleppa út á føroyska arbeiðsmarknaðin. Hesi kundu økt um tøku arbeiðsorkuna í samfelagnum, men vegna forðingar fyri atgongdini til skipaða arbeiðsmarknaðin halda tey seg burtur. Eyðsæð er, at hetta ikki er ein heppin støða, hvørki fyri fólkini sjálvi ella fyri samfelagsbúskapin.

*Røktarheim*

***170 fólk við ansingarstuðli***

Trupulleikin er tann sami við ansing av gomlum. Í løtuni fáa umleið 170 fólk ansingarstuðul, t.e. stuðul til at ganga heima og ansa eftir einum avvarandi. Helst høvdu nøkur av hesum verið heimaarbeiðandi, líkamikið um tey fingu ansingarstuðul ella ikki, men meginparturin hevði uttan iva verið virkin í arbeiðsuppgávum á skipaða arbeiðsmarknaðinum, høvdu tey møguleikan.

***Bæði ein sosialur vælferðartrupulleiki***

Um 170 er eitt gott boð upp á talið av teimum, sum høvdu verið úti á skipaða arbeiðsmarknaðinum, um tey ikki vóru noydd til at vera heima og passa avvarandi, er ringt at meta um. Men eingin ivi kann vera um, at tørvurin á røktarheimsplássum er stórur. Fyrst og fremst er sjálvsagt neyðugt við røktarheimsplássum, fyri at tey gomlu skulu kunnu fáa góða og trygga røkt. Hetta er ein sosialur vælferðatrupulleiki, tí bæði tey gomlu og familjurnar, sum ansa teimum, koma mangan í neyð av vánaligu umstøðunum.

***. . . og ein arbeiðs-marknaðartrupulleiki***

Umframt er neyðugt við røktarheimsplássum, fyri at arbeiðsfør, ið fegin vilja vera virkin á skipaða arbeiðsmarknaðinum, men sum ikki í løtuni hava møguleikan, kunnu fáa møguleika fyri hesum.

## Brúkaraprístal og húsaprísir

Síðani juli 2001 og fram til juli 2002 hevur prístalið samanlagt staðið í stað. At vit sum keyparar kortini halda, at prísvøxtur hevur verið, kemur av at tað serliga eru samskiftistænastur og –útbúnaður og rentan, sum draga prístalið niður. Hinvegin eru til dømis matvøruprísirnir 2% hægri í juli 2002 enn í juli 2001.

***Talva 5:*** *Brúkaraprístalið útgreinað í 2001 og 2002*

| | 2001 | | 2002 | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **1. juli** | **1. okt.** | **1. jan.** | **1. apr.** | **1.juli** |
| Matur og drekka | 101,3 | 102,4 | 102,1 | 103,0 | 103,4 |
| Rúsdrekka og tubbak | 100 | 100,1 | 100,1 | 100,1 | 100,2 |
| Klædnavørur og fótbúnaður | 99,9 | 100,8 | 101,1 | 101,4 | 101,4 |
| Býli | 100,8 | 98,6 | 92,5 | 92,1 | 93,8 |
| Innbúgv, húsbúnaður o.l. | 100,6 | 100,6 | 100,9 | 102,1 | 102,3 |
| Heilsa | 100 | 100,0 | 99,8 | 99,6 | 102,4 |
| Flutningur | 99,7 | 96,1 | 97,7 | 98,6 | 99,9 |
| Samskifti | 94,8 | 94,7 | 95,9 | 92,8 | 92,8 |
| Frítíð og mentan | 102 | 101,6 | 103,3 | 104,2 | 105,7 |
| Útbúgving | 100 | 104,1 | 104,1 | 104,1 | 104,1 |
| Hotel og matveitarar | 102,6 | 105,7 | 106,3 | 106,8 | 106,4 |
| Ymiskar vørur og tænastur | 100,4 | 100,7 | 101,6 | 103,1 | 103,7 |
| **Samanlagt** | **100,5** | **100,0** | **99,3** | **99,6** | **100,5** |

*Kelda: Hagstova Føroya*

***Matur, klæði og húsbúnyttur toga upp . . .***

Hesar seinastu 4 ársfjórðingarnar er tað matur og drekka, klædnavørur og fótbúnaður, innbúgv, frítíðartænastur, útbúgving og ymiskar aðrar tænastur, sum hava togað upp, meðan serliga útreiðslur til býli og samskifti hava togað niður. Samanlagt útjavnað tey hvørt annað, soleiðis at prístalið er tað sama 1.juli 2002, sum tað var 1.juli 2001 – nevnliliga 100,5.

***. . . býli og samskifti draga niður***

Samanlagt er útreiðslan til býli fallin 7 prosentstig seinastu 4 ársfjórðingarnar. Rentuútreiðslan er stórsti parturin av býlisútreiðslunum, og rentan er fallin nógv hetta tíðarskeiðið. Haraftrat er brennioljuprísurin eisini fallin í skeiðinum.

Á samskiftisøkinum hevur kappingin fingið prísirnar niður, og tí dregur tann bólkurin prístalið niðureftir.

Sambært brúkaraprístalinum er støðið á samanvigaðum brúkaraprísum í 2001 25% hægri enn í 1995. Størsti prísvøxturin var árini 1998 til 2000, meðan vøxturin í 2001 var minni enn vanligt. Ì hesum sambandi skal havast í huga, at vit í 2001 fingu nýtt prístal, sum er eitt betri og meira tíðarhóskandi mát enn gamla prístalið, sum nú er farið úr nýtslu. Tað vil siga, at prísvøxturin árini undan 2001 er mátaður við einum annarleiðis máti, sum ikki kann samanberast við nýggja mátið, sum varð tikið í nýtslu í 2001.

***Talva 6:*** *Brúkaraprístalið 1995 til 2001*

| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brúkaraprístal | 100,0 | 102,7 | 105,5 | 110,5 | 116,2 | 121,9 | 125,2 |
| Árligur vøxtur | 3,2% | 2,7% | 2,8% | 4,7% | 5,1% | 4,9% | 2,7% |

*Kelda: Hagstova Føroya*

### *Prístalið í Føroyum samanborið við grannalondini*

Munandi størri prísvøxtur var í Føroyum samanborið við prísvøxturin í londunum kring okkum tey trý árini frá 1998 til 2000. Men í 2001 og serliga í 2002 er prísgongdin her heima farin at líkjast prísgongdini í grannalondunum.

Av tí, at gamla brúkaraprístalið serliga seinastu árini var heilt annaðleiðis samanvigað enn veruliga nýtslusamansetingin, kann ein partur av vøxtrinum í prístalinum standast av misvísandi máting av prísgongdini.

Gamla prístalið var eisini so mikið annaðleiðis samanvigað enn brúkaraprístølini í grannalondunum, at ein samanbering av prísgongdini byggir á heldur veikt grundarlag.

Men munurin í prísgongdini kann eisini standast av, at vøxturin í búskapinum í Føroyum, var munandi størri enn í Íslandi og Danmark hesi árini.

***Mynd 5**: Brúkaraprístøl í Føroyum, Íslandi og Danmark*




*Kelda: Hagstova Føroya*

***Størri prísvøxtur enn í flestu grannalondum***

Í 1999 var vøxturin í brúkaraprístalinum (frároknað býlisútreiðslur) í miðal 3,5% størri í Føroyum enn í Íslandi, Danmark og Noregi. Í 2000 var munurin komin niður á 2%. Í 2001 lógu vit umleið 1% hægri enn Danmark og Noreg, men 3,3% lægri enn Ísland, sum hevur havt rættuliga stóra inflasjón seinastu 2 árini. Í 2002 eru útlit til, at prísvøxturin í Føroyum verður minni enn í Danmark og Noregi.

**Vinnurnar**

*Útflutningsprísir 2001 og útlit fyri 2002*

***Ongin prísmunur millum 200 og 2001***

Samanlagt vóru útflutningsprísirnir í fjør ikki betri ella verri enn í 2000. Flestu útflutningsvørur fingu betri prís, meðan laksur og rækja togaðu miðalið niður, so at eitt lítið fall varð samanlagt í útflutnings-prísunum.

Móti ársenda í 2001 og fyrstu fimm mánaðarnar av 2002 eru tó nakrar broytingar farnar fram í útflutninginum, sum benda á, at útflutningsprísirnir í 2002 í miðal fara ikki at vera betri enn í fjør.

Útflutningsprísirnir á ísaðum toski og hýsu fullu seinna hálvár í fjør munandi – út ímóti 20 prosentum – men togaðu seg nakað uppaftur fyrstu mánaðarnar í ár, kortini so, at prísirnir vóru millum 1 og 3% lægri fyrsta árfjórðing í ár enn í fjør.

***Fryst flak heldur prísin . . .***

***Men saltfiskur fellur***

Fyri flestu flakaframleiðslurnar heldur prísurin sær á sama høga støði, sum hava verið hesa seinastu tíðina, og har sýnast ikki í løtuni at vera tekin um prísfall. Men saltfiskaframleiðslan sær út til at vera komin í fallandi marknað og liggja prísirnir fyrstu mánaðarnar í ár nakað væl niðanfyri sama tíðarskeið í fjør.

Laksaútflutningurin liggur í prísi eini 20% undir prísinum fyrstu mánaðarnar í 2001.

***Útlit til samanlagt fall í 2002***

Samanlagt bendir hetta á, at miðal prísirnir í útflutningi fara at falla í ár í mun til í fjør – um ikki nakað avgerandi hendir út á árið. Tað verður valla tann stóri munurin, men eindarvirðisvísitalið fyri útflutning kann væntast at fara at liggja eitt ella tvey prosent undir virðinum í fjør.

### *Avreiðingar, avreiðingarprísir og útflutningur av óvirkaðum*

Minking var í prísunum á útfluttum feskum ísaðum toski og hýsu longu á vári í fjør, men avreiðingarprísirnir – serliga á toski – minkaðu ikki fyrr enn nakað væl seinni.

***Mynd 6****: Árstíðarjavnaðir avreiðingar- og útflutningsprísir á toski*




*Kelda: Hagstova Føroya*

***Fall í toskaprísi***

Fyrsta ársfjórðing í ár lá toskaprísurin sløk 30% undir prísinum fyrsta árfjórðing í 2001. Hetta var fyrsti ársfjórðingur í longri tíð, at toskur fekk minni prís enn sama ársfjórðing árið fyri. Undan hesum lá hann millum 1 og 6% omanfyri somu ársfjórðingar undan.

***Vænta at hann kvinkar nakað upp aftur***

Tekin eru um, at avreiðingarprísurin fer at vaxa aftur, og lítið trúligt er at hann skal liggja so mikið langt undir útflutningsprísinum í longri tíð. Fyrsta ársfjórðing í 2002 lá avreiðingarprísurin slakar 5 krónur undir útflutningsprísinum. Væntast kann tí helst, at avreiðingarprísurin fer at kvinka nakað upp aftur, um ikki heilt upp á  tær 19 krónurnar í miðal, sum hann hevur ligið á.

***Serligar orsøkir***

At hetta brádliga fallið kom í avreiðingarprísirnar stóðst av, at nógvur fiskur kom á føroyska marknaðin við várróðrinum og góðum fiskiskapi annars. Haraftrat stóðust trupulleikar av at fáa fisk fluttan millum oyggjarnar undir verkfallinum hjá Skipara- og Navigatør-felagnum, so at prísirnir fullu so at siga á øllum støðum. Soleiðis vóru

tað óvanlig viðurskifti, sum spældu inn og fingu avreiðingarprísirnar niður um væntaðan marknaðarprís.

***Mynd 7:*** *Árstíðarjavnaðir avreiðingar- og útflutningsprísir á hýsu*




*Kelda: Hagstova Føroya*

***Eisini lækking í hýsuprísinum***

Hýsuprísurin lækkaði rættiliga nógv í 2001 – bæði tá talan er um útflutningsprís og avreiðingarprís. Útflutningsprísurin er tó væl omanfyri avreiðingarprísin. Hetta hevur verið støðan í nógv ár, men fyrsta ársfjórðing lá avreiðingarprísurin slakar 6 krónur undir útflutningsprísinum, sum er óvanliga nógv.

Upsaprísurin helt sær á sama støði í 2001 sum í 2000, kanska eitt lítið sindur lægri.

Eftir øllum at døma fáa feskfiskaskipini í Føroyum ein prís fyri fiskin, sum er kappingarførur við útlendsku prísirnar. Hann er ikki eins høgur og summa staðni í Europa, tí hann fær ikki verið eins feskur, tá hann verður keyparanum í hendi. Men hóast onkrar forðingar eru, t.e. til dømis kravið um landing av ávísum parti av veiðini á Fiskamarknaði Føroya, so fáa skipini "europeiskan" prís fyri fiskin.

***Vaxandi partur av hýsuni útflutt ísað***

Eftir tølunum at døma er vaxandi munur á landingarprísinum á hýsu – hon fær munandi betri prís uttanlands enn herheima, serliga í Bretlandi. Tí verður eisini ein vaxandi partur av hýsuni útfluttur óvirkaður. Farast skal aftur til 1997 fyri at finna eins stóran útflutningspart av óvirkaðari hýsu.

Fiskiskapurin í heimasjógvi hevur verið rættuliga góður seinasta árið. Samlaða veiðan av teim seks týdningarmestu fiskasløgunum, toski, hýsu, upsa, kongafiski, havtasku og svartkalva, var 93.446 tons, sum er 12,7 prosent meira enn í 2000, tá samlaða veiðan av hesum fiskasløgum var 81.538 tons.

**Talva 7:** *Avriðingarvirði hjá heimaflotanum (mill. krónur)*

| | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hekkutrolarar | 107 | 118 | 135 | 130 | 150 | 150 | 167 | 180 |
| Partrolarar | 132 | 132 | 179 | 191 | 256 | 245 | 295 | 330 |
| Stállínuskip | 96 | 109 | 114 | 170 | 200 | 190 | 170 | 215 |
| Smábátar | 95 | 126 | 143 | 220 | 260 | 245 | 285 | 350 |
| Garnabátar | 35 | 29 | 29 | 40 | 55 | 80 | 95 | 95 |
| Heimafloti íalt | 465 | 514 | 600 | 751 | 921 | 910 | 1012 | 1170 |

*Kelda: Føroya Banki*
*Viðmerking: Tølini fyri 2001 eru metingar*

Veiðuvirðið av hesum seks fiskasløgum vax eitt sindur minni, nevniliga 10,6 prosent. Veiðuvirðið var slakar 1.073 milliónir í 2001, meðan tað var slakar 959 milliónir í 2000. Samlaða veiðivirðið av øllum fiskasløgum hjá heimaflotanum býtt á reiðskap sæst í talvuni omanfyri.

***Nærum 1 miljard í hýrum í 2001***

Økta veiðuvirðið sæst aftur í løngjaldingunum. Samlaðu løngjaldingarnar í fiskiveiðu vóru umleið 978 milliónir krónur síðsta ár ella 997 milliónir krónur, um tær 20 milliónir krónurnar fiskimennirnir fingu útgoldnar úr landskassanum sum minstaløn, dagstudningur og líknandi, verða taldar við. Hetta er ein vøxtur upp á 17 prosent mótvegis 2000, tá samlaðu løngjaldingarnar vóru 851 milliónir krónur, íroknað tær 21 milliónir krónurnar, sum vórðu útgoldnar úr landskassanum.

***Mest í feskfiskaveiði***

Størsti bólkurin er feskfiskaveiða. Løngjaldingarnar í feskfiskaveiðu hava seinasta árið ligið millum 50 og 60 milliónur krónur um mánaðin, soleiðis at samlaðu løngjaldingarnar í hesum bólkinum í 2001 vóru 677 milliónir krónur móti 586 milliónum krónum í 2000. Hetta er ein vøxtur upp á 15 prosent.

**Talva 8:** *Avreiðingarvirði hjá fjarflotanum (mill. krónur)*

| | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nótabátar | 78 | 135 | 200 | 200 | 280 | 150 | 270 | 456 |
| Flakatrolarar | 240 | 240 | 250 | 270 | 260 | 250 | 265 | 269 |
| Rækjuskip | 160 | 200 | 160 | 170 | 190 | 210 | 190 | 275 |
| Ídnaðarskip | 32 | 14 | 10 | 10 | 15 | 10 | 10 | 10 |
| Langfaraskip íalt | 510 | 589 | 620 | 650 | 745 | 620 | 735 | 1010 |

*Kelda: Føroya Banki*
*Viðmerking: Tølini fyri 2001 eru metingar*

***Størsti vøxtur í ídnaðarveiði***

Størsti vøxturin í løngjaldingunum í fiskiskapi seinasta árið hevur verið í ídnaðarfiskiskapi. Løngjaldingarnar í hesum bólkinum øktust 82 prosent frá ár 2000 til 2001, úr 70 milliónum krónum, til 127 milliónir krónur.

Flakatrolararnir øktu løngjaldingarnar við 7 prosentum frá ár 2000 til 2001, úr góðum 70 milliónum krónum upp í góðar 75 milliónir krónur.

Hesir tríggir bólkarnir stóðu sostatt fyri 879 milliónum krónum í samlaðum løngjaldingum í fjør, og er tað umleið 90 prosent av samlaðu løngjaldingunum í fiskiskapi. Av tí at teir allir høvdu framgongd í fjør, hevur hetta meira enn uppviga afturgongdina í hinum bólkunum.

### *Rækjuflotin*

***Valla grundarlag fyri so nógvum rækju-skipum***

Einki er at taka seg aftur í, at rækjuflotin er í kreppu. Sum er, klára flestu rækjuskipini ikki at forrenta verandi skuld í skipunum, hóast skuldin í skipunum áður er sanerað. Fyrsta rækjuskipið er longu farið á húsagang, og fleiri kunnu fara, um støðan stendur við. Útlit eru tí til, at bert fá rækjuskip er lívfør. Hetta merkir, at nógv av teimum umleið 400 arbeiðsplássunum í rækjufiskiskapi eru í vanda fyri at hvørva.

Árligu lønargjaldingarnar hjá rækjuskipunum hava tvey tey seinastu árini ligið um 40 milliónir krónur, 41 milliónir í 2000 og 39 milliónir í 2001. Um til dømis 8 av teimum 10 rækjuskipunum fara av knóranum minka løngjaldingarnar umleið 30 milliónir krónur, svarandi til umleið ½ prosent avsamlaðu løngjaldingunum. Roknast kann haraftrat við, at ein stórur partur av hesum verður vunnin innaftur við, at manningarnar fáa arbeiði aðrastaðni. Tí kann sigast, at fyri konjukturgongdina hevur kreppan á rækjuflotanum helst lítið at siga, hóast tað er svárt hjá húskjunum at missa inntøkur og hjá manningum at missa hýruna.

### *Fiskavirking*

Fiskavirkini høvdu eitt lutfalsliga gott ár í 2001, sjálvt um avkastið framvegis er ov lítið í mun til ta kapitalnøgd, sum er í vinnuni. Samlaða avlopið í fiskavirking í 2001 liggur um 45 milliónir krónur, sum er væl betur enn í 2000, tá samlaða avlopið var umleið 20 milliónir krónur.

***Talva 9:*** *Virking av fiski (tús. tons)*

| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Veiða hjá feskfiskaflotanum | 95 | 102 | 103 | 95 | 98 | 112 |
| Útlendsk rávøra | 8 | 5 | 5 | 5 | 7 | 5 |
| Virkað | 75 | 77 | 87 | 83 | 90 | 97 |
| Flutt út feskt | 28 | 30 | 21 | 17 | 15 | 20 |

*Kelda: Føroya Banki*
*Viðmerking: Tølini fyri 2001 eru metingar*

Samlaðu løngjaldingarnar eru eisini øktar heilt fitt seinasta árið, bæði orsakað av lønarhækkingin og fleiri arbeiðsplássum. Í 2001 vóru samlaðu løngjaldingarnar útvið 373 milliónir krónur, sum eru góð 7 prosent meira enn í 2000, tá løngjaldingarnar vóru 346 milliónir krónur. Av hesum stavar størsti parturin frá virking av feskum og

frystum fiskavørum. Løngjaldingarnar í hesum bólkinum vóru 263 milliónir krónur, ella smá 5 prosent meira enn í 2000, tá løngjaldingarnar vóru umleið 250 milliónir krónur.

Bólkurin sum økti minst um løngjaldingarnar í 2001 var virking av skeljadýrum, sum økti løngjaldingarnar við góðum 3 prosentum. Allir hinir bólkarnir øktu løngjaldingarnar við millum 8 og 21 prosentum.

Annars er tað áhugavert, at flakavirkini eru farin at leggja seg eftir at gjalda meira enn sáttmálaløn til arbeiðsfólki. Og nøkur virkir eru farin at seta fólk í fast størv heldur enn tímalønt størv. Hvørki av hesum hevur verið vanligt. Helst skyldast hetta, at tað er trupult at fáa dugnalig starvsfólk at støðast á virkjunum uttan tryggar og góðar umstøður. Bæði konjunkturstøðan og meira alment øktu møguleikarnir fyri góðum størvum aðrastaðni eru við til at geva arbeiðsfólkinum eina góða samráðingarstøðu.

## *Alivinnan*

***Mynd 8:*** *Miðal laksaprísur 2000-2002*




*Kelda: Føroya Sparikassi og Norsk Fiskeoppdrett*
*Viðmerking: Prísirnir eru umroknaðir til DKK við dagskurs*

Serliga í 2000 var prísurin á alilaksi sera góður, og meginpartin av 2001 var prísurin eisini høgur. Men frá í fjør heyst og nakað út á várið í ár lá prísurin á alilaksi á heimsmarknaðinum undir føroyska framleiðslukostnaðinum. Alifyritøkurnar arbeiddu tí við undirskotið hetta tíðarskeiðið. Síðani hevur prísurin sveiggjað um eitt støðið, sum liggur um føroyska framleiðsluprísin.

Fólk í alivinnuni vænta, at prísurin fer at hækka aftur seinni í ár, so

hóast flestu alifyritøkurnar høvdu undirskot á rakstrinum seinnu helvt av 2001 og í byrjanini av 2002, tykist tað tí bara vera ein spurningur um tíð, áðrenn alivinnan aftur fær positiv tøl á botnlinjuna.

ILA sjúka varð staðfest í fiskinum hjá fleiri alifyritøkum í 2001. Trupulleikar kunnu stinga seg upp, um sjúka aftur í ár fer at gera um seg á alifirðunum. Higartil vísa royndirnar við ILA tó, at torført er at meta um fíggjarligu avleiðingarnar fyri feløgini av sjúkuni. Serliga stendst hetta av, at deyðiligheitin av sjúkuni er ymisk, frá at vera stór í Fuglafirði og Funningsfirði til at vera avmarkað í Oyndarfirði. Hjá sjúkuraktu brúkunum í Lambavík, Kaldbaksfirði og hjá Gulanum í Havn hevur higartil ikki verið staðfest stór deyðiligheit av ILA.

Ein annar trupulleiki hjá alivinnuni er, at sjúka er staðfest í brakklagdum firðum. Hetta hevur ført til at firðir, ið eftir ætlan aftur skuldu takast í brúk innan stutta tíð, hava fingið longt karantenutíðina. Fyri at kunna seta nýggjan laks út hava alarar tí verið noyddir til at taka laks úr verandi ringum, hóast fiskurin ikki enn hevði fingið optimalu støddina. Mangulin upp á tøkar firðir at ala á kann tí vera ein fíggjarligur trupulleiki yvir styttri tíðarskeið, og kann yvir longri tíðarskeið føra til, at alivinnan ikki verður so nógv útbygd, sum hon annars kundi verið.

Sjúkutrupulleikarnir oyðileggja tó ikki myndina av, at sum heild tykjast framtíðarvánirnar hjá alivinnuni vera góðar. Alivinnan hevur gjørt nógvar og stórar íløgur seinastu árini fyri at betra um framleiðsluevnini. Framleiðslan er so effektiv, at framleiðslu-kostnaðurin fyri hvørt kilo av alifiski er millum teir lægstu í heiminum. Flestu alifyritøkurnar eru sostatt kappingarførar og haraftrat væl fyri fíggjarliga, so tær klára at standi ímóti stuttíðar bakkøstum.

***Talva 10:*** *Útflutningur av alifiski (tons)*

| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útflutningur av óvirkaðum | 14700 | 15930 | 15600 | 34000 | 28000 | 39000 |
| Útflutningur av virkaðum | 1900 | 2870 | 5000 | 8000 | 7000 | 9000 |
| **Samlaður útflutningur** | **16600** | **18800** | **20600** | **42000** | **35000** | **48000** |
| | | | | | | |
| Lutfall virkað/óvirkað | 0,11 | 0,15 | 0,24 | 0,19 | 0,20 | 0,19 |

*Kelda: Føroya Banki*
*Viðmerking: Tølini fyri 2001 eru metingar*

## *Byggivinna*

Byggivinnan er støðugt vaxin í vavi hesi seinastu árini. Bæði bygging av almennum íløgum, sethúsabygging og privat vinnulig bygging.

Hóast stóra vøxturin í byggivinnuni, er vinnan í vavi langt frá so stór sum hon var í áttati árunum. Tað sæst bæði av talinum á lønargjald-ingum, talinum av sethúsum og innflutninginum av byggitilfari.

Lønargjaldingar í byggivinnu sum heild er vaxin við 18% í miðal hesi seinastu 3 árini. Talan er tá um alla byggivinnu sum heild, privata sum almenna, og ikki einans lønir til sethúsabygging. Vøxturin er rímuliga stórur, men tað er mangt sum týðir upp á at hann kundi havt verið væl størri, um tørvurin á bygging skuldi verið fullnøktaður.

Sethúsabyggingin hesi seinastu árini hevur verið alt ov lítil. Hetta verður ikki sagt tí at Búskaparráðið meinar at hvør familja endiliga skal búgva í hvør sínum sethúsum, heldur enn í leigaðum íbúðum ella samanbygdum raðhúsum. Hetta skal heldur skiljast soleiðis, at við tí vitan, at so gott sum ongar íbúðir verða veittar gomlum, ungum ella barnafamiljum, ber til at siga, at sethúsabyggingin er alt ov lítil.

At so fá sethús verða bygd, kemst ikki av, at fólk ikki hava hug at byggja, men av tí einfaldu orsøk at tað almenna – í hesum føri kommunurnar, serliga Havnar kommuna – ikki hava syrgt fyri byggilendi í røttum tíma.

Niðanfyri eru víst innflutningur av timburtilfari og sementi til byggivinnuna, løngjaldingar til byggivinnuna og tal av størvum í byggivinnuni.

***Mynd 9****: Byggitilfar, lønargjaldingar og størv í byggivinnu*
*Broytingar í mun til árið frammanundan í prosentum*




*Kelda: Hagstova Føroya*

Ongin verulig lýsing er framd um íbúðarmarknaðin. Tí er torført at gera sær nakra próvfasta meting um, hvørt tað eru ov fá hús og íbúðir til og um íbúðarbyggingin gongur nóg skjótt.. Torført er eisini at siga nakað grundað á prísirnar á seldum sethúsum – um teir eru høgir ella lágir, t.e. um teir eru tekin um nakað ávíst á íbúðarmarknaðinum.

Hóast hetta er tað rættuliga eyðsýnt, at sethúsabyggingin er so lítil, at hon sýnist at vera kanska mest álvarsliga forðingin fyri búskaparligu framgongdini, eins og hon eisini sýnist at vera ein meginorsøkin til

vøxturin í prísinum á eldri sethúsum í umfari.

Eitt er, at tað hvørt ár fara ungar føroyskar familjur at royna at byggja sær hús ella á annan hátt veita sær tak yvir høvdið. Haraftrat kemur so tann nógv tiltrongdi parturin av føroyingum (og øðrum) í útlegd, sum ynskir at flyta til Føroya at arbeiða.

***Talva 11****: Sethúsabygging í fimmára skeiðum frá 1977 til 2001*

| 5 ára skeið | Miðaltal av nýbygdum sethúsum pr. ár |
|---|---:|
| 1977 – 1981 | 330 |
| 1982 – 1986 | 301 |
| 1987 – 1991 | 324 |
| 1992 – 1996 | 77 |
| 1997 – 2001 | 110 |

*Kelda: Árbók fyri Føroyar*

Sum talvan omanfyri vísir, so eru omanfyri 300 hús bygd í miðal øll árini frammanundan kreppuárunum – mest sjálvsagt árini 1988 og 1989. Undir kreppuni vóru bygd 77 hús í miðal um árið, meðan miðalið eftir kreppuna og fram til 2001 eru bygd 110 hús um árið. Tað mesta bygt var hetta seinasta skeiðið var í 2001, tá 164 hús vórðu bygd.

Var tað nú vorðið soleiðis at almenn bygging av eldraíbúðum hevði gjørt nógv eldri hús tøk til yngri familjur at yvirtaka, og tað almenna hevði bygt nógv skúlaheim ella íbúðarbygningar av øðrum sosialum slag, so var kanska tørvur á færri sethúsum.

***Mynd 10****: Tal á nýbygdum sethúsum frá 1975 til 2001*




*Kelda: Árbók fyri Føroyar*

Men støðan er jú nettupp tann, at so at siga einki er bygt av slíkum

almennum íbúðum, og haraftrat hava kommunurnar verið ov seinar at nøkta tørvin á byggilendi til sethús.

Tað, sum nú er í ferð við at henda er at tað almenna kann finna upp á at fremja óhepnar serskattareglur fyri leiguíbúðir, bert fyri at loysa ein trupulleika, sum upprunaliga átti at verið loystur á annan hátt.

Eitt annað, sum kann henda er, at tað almenna finnur upp á at seta fíggjarpolitisk tiltøk í verk fyri at darva einum hitnandi búskapi, hóast trupulleikin í veruleikanum er seinføri hjá kommununum at veita hóskandi byggilendi til sethúsabygging.

Tá ov lítið av fólki sleppur heim til arbeiðis í Føroyum, ella fólk flyta av landinum vegna húsaneyð, verður eftirspurningurin eftir arbeiðsfólki lættliga størri enn framboðið. Inflasjón í lønum og prísum kann tá fáa politisku myndugleikarnar at leggja eyka skattir ella avgjøld fyri at minka um eftirspurningin.

Hetta verður sagt fyri at vísa á, at við seinføri í veitingini av sethúsagrundstykkjum, kann henda, at trupulleikin elvir til lønar- og prístrýst, sum politisku myndugleikarnir lítið annað kunnu gera við enn at økja skattir og avgjøld. Hetta hóast trupulleikin í botn og grund er ein heilt annar – nevniliga sethúsatrot.

Tí er umráðandi, at kommunurnar – og tað er serliga Havnin og størru kommunurnar – hava nóg mikið av íbúðarmøguleikum. Annars kann hetta gerast ein landstrupulleiki, sum ikki kann latast upp í hendurnar á lokalum myndugleikum, sum oftast hava onnur endamál enn landsbúskaparlig fyrilit, at avgera einsamallir.

**Tað almenna**

### *Landskassin*

Eyðkent fyri hesi seinastu nógvu árini er, at Landskassin hevur havt stór avlop – millum 200 og 700 miljónir – sum er millum 3 og 7% í mun til tøku bruttotjóðarinntøkuna.

Eitt annað eyðkenni fyri hesi árini er, at íløgurnar eru vaxnar munandi ár um ár. Men hóast íløgurnar hjá landinum í 2001 eru 3 ferðir so stórar sum í 1997, eru tær kortini ikki meira enn millum 1 og 2% av tøku bruttotjóðarinntøkuni. Heldur enn at vera tekin um ov stóran vøxtur, er heldur talan um at íløgurnar eru í ferð við at koma upp úr tí støðuni, at vit nóg illa hildu almennu ognirnar við líka, og fram at tí støðuni at viðlíkahaldið verður framt og neyðugar nýíløgur verða framdar.

***Talva 12**: Landskassaroknskapur gjørdur sambærligur um ár*

| 1.000 krónur | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettorakstur | -1.272 | -1.324 | -1.441 | -1.534 | -1.690 |
| Landsíløgur | -62 | -76 | -118 | -176 | -185 |
| Almannaveitingar | -1.538 | -1.429 | -1.362 | -1.400 | -1.471 |
| Skattainnt. Og ríkisveiting | 3.043 | 3.311 | 3.592 | 3.767 | 4.165 |
| Flyting m. alm. myndugl. | -12 | -30 | -73 | -73 | -109 |
| Fíggjarpostar | 19 | 19 | 50 | 19 | -13 |
| Landskassaavlop | 178 | 472 | 648 | 602 | 697 |

| Í prosent av tøkari BTI | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettorakstur | -18 | -17 | -17 | -16 | -16 |
| Landsíløgur | -1 | -1 | -1 | -2 | -2 |
| Almannaveitingar | -22 | -18 | -16 | -15 | -14 |
| Skattainnt. Og ríkisveiting | 44 | 42 | 42 | 40 | 40 |
| Flyting m. alm. myndugl. | -0 | -0 | -1 | -1 | -1 |
| Fíggjarpostar | 0 | 0 | 1 | 0 | -0 |
| Landskassaavlop | 3 | 6 | 8 | 6 | 7 |

| Ársupphæddir í Index 1997 = 100 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettorakstur | 100 | 104 | 113 | 121 | 133 |
| Landsíløgur | 100 | 124 | 192 | 287 | 301 |
| Almannaveitingar | 100 | 93 | 89 | 91 | 96 |
| Skattainnt. Og ríkisveiting | 100 | 109 | 118 | 124 | 137 |
| Flyting m. alm. Myndugl. | 100 | 259 | 625 | 626 | 934 |
| Fíggjarpostar | 100 | 104 | 271 | 101 | -72 |
| Landskassaavlop | 100 | 265 | 365 | 339 | 392 |

*Kelda: Føroya Gjaldsstova*

Av tí, at vanligi landskassaroknskapurin er illa sambærligur tvørtur um ár, hevur Gjaldstova Føroya givið eina serliga útgávu sum er sambærlig, og endurgivin omanfyri.

### *Kommunurnar*

Ongin samantaldur roknskapur verður gjørdur fyri kommunurnar, so illa ber til at gera sær nakrar metingar um gongdina hjá tí almenna sum heild. Gjaldsstovan hevur seinastu árini gjørt landskassaroknskapin tøkan fáar mánaðar eftir at roknskaparárið er farið. Men alt ov long tíð gongur harafturímóti til einstøku kommunu-roknskapirnir eru framlagdir, og framvegis verður als ongin samanlagdur kommunuroknskapur gjørdur. At borgararnir ikki fáa fullfíggjaðar almennar roknskapir at síggja, er ikki haldbært.

Kortini telja útreiðslurnar hjá landsfyrisitingini so nógv meira enn tær kommunalu útreiðslurnar, at landskassaroknskapurin má haldast at vera ein rættvísandi mynd av gongdini í tí almenna virkseminum sum heild higartil. Lønirnar, sum goldnar verða úr landskassanum telja út ímóti 1.500 miljónum, meðan lønirnar, sum kommunurnar gjalda telja einar 300 miljónir ella umleið 1/5 av landskassalønunum. Íløgurnar hjá kommununum kann vera størri í mun til landskassaíløgurnar.

*__Mynd 11__: Skattatrýstið í mun til BTÚ 1990 til 2001*




*Kelda: Hagstova Føroya*

### *Skattatrýstið*

Sum tað sæst av myndini omanfyri, er bruttoskattatrýstið minkað seinastu árini. Vóru skattaprosentini óbroytt, skuldi væntast, at tá inntøkurnar vaxa, verður meira goldið í skatti. Og inntøkurnar eru munandi vaxnar seinastu árini – bæði talið á løntakarum og inntøkan hjá hvørjum einstøkum løntakara.

Ein orsøkin til minkandi bruttoskattatrýst er helst, at bæði kommunur og Løgtingið hava givið skattalættar – antin sum minking av skattaprosentum, sum kommunur hava gjørt, ella sum serskattalógir, sum Løgtingið hevur gjørt.

Men hóast bruttoskattatrýstið er minkað, so eru bæði mátini fyri nettoskattatrýst lítið broytt hesi árini. Orsøkin er, at tað, sum latið verður út aftur til skattgjaldararnar, sum studningar til fyritøkur ella veitingar til borgararnar, er vorðið so mikið minni. Serliga eru tað veitingarnar frá ALS sum eru minkaðar munandi.

Ein onnur orsøk til at bruttoskattatrýstið minkar er tann, at so hvørt sum búskaparlig framgongd hevur verið, minkar lønarparturin av bruttofaktorinntøkuni, meðan inntøkurnar hjá fyritøkunum vaxa meira. Tær gjalda minni prosent í skatti enn lønarinntøkurnar, og úrslitið er tí, at skattur sum prosentpartur av BTÚ minkar.

### *Ríkisveitingin*

Ein avgerandi broyting í fíggingini av tí almenna er, at vit í ár hava minkað ríkisveitingina 370 miljónir. Haraftrat hevur sitandi samgonga í hyggju at yvirtaka og fíggja fleiri málsøki.

Minkingin av ríkisveitingini hevur tað avleiðing, at minni munur

verður á bruttotjóðarúrtøku og tøkari bruttotjóðarinntøku. Bruttotjóðarúrtøkan er tann parturin av inntøkunum, sum vit sjálvi framleiða fyri, meðan vit í tøk bruttotjóðarinntøkuna haraftrat telja serliga ríkisveitingina uppí.

Ongin beinleiðis ávirkan er á BTÚ, um ríkisveitingin minkar 370 miljónir, og so leingi framleiðsluinntøkurnar eru so góðar, sum tær hava verið seinastu árini, fara vit heldur ikki at merkja nakran inntøkumiss av, at ríkisveitingin minkar.

Men falla framleiðsluinntøkurnar munandi, so fer tað at merkjast, at vit hava minni ríkisveiting enn frammanundan.

Tað fer altso at seta størri krøv til framleiðsluna og produktivitetin, at vit ikki hava eins stóra ríkisveiting sum frammanundan. Hetta skal verða sagt fyri at leggja áherðslu á, at marknaðarskipanir og vinnupolitikkur fáa enn størri týdning enn frammanundan. Skulu vit framvegis hava sama livistøði, sum frammanundan minkingini av ríkisveitingini, so skal kósin leggjast neyvt og allar árar í sjógv, fyri at búskaparvøxturin í framleiðsluvinnunum verður so stórur sum gjørligt.

Fíggingin av tí almenna má eisini leggjast um, skulu vælferðatænasturnar verða tær somu sum frammanundan. Tað almenna eigur at fíggja sínar tænastur á skilabesta og burðadyggasta hátt, so at tað órógvar virkishugin hjá fyritøkum og arbeiðsfólki minst møguligt. Fígging av eftirlønum og skattafíggingin eigur at verða tikin til viðgerðar, serliga við atliti til størri nýtslu av brúkaragjøldum, enn gjørt verður í dag.

Eitt orðaskifti um ta fígging, sum skal koma í staðin fyri ríkisveitingina, er í øllum førum neyðugt.

# Vinnupolitikkur

***Viðgerð av stevnumiðinum í Vinnupolitiskum ritum 1 - 5***

*Innihaldsyvirlit*

**VINNUPOLITIKKUR** ....... **45**
VINNUPOLITISKA HUGSJÓNIN TIL VIÐGERÐAR ....... 45
ENDAMÁLIÐ VIÐ VINNUPOLITIKKINUM ....... 45
VINNUPOLITISKA STEVNUMIÐIÐ HJÁ VINNUMÁLASTÝRINUM ....... 47
*Føroyar í búskaparligari kapping* ....... *47*
*Kappingarføri* ....... *47*
*Marknaðaratgongd* ....... *47*
*Fjøltátting* ....... *48*
*Nýggjar útflutningsvinnur* ....... *48*
*Verandi útflutningsvinnur* ....... *48*
FYRITØKUR – IKKI LOND - ERU Í KAPPING ....... 49
*Vørumarknaðurin* ....... *49*
*Arbeiðsmegi og kapitalur* ....... *49*
*Aðrir framleiðslumiðlar* ....... *50*
LUTFALSLIGIR FYRIMUNIR ....... 51
FRÍHANDIL ....... 52
FRÍHANDIL VIÐ FRAMLEIÐSLUMIÐLUM ....... 53
*Kapitalur* ....... *53*
*Arbeiðsmegi* ....... *54*
TÍÐARJAVNAÐUR FRÍHANDIL ....... 55
MIST GAGN AV HANDILSFORÐINGUM OG STUDNINGI ....... 55
*Handilsforðingar* ....... *56*
*Studningur* ....... *57*
KAPPING Á JØVNUM FØTI ....... 57
PRODUKTIVITETUR ....... 57
BROYTINGAR Í EINUM LIVANDI BÚSKAPI ....... 58
ÚTFLUTNINGSVINNAN KLÁRAR SEG ....... 59
FJØLTÁTTING AV ÚTFLUTNINGINUM ....... 60
*Lutfalsligu fyrimunir Føroya* ....... *60*
*Studningurin einaferð enn* ....... *61*
SKEIVUR VINNUPOLITIKKUR ....... 62
NIÐURSTØÐA ....... 63

## Vinnupolitikkur

*Málsetningurin við vinnupolitikkinum er eyðsæð at fáa gongd á eina fjøltáttan, so at fleiri bein verða hjá samfelagnum at standa á. Tað at byggja alt samfelagið á eina einastu vinnugrein, sum gjørt hevur verið við fiskivinnuni seinastu øldina, gevur eitt ov ótrygt grundarlag, tí samfelagsbúskapurin fylgir alla tíðina fiskaprísum og tilfeingisgrundarlagi. Varð álitið í búskapinum í staðin spjatt út á fleiri inntøkugevandi vinnur, fekst tann stabilitetur, at til bar at arbeiða miðvísari. Raðfestingin í vinnupolitikkinum er soleiðis bæði vøkstur og stabilitetur. Av hesum fylgir, at vinnupolitikkurin skal eggja til vinnur uttan fyri fiskivinnuna.*

***Vinnupolitikkur – Rit 5***

### Vinnupolitiska hugsjónin til viðgerðar

Vinnumálastýrið gav fyri eini tíð síðan út 5 rit um føroyskan vinnupolitikk. Ætlanin við ritunum, sum undir einum hava heitið ”*Vinnupolitikkur*”, er at ”*geva íblástur til føroyskt kjak um samfelagsligt kappingarføri*”. Tað er at fegnast um, at Vinnumálastýrið hevur tikið málið til viðgerðar. Vinnumálastýrið legði nógva orku í at fáa greinað grundhugsjónina og støðið annars undir ætlaða vinnupolitikkinum. At stýrini gera nakað serligt burtur úr at greina grundarlagið undir politisku kósini eru vit ikki von við.

Ein av orsøkunum, til at Búskaparráðið tekur vinnupolitisku kósina til viðgerðar, er at geva Vinnumálastýrinum eitt kjaksvar upp á tey 5 ritini um Vinnupolitikk, sum eru givin út. Tað hevur lítið kjak verið um málið, og vit vilja fegin, at hetta skal vera eitt íkast til kjakið, sum er alneyðugt, skal vinnupolitikkurin bera rætta vegin.

Ein onnur orsøk til at taka málið til viðgerðar er tann, at grundarlagið, sum Vinnumálastýrið lýsir, er at finna í vanligu uppfatanini manna millum um vinnupolitikk. Ikki minst millum vinnulívsfólk, men eisini í bløðunum, útvarpi og sjónvarpi. Í mangar mátar lýsa hesi ritini hjá Vinnumálastýrinum ta hugsjón um vinnupolitikk, sum fólk flest halda vera rætta.

Meðan politisk ósemja kann vera um, hvussu føroyski búskapurin skal skipast, fyri at hann skal kunna klára seg í altjóða kappingini, og serliga um, hvønn leiklut tað almenna skal hava í tilgongdini, tykist full semja vera um sjálvt útgangsstøðið, nevniliga at Føroyar eru at uppfata sum ein fyritøka í altjóða kapping. Tað er hetta útgangsstøðið, tann vinnupolitikk tað er upphav til, til dømis við stovnanini av Vinnuframagrunninum, og avleiðingarnar fyri búskaparliga gagnið hjá borgarunum, sum vit skulu lýsa. Hinvegin fáa tilmæli til serstøk vinnupolitisk viðurskifti ikki nágreiniliga viðgerð í hesi frágreiðing.

### Endamálið við vinnupolitikkinum

Einasta samfelagsliga endamálið við búskaparligum virksemi er

gagnið hjá borgarunum. Endamálið við framleiðsluni og handlinum eigur tí at vera, at føroyski brúkarin fær atgongd til so nógvar og bíligar vørur og tænastur sum gjørligt. Onnur samfelagslig atlit kunnu sjálvandi bloyta upp henda málsetningin, men í tann mun vinnupolitikkurin skal leggjast til rættis eftir einum búskaparligum endamálið, er gagnið hjá brúkaranum rætti mátistokkurin, ikki gjaldoyrainntøkur (t.e. tilgóðarseðlar til útlendska framleiðslu), tal av arbeiðsplássum, marknaðarpartar hjá ávísum fyritøkum ella líknandi.

Vinnupolitikkurin eigur at seta upp spælireglur innanfyri meira almennu samfelagsligu vigingarnar millum búskaparligt gagn og onnur samfelagslig atlit. Tað vil siga at meira almenn samfelagslig atlit seta nakrar avmarkingar á, hvat vekt búskaparligt gagn skal hava í mun til onnur virðir tann einstaki leggur dent á. Men innanfyri hesar karmar eigur vinnupolitikkurin at eggja til størst møguliga virðisøking, sum er ein fortreyt fyri optimering av búskaparliga gagninum hjá brúkaranum.

Møguliga kunnu tey flestu takað undir við meginpartinum av hesum. Men Búskaparráðið heldur, at ein gjøgnumførd greining av vinnupolitikkinum út frá hesum sjónarmiði leiðir til eitt annað grundarlag undir vinnupolitikkinum, enn tað sum Vinnumálastýrið hevur spælt út við. Harvið kemur Búskaparráðið eisini fram til onnur politisk tilmæli, enn vanliga uppfatanin av vinnupolitikkinum ger. Serliga heldur Búskaparráðið, at núverandi grundarlag undir vinnupolitikkinum leiðir til eina rættuliga trongskygda fokusering upp á útflutningsvinnurnar, bæði gamlar og nýggjar, sum ikki er skilagóð.

**Vinnupolitiska stevnumiðið hjá Vinnumálastýrinum**

### Føroyar í búskaparligari kapping

Í formælinum til vinnupolitisku ritini hjá Vinnumálastýrinum verður staðfest, at ”*fiskieydnan kann vera svikalig, og…tað er tí umráðandi, at landskassin fær aðrar inntøkukeldur at líta á.*” Aðalmálið í vinnupolitikkinum er tí ”*ein sjálvberandi búskapur, ið byggir á fleiri ymiskar vinnur, sum skapa avkast, framburð og vælferð*”. Møguleikar fyri fjøltátting av útflutningsvinnuni er tí eitt umráðandi tema, soleiðis at fleiri óheftar keldur av inntøkum vera til taks.

Í hesum samanhangi er samfelagsuppgávan at ”*seta upp karmar fyri at tryggja støðuga menning og kappingarføri*”, tí ”*21.øldin býður vinnum, stjórnum og samfeløgum til kapping*”, og ”*hvør tjóð skapar og røkir sínar kappingarfyrimunir*”. ”*Skulu vit vera sjálvbjargin, gerst hetta bert við stórum, vinnuligum vøkstri og kappingarføri í altjóða arbeiðsbýtinum.*” Tí má tað almenna ”*kappast [við tað almenna í øðrum londum] fyri at fáa neyðugar íleggjarar og…vitan*”. Tað skal gerast við, at ”*umstøðurnar – sammett við onnur lond – gerast so kappingarførar, at nýggjar vinnur mennast í Føroyum*”.

Sum eitt dømi, um hvussu vinnupolitikkurin kann vera við til at skapa arbeiðspláss og gjaldoyrainntøkur, verður víst til Singapor, tí sum tikið verður til: ”*Singapor hevur tann mest kappingarføra búskapin í heiminum*” og ”*er í dag á fyrstaplássi í altjóða kapping.*”

### Kappingarføri

Temaið fyri vinnupolitikkin er, at ”*vit skulu megna at kappast á altjóða stigi.*” Uppgávan hjá vinnupolitikkinum hesum viðvíkjandi er at ”*stýra vinnuni móti betri kappingarevnum og vitanarkrevjandi vinnu*”. Vit skulu ”*finna…aðrar vinnur, ið kunnu tryggja javnvágina í búskapinum, tá fiskivinnan hevur ring ár*”, ”*tí fortreytin fyri búskaparligari framgongd, størri vælferð og góðum livikorum í Føroyum er, at føroyski parturin av altjóða arbeiðsbýti og virðisøking gerst betri.*”

### Marknaðaratgongd

Eitt endamál við vinnupolitikkinum er, at framleiðsluvirðið hjá útflutningsvinnuni skal vera so stórt sum gjørligt, meðan innflutningsvirðið skal vera so lítið sum gjørligt. Vit skulu ”*stuðla granskingar- og kanningarætlanum, sum kunnu føra til øktan útflutning ella minking í innflutningi.*”

Stremban eftir marknaðaratgongd ella frælsi at selja verður uppfatað sum ein hornasteinur í vinnupolitikkinum. Fríhandil, t.e. at hava fría atgongd

til útlendsku marknaðirnar, fyri tær vørur, vit selja, til dømis fisk, alifisk, handverkaratænastur osfr., er sjálvsagt altavgerandi í hesi tilgongd.

### Fjøltátting

Eitt annað endamál við vinnupolitikkinum er, at vit skulu ”*[h]ava…aðra og fjølbroyttari vinnu at líta á enn bara høvuðsvinnuna.*” Føroyski vinnupolitikkurin kann í hesum samanhangi metast javnt við politikkin hjá eini fyritøku, sum roynir at spjaða váðan við at fara inn á nýggjar marknaðir við nýggjum vørum aftrat teimum verandi, soleiðis at inntøkurnar ikki minka ov nógv, um einstakir marknaðir eru fyri hóttafalli.

### Nýggjar útflutningsvinnur

Skulu vit hevda okkum í altjóða kappingini, er neyðugt, at tær nýggju vinnurnar, vit skulu leggja okkum eftir at byggja upp, eiga at vera meira vitanarkrevjandi vinnur, til dømis software framleiðsla, tí ”*menningarlond eru eyðkend fyri at hava nógva primervinnu og harvið lítla virðisøking.*”

Fyri at Føroyar skulu kunna standa seg í altjóða kappingini um marknaðarpartar í framtíðini skal finnast ein virkisbúskaparlig stýring av vinnulívinum sum heild, sum kann stuðla upp undir nýggjar útflutningsvinnur. Vinnupolitikkurin skal leggja ”*strategiir*”, stuðla upp undir ”*tvørfakligheit*”, ”*verkætlanir og netverk*”, sum skapa ”*kreativitet, innovatión*” osfr., og meira alment skulu karmar skapast fyri ”*atgongd til altjóða marknaðirnar*”. Haraftrat skal stuðul latast til verkætlanir, ið møguliga kunnu skapa ”*nýggjar útflutningsvinnur við einum týdningarmiklum vitanarparti, til dømis biotøkni, KT, tónleikur osfr.*” Eitt dømi um hesar ætlanir framdar í verki er nýstovnaði Vinnuframagrunnurin, sum skal hava ein týðandi leiklut í hesari tilgongdini.

### Verandi útflutningsvinnur

Viðvíkjandi verandi útflutningsvinnum er umráðandi, at náttúrutilfeingi verður virkað í Føroyum. Fyri at fáa størst møguliga virðisøking skulu okkara rávørur virkast mest møguligt, áðrenn tær vera seldar á altjóða marknaðunum, tí ”*tess meira av einari vøru verður framleidd í landinum, tess størri er virðisøkingin.*”

Í bæði fiskivinnuni og alivinnuni merkir hetta, at helst má eingin fiskur av landinum, áðrenn hann er virkaður so nógv sum gjørligt her. Verður

fiskurin seldur uttanlands antin beinleiðis ella bara umvegis føroyskan kaikant uttan at verða virkaður fyrst, missir landið virksemi og útflutningsinntøkur, t.e. arbeiðspláss og virðisøking. Harvið missa vit eisini møguleikan fyri framhaldandi menning av fiskivinnuni og alivinnuni, og tað hevur eisini fylgjur fyri tær vinnur, ið eru tengdar at hesum vinnum.

**Fyritøkur – ikki lond - eru í kapping**

Føroyskar fyritøkur eru alla tíðina í kapping á fleiri marknaðum í senn. Vit kunnu nýta flakavirkini sum dømi. Umframt at føroysk flakavirki eru í kapping við eitt nú íslendsk, norsk og baltisk flakavirki á vørumarknaðinum, eru flakavirkini í kapping við allar aðrar føroyskar fyritøkur um arbeiðsorku, og í ein ávísan mun um íløgukapital eisini.

### Vørumarknaðurin

Lat okkum fyrst hyggja at kappingini á vørumarknaðinum. Hvørt einstakt flakavirki, uttan mun til um tað er føroyskt ella útlendskt, hevur so at siga onga ávirkan á samlaða framboðið og tí heldur ikki á heimsmarknaðarprísin. Hvørt virki kann selja so nógv tað vil til givna marknaðarprísin. Tað vil siga, at prísurin er ikki kappingarparametur, so her er ikki nevniverd kapping um prís. Er keyparaskarin avmarkaður, og øll virkini í londunum øllum ikki sleppa av við vøruna, so fellur prísurin – men hvørt virki hevði framvegis fingið sama prís sum hini.

Kappingin á vørumarknaðinum er tí ikki ein kapping millum føroysk og t.d. íslendsk virki, men ein kapping millum øll virkini innanhýsis. Her kappast øll móti øllum uttan mun til landamørk. Tí er eingin meining í at tosa um kapping millum tjóðir á fiskamarknaðunum.

### Arbeiðsmegi og kapitalur

Avgerandi fyri, um tey einstøku flakavirkini eru kappingarfør er tí, hvørjar framleiðslukostnaðir tey hava. Her eru munir á londunum, tí treytirnar eru ymiskar landanna millum. Talan er um kapping um ráfisk og um aðrar framleiðslumiðlar av ymsum slag - arbeiðsfólk, kapital, tilfar, flutnings- og sølutænastur osfr. Í hesum sambandi eru prísirnir á framleiðslumiðlunum avgerandi.

Í fyrsta lagi er avgerandi, hvussu virkini klára seg í kappingini innanlands um kapital og arbeiðsorku. Alt eftir alternativu møguleikunum hjá arbeiðsfólki og kapitaleigarum at fáa hægri inntøku í øðrum vinnum, fæst flakavirkisvinna at mala runt í hvørjum landinum.

Kapitalur er lutfalsliga lættur at flyta um landamørk, og tí má sum útgangsstøði roknast við, at privatur kapitalur sum heild krevur sama

avkast, rættað fyri vága, uttan mun til hvaðan hann stavar. Í tann mun hetta er galdandi, er altjóða kapping um kapitalin. Men á sama hátt sum við fiskinum á vørumarknaðinum er hetta ein kapping millum allar fyritøkur í øllum londum, hvør móti øðrum. Tjóðarmørk spæla ikki við her, og tí er lítil meining í at tosa um kapping millum tjóðir.

Tað er tó ikki vist, at kapitalavkastið í Føroyum krevst at vera tað sama sum í øðrum londum. Sjálvt um kapitalur er lættur at flyta, og tí hevur møguleika at flyta, har avkastið er størst, er ein stórur partur av kapitalinum av ymsum orsøkum staðbundin, til dømis orsakað av manglandi vitan um vinnuligu viðurskiftini aðrastaðni, skattaviðurskiftum osfr. Siga vit, at føroyskur og útlendskur kapitalur verður verandi í heimlandinum, kann vera, at munur er á avkastinum, sum føroyskir og útlendskir íleggjarar krevja fyri at seta pening í flakavirkir í sínum egna landi. Men so veldst um føroyskir íleggjarar halda tað vera nóg lokkandi at seta pengar í flakavirki í mun til at seta pengarnar í okkurt annað. Her er altso aftur talan um kapping hjá flakavirkjunum móti sínum egnu landsmonnum um framleiðslumiðlar.

Somuleiðis við lønini til arbeiðsfólk. Arbeiðsfólk flytir ikki so fegið og ómakaleyst, alt eftir hvar lønin er best. Tað er tí eingin orsøk til at halda, at lønin krevst at vera hin sama í ymsum londum. Hvat lønin á flakavirkjunum í teim ymsu londunum krevst vera, veldst um, hvørt arbeiðsmegin heldur tað vera nóg lokkandi at arbeiða á einum flakavirki í mun til at arbeiða í onkrari aðrari vinnu. Eisini her er talan um kapping hjá flakavirkjunum móti sínum egnu landsmonnum um framleiðslumiðlar.

Megna flakavirkini ikki at gjalda ta løn, aðrar fyritøkur kunnu gjalda, kann tí vera, at flakavirkir fyri at yvirliva noyðast at fáa útlendska arbeiðsmegi at arbeiða fyri minstuløn, tí heimliga arbeiðsmegin fæst ikki á flakavirki at arbeiða vegna betri umstøður í øðrum fyritøkum. Innflutningurin av bíligari útlendskari arbeiðsmegi er tí eitt tekin um, at arbeiðsorkan hjá meginpartinum av føroysku arbeiðsmegini kann skapa størri virðisøking í øðrum vinnum enn í flakavinnuni.

### Aðrir framleiðslumiðlar

Í øðrum lagi veldst um vøru- og tænastuprísir til framleiðsluna. Tænastu- og vøruprísir eru ikki eins í londunum øllum. Hvat tað kostar, at fáa umvælingstænastur og flutningstænastur í londunum báðum, er ógvuliga ymiskt, og í tí landi, sum hevur lægst tænastuprísir, hava eisini flakavirkini kappingarfyrimun. Men aftur her er í veruleikanum talan um kapping innanlands, tí prísurin á slíkum tænastum veldst um, hvat aðrar fyritøkur innanlands kunnu gjalda fyri tænasturnar. Um handverkarar, flutningsfeløg, verkfrøðingar og teldufrøðingar fáast til at veita vørur og tænastur til flakavinnuna veldst um alternativu inntøkumøguleikarnar hjá tænastuveitarunum. Loysir tað seg betri at selja til aðrar fyritøkur enn flakavirkini, so gera teir tað.

## Fyritøkur kappast – ikki lond

Samanumtikið eru lond ikki í kapping á sama hátt, sum fyritøkur eru í kapping. Føroyar eru ikki í kapping við onnur lond um marknaðarpartar, so í sambandi við handil millum lond er tað eingin meining í hugtakinum ”vit ímóti hinum”. Frá samfelagsligum sjónarmiði stendur áhugaverda kappingin millum føroyskar fyritøkur um avmarkaðu nøgdina av framleiðslumiðlum. Hvat eitt virki má gjalda fyri sínar framleiðslumiðlar veldst um, hvat onnur virki í samfelagnum eru før fyri at gjalda. Ein fyritøka er kappingarfør, um hon klárar at gjalda framleiðslumiðlunum líka stórt ella størri avkast, enn aðrar fyritøkur í samfelagnum. Sum víst verður á niðanfyri er eingin samfelagsbúskaparlig orsøk til at stuðla nøkrum vinnum fram um aðrar í hesi kapping.

## Lutfalsligir fyrimunir

Upprunaliga var ástøðið um lutfalsligar fyrimunir (sum er ein frágreiðing um, hvør framleiðir hvat í einari fríari marknaðarskipan), framført í samband við handil millum lond, men tað kann brúkast til nógv onnur búskaparlig viðurskifti eisini.

Kjarnin í ástøðinum um lutfalsligar fyrimunir er, at munir í evnunum at framleiða eina ávísa vøru best kunnu mátast við muninum í alternativkostnaðinum í framleiðsluni, t.e. í eindum av øðrum vørum, sum ikki kunnu framleiðast, tí framleiðslumiðlarnir vera brúktir til at framleiða eina eind av hesi ávísu vøruni.

Ì sambandi við handil millum lond fylgir av ástøðinum, at øll lond hava lutfalsligar fyrimunir í framleiðslu av onkrari vøru. Er tað til dømis dýrt hjá einum landi at framleiða bilar roknað í mistari framleiðslu av fiski, er hetta samstundis einstýðandi við at tað er bíligt at framleiða fisk roknað í mistari framleiðslu av bilum. Tað ber tí snøgt sagt ikki til, ikki at hava lutfalsligar fyrimunir í framleiðslu av onkrari vøru.

Meginreglan um lutfalsligar fyrimunir er galdandi fyri allar vørur og tænastur – so leingi tað er gjørligt at keypa ella selja tær á altjóða marknaðinum. Til dømis er tað ikki soleiðis, at meginreglan er galdandi fyri vørur, men ikki fyri framleiðslumiðlar sum til dømis kapital og náttúrutilfeingi. Sambært ástøðinum kann ikki útilokast, at vit hava lutfalsligar fyrimunir í rávøruframleiðslu. Vanliga uppfatanin, at tað er betur at virkað rávørur innanlands enn at útflyta tær, er tí ikki altíð røtt.

Víðkanir av ástøðinum um lutfalsligar fyrimunir hava síðan ført til frágreiðingar um, hvaðan lutfalsligir fyrimunir koma og hvussu teir eru við til at avgera, hvussu vinnubygnaðurin í einum samfelag sær út. Ástøði sigur so, at eitt og hvørt land útflytir tað ella tær vørur, sum landið hevur lutfalsligar fyrimunir í at framleiða. Landið innflytir so aðrar vørur, borgararnir vilja hava, frá teimum londum, sum hava lutfalsligar fyrimunir í framleiðslu av hesum vørum.

Stutt sagt fylgir av ástøðinum um lutfalsligar fyrimunir eitt tilmæli um fullkomnan fríhandil, t.e. fríhandil við vørum og tænastum, framleiðslumiðlum, og eisini tíðarjavnaður fríhandil. Meðan fríhandil við vørum og tænastum er í tráð við tilmælini frá vanligu merkantilistisku uppfatanini av búskapinum, eru fríhandil við framleiðslumiðlum, t.e. kapitali, arbeiðsmegi og náttúrutilfeingi, og tíðarjavnaður fríhandil í andsøgn við hesa uppfatan av búskaparligu viðurskiftunum.

Ástøðið um lutfalsligar fyrimunir í víðari merking viðførir sostatt eina heilt aðra uppfatan av nógvum búskaparligum fyribrigdum, og gevur nøkur heilt onnur tilmæli til búskaparliga politikkin, enn merkantilistiska uppfatanin av búskaparligu viðurskiftunum gevur.

**Fríhandil**

Handil millum lond er ikki ein spurningur um kapping, har annar parturin má tapa, t.e. missa marknaðarpartar og arbeiðspláss, fyri at hin skal vinna. Talan er heldur um býtishandil til fyrimuns fyri báðar partar. Hetta merkir tó ikki, at báðir partar altíð fáa líka nógv burtur úr handlinum. Sum víst verður á niðanfyri er tað tvørturímóti soleiðis, at í flestu førum fáa tey smærru londini sum til dømis Føroyar væl meira gagn burtur úr møguleikanum fyri uttanlandshandli enn størri lond.

Alt tos um at ”*vinna kappingina*” í altjóða handli er tí ikki nakað sum kemur samfeløgum við. Orðingar sum at ”*í fyrstu atløgu kann [globaliseringin] tykjast sum ein hóttan móti eini lítlari tjóð sum okkara, tí í globaliseringini verða stór krøv sett til tann, sum vil vinna*” eru skeivar og villeiðandi. Føroyar tapa vanliga í altjóða fótbólti, men Føroyar sum samfelag kunnu ikki tapa í altjóða handli. Men við handilsforðingum og skeivum vinnupolitikki sum heild kunnu vit siga frá okkum fyrimunir við altjóða handli, soleiðis at vit missa ein part av vinninginum.

Fríhandil hevur tveir eginleikar, sum skapa fyrimunirnar við hesi skipan fram um aðrar skipanir. Annar er, at nýtslan ikki longur er tengd at innlendsku framleiðslumøguleikunum. Tað vil siga at brúkarin er ikki longur noyddur at avmarkað sína nýtslu til tær vørur, sum verða framleiddar í Føroyum. Ein avgerandi fyrimunur við fríhandli millum lond er altso, at vit sum keyparar fáa atgongd til eitt størri og breiðari úrval av vørum og tænastum.

Men vinnupolitiska stevnan hjá Vinnumálastýrinum umrøður ikki, hvussu marknaðaratgongdin hjá útlendskum fyritøkum til føroyska marknaðin kann gerast so góð sum gjørligt, soleiðis at føroyski brúkarin kann fáa so góðar og bíligar vørur sum gjørligt, heldur tvørturímóti. Fyri búskaparliga gagnið hjá føroyska borgaranum má hetta broytast, ongantíð ov skjótt.

Hin fyrimunurin er, at fríhandil gevur møguleika fyri arbeiðsdeiling og brúk av lutfalsligum fyrimunum, t.e. spesialisering í framleiðslu. Handil millum lond kann við fyrimuni síggjast sum

framleiðsluvirksemi, har útflutningur verður umgjørdur (vekslaður) til innflutning.Við fríhandli kan útheimurin brúkast sum vekslikontór millum føroyska og útlendska framleiðslu, soleiðis at føroysku framleiðslumiðlarnir kunnu halda seg til at framleiða tað, teir eru best til, uttan at leggja í, um føroyski brúkarin leggur nakað í akkurát hesa framleiðsluna. Gagnið hjá brúkaranum er tá bara tengt at samlaða virðinum á teimum vørum og tænastum føroysku fyritøkurnar framleiða, og ikki at sjálvari tí fysisku framleiðsluni. Hetta er serliga til fyrimunar fyri smá lond sum Føroyar, sum hava eitt stórt spenni millum ynskini hjá brúkarunum og framleiðslumøguleikarnar hjá vinnulívinum.

Til ber ikki hjá einum landi at spesialisera seg fullkomiliga í nøkrum einstøkum vørum ella tænastum, tí realbúskaparliga umhvørvið gevur ikki møguleika fyri tí. Nakrar vørur og tænastur mugu føroyingar sjálvir framleiða, hóast tað viðhvørt kann vera óeffektivt og dýrt, antin tí tær bert kunnu framleiðast í Føroyum, ella tí tað hevði verið enn dýrari at keypt tær uttanífrá. Men nógvar vørur og tænastur er skilabetri at keypa uttaneftir. Fríhandil letur upp fyri nýtslu av hesum møguleika.

**Fríhandil við framleiðslumiðlum**

Orsakað av stóru framgongdini í búskapinum seinastu árini er spurningurin um innflutning av útlendskari arbeiðsmegi og útlendskum kapitali, t.e. útlendskar íløgur í Føroyum, aftur komin fram í almenna kjakinum. Tað letur til at vera ein ávís mótstøða móti innflutningi av hesum framleiðslumiðlum, serliga móti innflutningi av íløgukapitali til útflutningsvinnurnar og lítið útbúnari arbeiðsmegi. Her skulu vit bara vísa á nøkur fá heilt grunnleggjandi viðurskifti, sum eiga at vera havd í huga, tá hesi evni verða viðgjørd.

## Kapitalur

Útlendskar íløgur í Føroyum, framdar undir fríum marknaðartreytum eru eitt positivt tekin um heilsustøðuna hjá føroyska búskapinum, tí tær vísa, at útlendingar hava góðar vónir um framtíðarvánirnar fyri føroyska búskapinum. Haraftrat eru útlendskar íløgur til gagns fyri samfelagið, tí tær økja um støddina á samlaða kapitalapparatinum og gera harvið føroysku arbeiðsmegina meira produktiva. Tessvegna økja útlendskar íløgur um nøgdina av vørum og tænastum, sum stendur føroyska brúkaranum í boði.

Í hesum sambandi er vert er vera varugur við, at jú meira vit vilja framleiða fyri útlendingar, jú meira mugu føroysku brúkararnir líta á útlendingar at framleiða til teir. Grundleggjandi búskaparliga vigingin er um, hvar føroysku framleiðslumiðlarnir verða brúktir. Jú størri part av avmarkaðu nøgdini av framleiðslumiðlum vit brúka til at framleiða til útlendingar, so sum handverkarar uttanlands og realkapitalur í skipum, jú minni partur er til taks innanlands til at framleiða til føroyska brúkaran.

Vilja vit hava, at størri partur av framleiðslumiðlunum verða brúktir til framleiðslu til útflutnings, mugu vit samstundis góðtaka, at færri framleiðslumiðlar vera til framleiðslu av heimamarknaðarvørum. Tað vil siga, at størri partur av tøku framleiðslumiðlunum sum við studningi av einhvørjum slag verður eggjaður til at vera í útflutningsframleiðslu, jú størri verður tørvurin á útlendskum fyritøkum at gera íløgur í Føroyum til at framleiða føroyskar heimamarknaðarvørur.

Til dømis er tað so, at tá føroyski realkapitalurin av ymsum orsøkum ikki skaffar brúkarunum betri internet samband, so er sjálvsagt, at útlendskar fyritøkur síggja ein møguleika fyri at bjóða seg til at veita brúkarunum hesa tænastu. Á henda hátt hava útlendskar íløgur í ávís øki av føroyska telemarknaðinum skapt kapping við lægri prísum, betri tænastu og fjøltátting av vøruútboðnum. Hetta er sjálvsagt til stórt gagn fyri føroyska brúkaran. At tað er útlendskur kapitalur, sum hevur gjørt hetta møguligt, hevur ongan týdning í hesum sambandi.

### Arbeiðsmegi

Viðvíkjandi innflutningi av arbeiðsmegi hava vit tann løgna politikk, at samstundis sum vit geva føroysku arbeiðsmegini studning til at fara uttanlands at arbeiða og halda tað vera gott, at arbeiðsmegin fær ”altjóða royndir”, vilja vit ikki góðtaka, at lítið útbúgvin útlendsk arbeiðsmegi kemur til Føroya at arbeiða. Partvís tykist hetta koma av mótvilja ímóti at innflyta arbeiðsmegi, meðan tað framvegis eru arbeiðsleys í Føroyum.

Nógv viðurskifti kunnu hava týdning, tá avgerast skal, um útlendingar skulu fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvið í Føroyum. Men arbeiðsloysisprosentið eigur ikki at hava týdning í viðgerðini, tí tað hevur einki samband við, hvussu nógvir útlendingar eru á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hvussu nógvir føroyingar eru arbeiðsleysir veldst um bygnaðin á arbeiðsmarknaðinum, t.e. sáttmálaviðurskifti, stødd á arbeiðsloysisstuðli osfr. Harumframt veldst tað eisini um ymisk onnur bygnaðarlig viðurskifti sum til dømis sosialpolitikkin. At enda hevur eisini konjukturstøðan ávirkan á arbeiðsloysið.

Tað er rætt, at útlendingar, sum vilja koma til Føroya at arbeiða, við at økja um arbeiðsútboðið eru við til at minka um ta styrki í sáttmálasamráðingum, fakfeløgini hava á arbeiðsmarknaðinum. Tessvegna eru teir við til at broyta javnvágina millum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar. Hetta kann sum frá líður føra til, at fakfeløgini mugu góðtaka verri sáttmálaviðurskifti, enn tey annars høvdu kunnað kravt, fyri at halda arbeiðsloysinum niðri.

Men ein og hvør, sum bjóðar seg fram á føroyska arbeiðsmarknaðinum økir um útboðið av arbeiðsmegi og er á henda hátt við til at broyta javnvágina á arbeiðsmarknaðinum. Í hesum samanhangi er eingin munur á útlendingum, føroyingum uttanlands, sum flyta heim, ella ungum føroyingum, sum fara út á arbeiðsmarknaðin fyri

fyrstu ferð. Eingin orsøk er tí til at gera serligar forðingar fyri atgongdini hjá útlendingum at føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Annars er at vert at viðmerkja, at sama fyribrigdi viðvíkjandi býtinum av framleiðsluni millum heimamarknaðin og heimsmarknaðin er galdandi fyri arbeiðsmegi sum fyri kapital. Um vit ikki við bústaðarmøguleikum, barnaansing osfr. vilja skapa umstøður fyri, at føroyska arbeiðsmegin uttanlands kemur heim, ella um vit beinleiðis stuðla henni í at vera uttanlands, so er einki løgið í, at fyritøkurnar ístaðin venda sær til útlendska arbeiðsmegi. Fyri atgongdina hjá føroyska brúkaranum til vørur og tænastur hevur tað tí týdning, at fyritøkurnar hava møguleika til at fáa útlendska arbeiðsmegi hendavegin.

**Tíðarjavnaður fríhandil**

Í sambandi við umbýti av føroyskum vørum og tænastum fyri útlendskar vørur og tænastur hava vit eina kredittskipan mótvegis útheiminum, sum gevur møguleika fyri uppsparing og lántøku. Árligar broytingar í hesi kredittsaldoini síggjast aftur sum gjaldsjavnaavlop ella -hall. Skiftandi avlop og hall á gjaldsjavnanum eru bara ein staðfesting av, at vit brúka møguleikan fyri tíðarjavnaðum fríhandli. Lán til og úr útheiminum gera tað møguligt at skilja innlendska íløgustøðið frá innlendsku uppsparingini. Soleiðis ber til at fremja íløgur einstøk tíðarskeið uttan at vera noyddur til at minka nýtsluna, og hinvegin ber til at spara upp uttan at vera noyddur til at gera hetta við at fremja innlendskar íløgur.

Á henda hátt ber til, júst sum einstaklingar gera við láni og uppsparing í einum peningastovni, at skilja ár um ár nýtsluna frá tilsvarandi inntøkum, soleiðis at ikki er neyðugt at brúka inntøkur beinanvegin, tær verða forvunnar, og ikki er neyðugt at bíða við nýtslu, til inntøkan er komin til høldar. Tíðarjavnaður fríhandil, t.e. møguleiki fyri skiftandi at útflyta og innflyta uppspardan kapital, er tí líka týdningarmikil sum fríhandil við vørum og tænastum, t.e. útflutningur av summum vørum og innflutningur av øðrum.

Hetta vísir, at gjaldsjavnaavlop nøkur tíðarskeið og gjaldsjavnahall onnur tíðarskeið avspegla bara arbeiðsdeiling og tíðarjavnaðan fríhandil á sama hátt sum við útflutningi av nøkrum vørum og innflutningi av øðrum vørum. Serliga týdningarmikið er at leggja til merkis, at avlop ella hall á gjaldsjavnanum er eitt heilt annað fyribrigdi enn avlop ella hall á ársroknskapinum hjá eini fyritøku, har tað ræður um at hava so stórt avlop sum gjørligt ár um ár.

**Mist gagn av handilsforðingum og studningi**

Frá einum búskaparligum sjónarmiðið, har tað sum umræður er at geva føroysku brúkarunum mest møguligt gagn burtur úr teim tøku føroysku framleiðslumiðlunum, eru handilsforðingarnar í samband við framleiðslumiðlar sera óhepnar, tí tær forða fyri arbeiðsbýti og gagnnýtslu av komparativum fyrimunum í framleiðslu.

Serliga forðingarnar fyri optimalari nýtslu av framleiðslumiðlum í fiskivinnuni eru skaðiligar fyri føroyska búskapin. Við løgligum forðingum og avlagingum við hjálp av studningi, verður mekanisman, sum flytir framleiðslumiðlarnar, har teir geva størst virðisøking, sett úr gildi. Hetta ger, at arbeiðsmegi og kapitalur sum kundu skapt størri virðisøking aðrastaðni vera verandi í fiskavirking og fiskiskapi, sjálvt um hetta viðførir, at føroyski samfelagsbúskapurin missir meira fyri minni.

### Handilsforðingar

Tað umráðandi er, at framleiðslumiðlarnir fara hagar, teir geva størstu virðisøkingina, og ikki tað at framleidda vøran kann seljast so dýrt sum gjørligt uttanlands. Virðisøking í hárfríðkanarvinnuni er per definitión líka nógv verd fyri føroyska brúkaran sum virðisøking í fiskivinnuni ella alivinnuni. Er virðisøkingin hægri fyri hvønn arbeiðstíma í hárfríðanarvinnuni enn í alivinnuni, skal hárfríðkanarvinnan í fríari kapping sleppa at draga arbeiðsmegi frá alivinnuni við at bjóða meira í løn.

Í hesum sambandi er vert at leggja til merkis, at stórt søluvirði ikki av sær sjálvum er einstýðandi við stóra virðisøking, tí virðisøking er eitt nettohugtak. Til dømis kann hugskotið, um at vit ikki skulu selja fiskin, fyrr enn vit hava fiskað og viðgjørt hann, so hann er klárur at seta á borðið hjá brúkaranum, bara verjast, um søluvirðið frároknað virðið av øllum teimum framleiðslumiðlum, sum verða brúktir í framleiðsluni, er positivt.

Til dømis økir tað ikki um samlaðu virðisøkingina í samfelagnum, at skip verða forða í at selja sína framleiðslu, t.e. veiðu, har tey fáa mest fyri hana. Tvørturímóti viðførir hetta eina skeiva samanseting av framleiðsluni í Føroyum. Arbeiðsmegi, sum kundi skapt størri virðisøking onkra aðrastaðni, verður brúkt upp á at virka fisk, heldur enn at skapa framleiðslu, har hon gevur brúkaranum størst gagn.

Við politiskum krøvum um at fiskurin skal virkast í Føroyum, tá úrslitið í einum fríum marknaði hevði verið, at framleiðslumiðlarnir høvdu verið gagnnýttir á tann hátt, sum føroyski brúkarin vildi, nevniliga at størri partur av fiskurin varð seldur óvirkaður av landinum og arbeiðsmegin og kapitalurin vórðu gagnnýtt í øðrum vinnum, har tey hava komparativar fyrimunir, avskeplar politiski myndugleikin samansetingina av framleiðsluni og minkar harvið um samlaðu virðisøkingina í samfelagnum.

Tí eiga skipini at sleppa at selja fiskin, har tey fáa mest fyri hann, t.e. partvís uttanlands. Tá høvdu skipini vunnið meira, og føroyska arbeiðsmegin hevði fingið frið til at verið har, sum hon skapar størstu virðisøkingina og tí fær ta bestu lønina, t.e. fyri stóran part í heimamarknaðarvinnuni.

## Studningur

Sum vit hava víst á er fremsta ávirkanin av politiskum stuðuli til útvaldar vinnur at hann forskjýtur innanhýsis kappingarførið um framleiðslumiðlarnar millum føroysku vinnubólkarnar.

Studningurin viðførir, at ov nógvir framleiðslumiðlar verða troðkaðir inn í ávísar vinnur, har teir einki hava at gera. Á henda hátt vera framleiðslumiðlar fasthildnir í framleiðslu, sum føroysku brúkararnir virðismeta væl lægri enn framleiðslu, sum framleiðslumiðlarnir kundu skapt, vóru teir gagnnýttir aðrastaðni. Haraftrat eru teir við studninginum í rygginum við til at oyðileggja virksemi hjá teimum, sum kunnu klára seg í eini vinnu uttan studning.

Ein annar stórur trupulleiki er, at atferðin hjá teimum, sum høvdu klárað seg uttan studning, broytist, tá studningur kemur inn í myndina, tí spælireglurnar broytast. Tað sum privatbúskaparliga lønar seg best fyri ta einstøku fyritøkuna í eini vinnu, sum arbeiðir undir fríum marknaðarkorum, er ikki sama atferð, sum privatbúskaparliga lønar seg best, um sama vinna arbeiðir við kørmum, har studningur er ein av spælireglunum. Og sum ein aðalregla kann sigast, at atferðin í fríari kapping tænir samfelagsbúskapinum betur enn atferðin við studningi sum einari av spælireglunum.

### Kapping á jøvnum føti

Ofta verður ført fram, at um onnur lond geva sínum fyritøkum studning, er neyðugt at vit eisini geva okkara fyritøkum, sum kappast á sama vørumarknaði, studning, fyri at tær skulu kunna "*kappast á jøvnum føti*". Men tankagongdin aftanfyri hesa útsøgn er ikki røtt.

Hugtakið um "*kapping á jøvnum føti*" eigur ongan heimarætt í búskaparligum ástøði um handil millum lond. Vinningurin av tí arbeiðsdeiling og handli, sum fríhandil gevur grundarlag fyri, standast júst av mununum millum lond í lutfalsliga kostnaðinum á framleiðslu. Um hesir munir í lutfalsligum kostnaði standast av náttúrligum lutfalsligum fyrimununum, ella av at onnur lond geva studning til sínar framleiðarar, kann vera okkum líkamikið.

Um útlendingar vilja geva okkum vørur og tænastur bíligari, enn tær annars høvdu verið, til dømis við at gjalda ein part av endurnýggingini av føroyska fiskiflotanum við at geva studning til sínar skipasmiðjur, so ongantíð betur. Vit skulu bara taka tað til eftirtektar og brúka sparda peningin upp á okkurt annað. Spardi peningurin gevur okkum møguleika fyri at hava arbeiðsmegi og kapital í heimamarknaðarvinnuni, til gagns fyri føroyska brúkaran, sum annars skuldi framleitt vørur til útlendingar, um vit skuldu goldið fullan prís fyri skipini.

### Produktivitetur

Fyri eitt hækkandi livistøðið hjá føroyska brúkaranum er framhaldandi hækkandi produktivitetur, t.e. virðisøking fyri hvønn virkistíma hjá

framleiðslumiðlunum, avgerandi fortreytin. Endamálið við vinnupolitikkinum eigur tí at vera menning av virðisøkingini í samfelagnum sum heild við røttum spælireglum fyri alt vinnulívið og eggjan til útbúgving og menning av tí einstaka. Um produktivitetsvøksturin hendir í heimamarknaðarvinnum ella útflutningsvinnum er líkamikið fyri brúkaran, og tí eigur marknaðurin sjálvur at sleppa at avgera, hvar tað loysir seg best at leggja kreftirnar í virðisøking.

Tað er produktiviteturin hjá arbeiðsmegini, sum avgerð lønarlagið, ikki øvugt. Lønarlagið dettur ikki niður av himni. Sjálvt um tað ljóðar løgið, so verður tað bara í lítlan mun avgjørt á arbeiðsmarknaðinum við samráðingum. Yvir styttri tíðarskeið kunnu ymsir trekleikar á arbeiðsmarknaðinum gera, at onnur viðurskifti enn lutfalsligir fyrimunir í ein ávísan mun eru við til at áseta lønirnar, men sæð yvir eitt sindur longri tíðarskeið verða lønirnar í størstan mun avgjørdar útfrá produktivitetinum.

Tí avspeglar lønarlagið í samfelagnum í stóran mun meðalproduktivitetin hjá arbeiðsmegini í teim ymsu vinnugreinunum. Tað er ikki av tilvild, at føroyska lønarlagið er nógv hægri enn tað kinesiska, men lægri enn til dømis tað amerikanska. Føroyska lønarlagið avspeglar tað virðisøking, sum produktiviteturin hjá føroysku arbeiðsmegini gevur møguleika fyri, givið teir karmar viðvíkjandi tøkni, náttúrugivnum umstøðum, samfelagsligum spælireglum osfr., sum arbeiðsmegin arbeiðir innanfyri.

At flakavirkini hava trupult við at skaffa sær arbeiðsmegi eru tí eitt tekin um, at produktiviteturin í flestu øðrum vinnum er so høgur, at tær kunnu gjalda hægri lønir enn flakavirkini kunnu. Tað vil siga, at tað í veruleikanum er eitt positivt tekin, at flakavirkini ikki klára seg í kappingini um arbeiðsmegina, tí tað merkir, at produktiviteturin í øðrum vinnum, og harvið livistøðið føroyska arbeiðsmegin kann vinna sær har, hevur yvirhálað tað avkast, lutfalsliga lági produktiviteturin á flakavirkjunum kann bjóða realkapitalinum og arbeiðsmegini.

Annars vísir hetta eisini, at búskaparligt virksemi í eini marknaðarskipan er ein dynamisk tilgongd, har tað ikki bara er eitt ávíst óbroytiligt tal av vælløntum arbeiðsplássum. Framvøksturin av hálønarvinnum í øðrum londum er ikki einstýðandi við, at føroyingar antin mugu vinna nøkur av hesum arbeiðsplássum frá hinum ella liva við láglønararbeiðsplássum. Føroyska arbeiðsmegin fær løn í tráð við sín egna produktivitet. Tí vil hækkandi produktivitetur hjá føroysku arbeiðsmegini viðføra hækkandi løn, líkamikið hvussu gongdin í produktivitetinum er í øðrum londum.

**Broytingar í einum livandi búskapi**

Orsakað av at tað bara er ein avmarkað nøgd av framleiðslumiðlum tøk, fara tað altíð at vera nakrar vinnur, sum vinna kappingina um framleiðslumiðlarnar, meðan aðrar tapa. Øll nýtsla av framleiðslumiðlum í eini vinnu hevur ein kostnað, nevniliga ta

framleiðslu, sum kundi verðið skapt, um framleiðslumiðilin var gagnnýttur onkra aðrastaðni. Tær vinnur, sum klára at gjalda henda kostnað, vinna kappingina. Í einum livandi búskapi fara tað altíð at vera vinnur, sum missa framleiðslumiðlar, meðan aðrar draga at sær framleiðslumiðlar, nýggjar vinnur koma til og gamlar svinna burtur.

So hvørt sum framleiðslumiðlar verða fluttir úr eini vinnu yvir í eina aðra, økist virðið á teimum framleiðslumiðlum, sum eru eftir í tí vinnuni, sum missir framleiðslumiðlar, og virðið á framleiðslumiðlum minkar í tí vinnuni, sum dregur framleiðslumiðlar at sær. Á henda hátt vilja ójavnar í virðinum á framleiðslumiðlum í ymsum vinnum svinna burtur, so hvørt sum framleiðslumiðlar flyta til vinnur, til ein javnvág er íkomin. Henda javnvág flytir seg alla tíðina, so hvørt sum búskapurin verður fyri skelkum. Tí fer alla tíðina fram ein flyting av framleiðslumiðlum frá vinnum, har virðið av framleiðslumiðlunum er lutfalsliga minkað í mun til vinnur har virðið á eini eind av framleiðslumiðlunum er lutfalsliga økt.

So hvørt sum tøkniligu møguleikarnir í framleiðslu og ynskini hjá brúkarunum broytast, flyta framleiðslumiðlar vinnur, í takt við at lutfalsligu fyrimunirnir í teim ymsu vinnunum broytast. Fríhandil gevur hesi tilgongd frítt at virka og skapar tí karmar fyri at framleiðslumiðlarnir alla tíðina flyta seg hagar, teir geva brúkaranum mest gagn. Av hesum fylgir, at forðingar fyri fríhandli - annaðhvørt tað eru forðingar fyri handli við vørum, framleiðslumiðlum ella framleiðslu millum tíðarskeið - forða optimalari tillaging av samansetingini av framleiðsluni, til skaða fyri gagnið hjá brúkaranum.

**Útflutningsvinnan klárar seg**

So leingi føroyski brúkarin ynskir fleiri innflutningsvørur enn danska ríkisveitingin og aðrar valutagávur kunnu gjalda fyri, fer tað at kunna loysa seg hjá einum parti av føroyskum fyritøkum at arbeiða í útflutningsvinnuni heldur enn í heimamarknaðarvinnuni. Stóri eftirspurningurin eftir innflutningi (t.e. tilgóðarseðlum upp á útlendskar vørur) fer heilt einfalt at føra til, at tað fer at løna seg hjá einum parti av framleiðslumiðlunum at framleiða gjaldoyra heldur enn at framleiða heimamarknaðarvørur. Óttin fyri at øll útflutningsvinna skal svinna burtur, um hon ikki verður stuðlað, ella um virksemi í heimamarknaðarvinnunum ikki verður hildið niðri á ymsan hátt, er tí ógrundaður.

Marknaðurin eigur sjálvur at sleppa at finna útav, hvussu stórur partur av vinnulívinum skal vera í útflutningsvinnuni, hvørjar vørur vit skulu útflyta, og hvussu tær skulu framleiðast. Tað er jú tað, vit hava ein marknaðarbúskap til. Møguliga høvdu partar av hvørjum skipabólki farið á húsagang, og møguliga høvdu nøkur flakavirkini farið sama veg, men tað mest sannlíka úrslitið av einum fríum marknaði hevði verið, at nøkur skip og partar av flakavirkisvinnuni høvdu farið á húsagang. Framleiðslumiðlarnir høvdu verðið fluttir yvir í aðrar vinnur, har avkastið bæði til arbeiðsmegina og kapitalin er størri.

Samstundis høvdu teir partar av vinnubólkunum, sum vóru eftir í útflutningsvinnuni, havt betri úrslit enn frammanundan.

**Fjøltátting av útflutninginum**

Eitt lutfalsliga nýtt evni í vinnupolitikkinum er fjøltátting av útflutninginum. Sagt verður, at vit hava ”*bara eitt bein at standa á*”, t.e. eina gjaldoyraskapandi vinnu, og at hetta má broytast. Men tá tað kemur til útflutningsvinnurnar, kunnu vit ikki vænta, at ein so lítil partur av altjóða búskapinum, sum Føroyar eru, kann hava lutfalsligar fyrimunir í framleiðslu av nógvum vørum.

## Lutfalsligu fyrimunir Føroya

Vit hava í løtuni lutfalsligar fyrimunir í fiskiskapi og aling. Møguliga fer tað at broytast, soleiðis at vit eisini fara at hava lutfalsligar fyrimunir í onkrari aðrari framleiðslu. Men tað er sera trupult at ímynda sær, at Føroyar fara at hava lutfalsligar fyrimunir í nógvum altjóða vinnum samstundis.

At tað fyri mestan part bara eru fiskivinnan og alivinnan, sum framleiða útlendskt gjaldoyra til føroyska samfelagið hevur eina náttúrliga orsøk. Útlendingar vilja fegnir geva gjaldoyra fyri fisk, og henda býtishandil hava vit góðar umstøður at gagnnýta, tí vit hava fiskin svimjandi í øllum havinum rundan um okkum, og vit hava aldargamlar royndir við at fiska hann. Hetta viðførir, at føroyska arbeiðsmegin er lutfalsliga produktiv í fiskaríi, t.e. sammett við, um sama arbeiðsmegi skuldi framleitt gjaldoyra á annan hátt. Tí kunnu føroyskar fyritøkur í fiskivinnuni og alivinnuni gjalda hægri lønir fyri arbeiðsmegi í gjaldoyraframleiðslu enn flestu aðrar føroysku fyritøkur.

At føroyskar fyritøkur, sum royna at framleiða gjaldoyra á annan hátt enn við fiskiskapi ella aling, ofta hava trupult við at fóta sær á heimsmarknaðinum við sínum vørum er altso fyrst og fremst ein fylgja av, at tær ikki hava somu náttúrugivnu fyrimunir í gjaldoyraframleiðslu sum fiskiskapur og aling og tí ikki eru kappingarførar við fiskivinnuna og alivinnuna á føroysku marknaðunum fyri framleiðslumiðlar.

At føroyskar vinnur uttanfyri fiskivinnuna og alivinnuna ikki eru kappingarførar á heimsmarknaðinum er tí eitt tekin um, at føroyska fiskivinnan og alivinnan eru kappingarførar á heimsmarknaðinum. Sæð frá hesum sjónarhorni er kappingarføri ongantíð ein samfelagsligur trupulleiki, tí spurningurin er ikki, *um* nøkur vinna er kappingarfør á heimsmarknaðinum, men *hvør* vinna er kappingarfør.

Bara tá føroyskar fyritøkur uttanfyri fiskivinnuna og alivinnuna, sum vilja framleiða gjaldoyra, vera betri kappingarførar við restina av vinnulívinum, fara vit at síggja eina fjøltátting av útflutningsvinnunum. Henda broyting í kappingarføri kann annaðhvørt standast av, at eftirspurningurin hjá føroyska brúkaranum skiftir frá heimamarknaðarframleiðslu yvir móti útlendskum vørum og harvið

yvir móti gjaldoyra, ella av at produktiviteturin í gjaldoyraframleiðslu hjá fyritøkum uttanfyri vanligu útflutningsvinnurnar økist í mun til produktivitetin hjá hesum vinnum.

Eitt dømi um júst hetta sóu vit undir kreppuni, tá kappingarførið hjá fiskivinnuni viknaði orsakað av fiskaloysi, vánaligum fiskaprísum og fíggjarkreppu. Av tí at fiskivinnan er ein so stórur partur av føroyskum vinnulívi, merkti eitt afturstig í virðisøkingini í hesi vinnuni, at meðal produktiviteturin í øllum samfelagnum fall. Hetta førdi til at lønarlagið í samfelagnum fall. Av hesum gjørdust aðrar vinnur kappingarførar í gjaldoyraframleiðslu (t.e. útflutningsvirksemi), byggifyritøkur til dømis, og hetta saman við minkandi eftirspurningi á heima-marknaðinum førdi til eina gongd móti størri fokusering upp á heimsmarknaðin.

Men síðan virðisøkingin í fiskivinnuni aftur byrjaði at økjast, hevur hon trýst lønarlagið so mikið høgt upp aftur, at fyritøkur, sum framleiða gjaldoyra á annan hátt, hava mist kappingarføri í gjaldoyraframleiðslu. Harvið eru hesar fyritøkur aftur trýstar út av marknaðinum fyri framleiðslu av gjaldoyra til føroyska brúkaran.

### Studningurin einaferð enn

Hinvegin er tað so, at ein partur av kappingarførinum hjá alivinnuni og serliga hjá fiskivinnuni í kappingini um føroyskar framleiðslumiðlar stendst av beinleiðis og óbeinleiðis studninginum, sum framvegis verður latin hesum vinnum. Fyritøkur, sum vilja royna seg í gjaldoyraframleiðslu, men sum ikki fáa ókeypis rávøru, serligan skattalætta til arbeiðsmegina og sanering av kapitalapparatinum, hava sera avmarkaðar møguleikar at standa seg í kappingini við fiskivinnuna um framleiðslumiðlar. Fremsta ávirkanin av politiskum stuðuli til hesar útvaldu vinnur er tí at forskjóta innanhýsis kappingarføri um framleiðslumiðlar millum føroysku vinnubólkarnar.

Meðan teir náttúrligu fyrimunir fiskivinnan hevur í kappingini um framleiðslumiðlarnar er ein heppin gáva til føroyska búskapin, sum skal gagnnýtast, førir studningurin til fiskivinnuna til, at fleiri framleiðslumiðlar enn samfelagsliga gagnligt vera brúktir í hesi vinnu. Teir eyka framleiðslumiðlarnir sum koma inn í fiskivinnuna orsakað av studninginum, høvdu kunnað skapt størri samfelagsliga virðisøking í øðrum vinnum. Tí er studningurin til skaða fyri samfelagsligu virðisøkingina sum heild og eisini fyri tær vinnur, ið vilja framleiða gjaldoyra á annan hátt.

Fjøltátting fyri sína egnu skyld ella fyri vágaspjaðing kann vera beinleiðis skaðiligt, um fjøltáttingin verður tvingað ígjøgnum við at avlaga nýtsluna av lutfalsligum fyrimunum – sum t.d. við at geva biotøkni, tónleiki ella KT vinnu útflutningsstudning. Harafturímóti avlagar studningurin til fiskivinnuna nýtsluna av framleiðslumiðlum hinvegin, nevniliga yvir ímóti ov stórari fokusering hjá vinnulívinum upp á nakrar einstakar vinnugreinir. Á henda hátt er studningurin við

til at forða fyri eini møguligari gagnligari fjøltátting av útflutningsvinnunum.

**Skeivur vinnupolitikkur**

Grundarlagið undir vinnupolitiska stevnumiðinum hjá Vinnumálastýrinum er merkt av eini samanblanding av ”*vit*”, t.e. sum skilst Føroyar og føroyingar, ”*vinnan*”, t.e. sum skilst útflutningsvinnan og ”*føroysku fyritøkurnar*”, t.e. sum skilst útflutningsfyritøkurnar. Hetta eru trý ymisk fyribrigdi, men vera í Føroyum uppfatað sum eitt og tað sama.

Av somu orsøk hava vit onga veruliga samfelagsliga hugsjón um vinnupolitikk í Føroyum. Vit hava eina merkantilistiska hugsjón, sum sigur, at ”*vit*” eru ein fyritøka, sum skal selja so nógv sum gjørligt og keypa so lítið sum gjørligt. Ístaðin fyri at hava gagnið hjá føroyska brúkaranum fremst í huga, hevur politikkurin menningina av einum parti av vinnulívinum, nevniliga útflutningsvinnuni, fremst í huga, tí samansavning av tilgóðarseðlum upp á útlendska framleiðslu gjøgnum at ”*vinna kappingina*”, verður uppfatað sum høvuðsendamálið við vinnupolitikkinum.

Samfelagsbúskaparliga yvirlitið, sum má metast at vera tað týdningarmesta í eini leitan eftir einum vælskipaðum almennum vinnupolitikki, finst ikki í hesi hugsjónini um samfeløg í búskaparligari kapping. Og úrslitið av hesi tilgongdini til vinnupolitikk er handilsforðingar av ymsum slag, sum minka um búskaparligu vælferðina hjá føroysku borgarunum.

Týdningarmesti parturin av einum og hvørjum búskaparligum politikki, nevniliga føroyski brúkarin, er ongastaðni at finna í stevnumiðinum. Tað nærmasta vit koma er, at tað um undirstøðukervið verður staðfest, at ”*innanoyggja hevur tað týdning, at allir partar av Føroyum hava so gott atgeingi og samskiftismøguleikar við hinar partarnar og við týðandi felagsstovnar (sjúkrahús, hægri skúlar, almanna- og mentanardeplar) sum gjørligt*”. Men hetta er – sambært ritið hjá Vinnumálastýrinum – ikki tí at tað hevur týdning fyri gagnið hjá føroyska brúkaranum í sær sjálvum, at hann hevur atgongd til hesar tænastustovnar. Hetta er – sambært Vinnumálaráðið - neyðugt ”*skulu [tey] kunna eiga sín lut í altjóða marknaðinum.*”

Haraftrat eru heimamarknaðarvinnurnar ikki til í hesi merkantilistisku hugsjónini. Tá tosað verður um ”*vinnur uttanfyri fiskivinnuna*” verður meint við útflutningsvinnur aðrar enn fiskivinnan. Og tá tosað verður um at fáa ”*aðrar inntøkukeldur enn fiskivinnuna*”, verður gloymt, at størri parturin av virðisøkingini í samfelagnum verður skaptur í heimamarknaðarvinnunum.

Føroyski brúkarin fær gagn av bæði útlendskum og føroyskum vørum og tænastum. At ein útflutningsfyritøka í fríari kapping ikki klárar at kappast um føroysku framleiðslumiðlarnar er eitt tekin um, at brúkarin

ikki heldur tær eyka innflutningsvørur, hann fær fyri hesa nýtslu av framleiðslumiðlum, vera verdar kostnaðin í mistum heimamarknaðar-vørum. Tí er tað óheppið, at tað almenna ”*satsar upp á nakrar [útflutnings]vinnur*” og harvið samstundis leggur øllum øðrum vinnum meinbogar í vegin.

**Niðurstøða**

Endamálið við handli millum lond er í veruleikanum innflutningur, ikki útflutningur. Brúkarin í einum lítlum samfelag sum tí føroyska livir fyri ein stóran part av innflutningi. Fyri gagnið hjá brúkaranum er frælsið at keypa tí líka týdningarmikið sum frælsið at selja. Útflutningur er eitt ”nødvendigt onde”, sum vit mugu góðtaka at brúka arbeiðsmegi, realkapital og náttúrutilfeingi uppá, tí útheimurin vil ikki – burtursæð frá ríkisveitingini - geva okkum burtur av síni framleiðslu uttan at fáa okkurt afturfyri.

Í einum lítlum landi við lítlum innlendskum marknaðum og eintáttaðum tilfeingisgrundarlag hevur uttanlandshandil serliga stóran týdning fyri materiellu vælferðina. Tað er trupult at ímynda sær, at eitt land sum Føroyar høvdu kunnað havt núverandi høga livistøðið, uttan teir fyrimunir vit fáa av at býta fisk fyri bilar, frystiskáp og aðrar vørur, tað vil siga, um vit skuldu framleitt hesar vørur sjálvi. Eins trupult er tað at ímynda sær, at føroyski brúkarin hevði kunnað valt millum so mong vørusløg og góðskubólkar uttan ta víðkan av marknaðinum, sum handilin við restina av heimin viðførir.

Hóast eyðsýndu fyrimunirnar við fríhandli, fylgja vit einum vinnupolitikki, hvørs hugsjón er, at tveir av trimum framleiðslumiðlum, nevniliga arbeiðsmegi og kapital, vilja vit fegin selja á altjóða marknaðunum, men ikki keypa, og hin triðja framleiðslumiðilin, nevniliga rávørur, vilja vit fegin keypa á altjóða marknaðunum, men ikki selja.

Sum vit hava víst á, er veruligur fríhandil ein týðandi fortreyt fyri búskaparligum effektiviteti og virðisøking, t.e. eisini fríhandil við framleiðslumiðlum og tíðarjavnaður fríhandil. Orsøkirnar til politiskar avmarkingar av handli mugu tí finnast í øðrum samfelagsligum atlitum enn hægst møguligt búskaparligt livistøðið fyri føroyska borgaran. Fákunnleiki um grundleggjandi búskaparligar samanhangir eigur ikki at vera ein orsøk.

Høvuðsorsøkin til skeiva vinnupolitikkin er tann grundleggjandi skeiva uppfatan, at samfeløg eru í altjóða kapping á sama hátt sum fyritøkur í altjóða kapping, og at tey somu ástøði, sum verða brúkt til at viðgera vinnupolitikkin hjá einstøkum fyritøkum kunnu brúkast til at gera greiningar av vinnupolitikkinum hjá einum samfelag.

Samfeløg eru heilt aðrir skapningar enn fyritøkur, og búskaparligu samanhangirnir og spælireglurnar, sum galda fyri samfeløg, líkjast ikki teimum, sum galda fyri tær einstøku fyritøkurnar. Tí ber ikki til at uppfata lond sum kappingarneytar, á sama hátt sum fyritøkur í

kapping um marknaðarpartar.

# Skjal: Ein nýggj tilgongd til lýsingar av føroyska búskapinum

*Hetta skjal lýsir eina nýggja tilgongd til lýsingar av føroyska búskapinum. Við útgangsstøði í nútímans búskaparfrøði teknar skjalið eina nýggja mynd av nøkrum grundleggjandi samanhangum í føroyska búskapinum.*

*Fyri ikki at gera greiningina ov langa og fløkjuta vera bert tey grunnleggjandi viðurskiftini tikin við. Tað vil siga at bara høvuðslinjurnar vera skitseraðar. Nógvar ávirkanir, sum mugu takast við í viðgerðir av ítøkiligum búskaparligum málum, eru ikki tiknar við her. Viðgerðin kann tí tykjast nakað forfjónað frá "veruligum" búskaparligum viðurskiftum, t.e. viðurskifti vanliga borgarin merkir í dagligdegnum og tí hevur størst áhuga fyri. Men fyri at kunna seta hesi viðurskifti inn í rættan samanhang er umráðandi, at heildarmyndin av búskapinum er røtt. Hetta skjal er ein roynd at seta fram eina slíka heildarmynd.*

*Í skjalinum verður ein javnvágsmyndil skitseraður, ið inniheldur eina skilliga útgreinaða uppfatan av føroyska búskaparbygnaðinum. Uppfatanin í myndlinum av teim flestu búskaparligu viðurskiftum er sera ymisk frá vanligu uppfatanini av, hvussu føroyski búskapurin er háttaður.*

*Ein høvuðsniðurstøða, ið fæst burtur úr javnvágsmyndlinum, er, at grundleggjandi samfelagsliga gagnið av útflutningsvinnunum og ríkisveitingini úr Danmark er ikki, at tær skapa ein eftirspurning eftir vørum og tænastum hjá heimamarknaðarvinnunum, men at tær nøkta ein eftirspurning hjá føroysku húsarhaldunum eftir útlendskum vørum og tænastum. Heimamarknaðarvinnurnar liva í síðsta enda ikki av eftirspurningi frá útflutningsvinnunum ella ríkisveitingini, men eins og útflutningsvinnurnar av eftirspurningi frá teim føroysku húsarhaldunum.*

*Við javnvágsmyndlinum og nøkrum eyka fortreytum sum hugsanargrundarlag ber hareftir til stutt at gera nakrar metingar av ávirkanini á búskaparligu javnvágina av broytingum í búskaparliga umhvørvinum, eitt nú minkandi ríkisveiting, møguligum oljuinntøkum og skiftingum í framleiðsluvirðinum í ymsum vinnum.*

*At enda inniheldur skjalið eina stutta viðgerð av grundarlagnum undir búskaparligu stuttíðargreiningunum í Hvítubók. Í fyrsta lagi hevur ein eftirmeting av hesum arbeiði frá einum nýggjum sjónarhorni eitt ávíst sjálvstøðugt virði. Í øðrum lagi gevur hetta ein møguleika fyri at vísa á, hvat tað inniber fyri niðurstøðurnar í Hvítubók, at greiningarnar har ikki byggja á búskaparfrøði men á hagfrøði.*

*Innihaldsyvirlit:*

*Inngangur* ... 67
*Búskaparligir myndlar* ... 67
*Myndil av føroyska búskapinum* ... 68
*Ástøði um framleiðslu og umbýting av vørum og tænastum* ... 69
*Nýggjur myndil av búskapinum* ... 70
*Framleiðsluparturin* ... 70
*Eftirspurningsparturin* ... 72
*Javnvágsmekanisman* ... 72
*Uppfatan av búskapinum endurspegla í myndlinum* ... 75
*Hvat avmarkar virksemið?* ... 75
*Einvegis eftirspurningsávirkan - ein illusjón* ... 76
*Framboð og eftirspurningur* ... 78
*Ávirkan av broytingum í búskaparliga umhvørvinum* ... 79
*Skiftingar í framleiðsluvirðinum* ... 80
*Skiftingar í framleiðslumøguleikunum* ... 80
*Óstøðug framleiðsla* ... 81
*Minking av ríkisveitingini* ... 82
*Ríkisveitingin og búskaparlig tillaging* ... 82
*Íslendska kanningin* ... 84
*Ríkisveitingin og landskassin* ... 85
*Ríkisveitingin og Skiftisgrunnurin* ... 86
*Oljuinntøkur* ... 87
*Oljan og heimamarknaðurin* ... 87
*Oljan og landskassin* ... 88
*Hvat skapar búskaparligu vælferðina?* ... 89
*Framleiðslumiðlarnir* ... 89
*Skipan av framleiðsluni* ... 89
*Studningur minkar um vælferðina* ... 91
*Samandráttur av javnvágsmyndli* ... 91
*Nýggj tilgongd til búskapargreiningar* ... 91
*Búskaparligar niðurstøður* ... 92
*Niðurstøður um politiskar atgerðir* ... 92
*Hvítabók* ... 93
*Myndil av búskapinum* ... 94
*Uppfatan av búskapinum* ... 95
*Kassamynd av skammstundarmyndlinum í Hvítubók* ... 96
*Ávirkan av broytingum í búskaparliga umhvørvinum* ... 98
*Minking í ríkisveitingini* ... 98
*Oljuinntøkur* ... 98
*Søgan um 100 millónir, sum framvegis eru 100 millónir* ... 99
*Hagfrøði ella búskaparfrøði, ikki bæði* ... 100
*Niðurstøða* ... 101

## Inngangur

Støðan hjá búskaparfrøðingum í Føroyum í dag svarar til støðuna hjá einum handverkara, sum bara hevur ein hamara og eingi onnur tól í amboðskassanum. Hamarin er gjørdur til eitt ávíst endamál, men av tí at eingi onnur amboð eru til taks, verður hamarin brúktur til allar aðrar uppgávur eisini. Góðskan á lidna arbeiðnum er sjálvandi hareftir.

Útgávan av búskaparpartinum av Hvítubók er helst einasta útgávan, har føroyskir búskaparfrøðingar hava lagt fram eina heilskapaða hugmynd um føroyska búskapin. Ikki soleiðis at skilja, at har bara er tann eina hugmyndin, tí í Hvítubók eru umboðaðar ymiskar meiningar um hvussu føroyskur búskapur háttar sær.

Men hóast ymsu útleggingarnar í búskaparpartinum av Hvítubók, (hereftir bara nevnt Hvítabók, hóast sipað verður til búskaparpartin í ”Fylgibindi 1, búskapur” og sonevndu ”Íslendsku tølini” ella ”Fjarstundarárin av ….”) so trínir eitt eyðkent lyndi fram í bókini, sum er grundað á eina serliga fatan av búskaparligu viðurskiftunum.

Í høvuðsheitum kann búskaparfrøðiliga hugmyndin í Hvítubók býtast í tveir partar. Ein part, sum byggir á skammstundarmyndil (”short run model”) um búskapin og ein part, sum byggir á fjarstundarmyndil (”long run model”) um búskapin. Hetta verður meira gjøllað viðgjørt í hesum skjali.

Skjalið vísir á mistakið, at grunda lýsingar av grundleggjandi broytingum í búskaparliga umhvørvinum, sum til dømis skerjingini av ríkisveitingini, á ein skammstundarmyndil, sum á ongan hátt er egnaður at svara slíkum spurningum.

Uppfatanin løgd fram her og uppfatanin í Hvítubók eru ikki tvær ymiskar búskaparfrøðiligar uppfatanir. Her er sostatt ikki spurningur um tveir sokallaðar ”skúlar” av búskaparfrøði. Í Hvítubók verður hagfrøði uttan haldgóðan botn í búskaparfrøðini útgivin fyri at vera skilagóð búskapar-frøðislig skilgreining – tilætlað ella ikki.

Av tí at búskaparliga grundhugsjónin í Hvítubók ikki er eitt einsamalt mistak, men heldur er ein vanlig misfatan av búskaparligum samanhangum, verður evnið tikið til viðgerðar. Eftir okkara tykki er hetta sama slag av misfatan, sum viðgjørt er frammanfyri í samband við vinnupolitikkin, og sum so mangan er grundarlagið undir búskaparpolitiskum avgerðum, sum politisku myndugleikarnir taka. Hetta er eisini sama misfatan, sum skínur ígjøgnum, tá tíðindatænastan og fólk flest viðgera føroyskan búskap.

## Búskaparligir myndlar

Flest allar búskaparligar greiningar standast av, at vit vilja gera forsagnir, um hvat hendir við týðandi búskaparligum støddum, um búskaparliga umhvørvið broytist. Vit kunnu vera áhugaði í at fáa forsagnir, um hvat hendir við arbeiðsloysinum, um ríkisveitingin

verður minkað, hvat hendir við lønarlagnum í fiskivinnuni, um vit finna olju, hvat hendir við arbeiðsútboðnum, um skattaprosentið fer upp ella niður osfr.

Allar búskaparligar greiningar byggja á meira ella minni skilliga útgreinaðar myndlar. Myndlarnir eru skilligar myndir av uppfatanini hjá myndlabyggjaranum av, hvussu búskaparligi veruleikin sær út. Sjálvsagt kunnu ikki øll viðurskifti vera við í einum myndli, men um nøkur viðurskifti, sum hava avgerandi týdning, ikki vera tikin við, verða forsagnirnar við myndlinum allarhelst skeivar. Tí er neyðugt, at myndlabyggjarin tekur øll tey viðurskifti við, sum hann ella hon heldur hava stóran týdning fyri málið, sum skal lýsast.

Samstundis er neyðugt at gera myndilin so einfaldan sum gjørligt. Júst sum eitt landafrøðiligt kort í 1:1 lutfalli ikki er til gagns fyri nakran, er neyðugt, at ein búskaparligur myndil tekur fram nøkur viðurskifti og sær burtur frá øðrum. Eru ov nógvir smálutir við, kann tað vera trupult ella ógjørligt at fáa yvirlit yvir, hvørja ávirkan broytingar í búskaparliga umhvørvinum hava á tær áhugaverdu støddirnar í myndlinum. Fyri at fáa eitt so gott yvirlit sum gjørligt yvir tað, sum fyriferst í myndlinum, er neyðugt at síla øll tey viðurskifti burtur, sum ikki verða mett at hava avgerandi týdning

Listin er sjálvsagt at vita, hvørji viðurskifti hava týdning og tí skulu vera við, og hvørji viðurskifti ikki hava týdning og tí ikki skulu vera við. Tað sum ger búskaparfrøði spennandi er, at ymiskt kann vera, hvørji viðurskifti fólk halda hava týdning. Sum við øllum øðrum samfelagsvísindum, har ikki ber til at seta tvær strikur undir úrslitið, kann ósemja tí vera um góðskuna av listini.

Tá so myndilin er liðugt bygdur, ber til at gera royndir við myndlinum fyri at síggja, hvørjar forsagnir myndilin gevur um ávirkanina av broytingum av ymsum slag. Royndir verða gjørdar við at broyta búskaparliga umhvørvið í myndlinum og so hyggja at, hvørjar forsagnir myndilin ger um ávirkanina av broytingini á restina av búskapinum.

**Myndil av føroyska búskapinum**

Hetta skjalið kann síggjast sum ein roynd at seta út í kort eitt nýtt grundarlag fyri lýsingum av føroyska búskapinum, nevniliga eitt grundarlag undir ein ástøðiligan javnvágsmyndil (”theoretical general equlilibrium model”). Um vit halda okkum til myndina við handverkaranum, kunnu vit siga, at hetta er ein fyrsta roynd at gera eitt amboð aftrat - eina sag.

Javnvágsmyndilin er ein roynd at vísa, hvussu til ber at fáa innlit í, hvussu føroyski búskapurin háttar sær, við at brúka nútímans búskaparfrøði í útgreiningunum. Hetta arbeiðið er sjálvsagt ógvuliga umfatandi og fer at taka fleiri – ella kanska heldur nógv - ár at fáa upp á eitt somikið høgt støði, at nøkulunda nágreinilig tøl kunnu setast á tær niðurstøður, sum tilgongdin kann vísa á. Men onkustaðni skal

byrjast.

Ein nýggj tilgongd til lýsingar av føroyska búskapinum leiðir fram til nakrar niðurstøður, sum kunnu brúkast til at koma við skilligum útsagnum um nøkur evni, sum eru frammi í løtuni. Sum dømi verður víst, at javnvágsmyndilin saman við nøkrum rætt valdum eyka myndlafortreytum kann brúkast sum amboð til at hyggja at búskaparligu ávirkanini av minkandi ríkisveiting, nógv umtalaða Skiftisgrunninum hjá landsstýrinum og møguligum oljuinntøkum. Víst verður á, at skammstundar-myndilin í Hvítubók ikki kann nýtast til at lýsa hesar ávirkanir. Av somu orsøk eru fleiri av niðurstøðunum, sum hava formað búskaparliga kjakið seinastu árini, ikki rættar.

Í viðgerðini niðanfyri verður víst á:

- Týdningin av sokallaðum javnvágsmyndlum, ið byggja á nútímans búskaparfrøði, har framleiðsla og umbýting av vørum og tænastum, heldur enn eftirspurningsávirkanin av pengastreymum, er útgangsstøðið, í sambandi við greiningar av umfatandi broytingum í samfelagsbúskaparliga umhvørvinum.
- Eitt dømi um, hvussu ein tílíkur javnvágsmyndil av føroyska búskapinum kann síggja út.
- Nøkur dømi um viðurskifti, ein javnvágsmyndil kann brúkast til at lýsa, eitt nú (manglandi) týdningin av Skiftisgrunninum hjá landsstýrinum í samband við fullveldismálið og leiklutin hjá landskassanum í sambandi við ríkisveitingina og møguligar oljuinntøkur.
- At sokallaði íslendski myndilin, ið var nýttur í samband við arbeiðið við Hvítubók, er ein javnvágsmyndil, men at ein fortreyt í “íslendsku kanningini” um, at almenni sektorurin ikki skal minka, um ríkisveitingarnar fella burtur, er órealistisk. Víst verður eisini á broyttu niðurstøðuna í kanningini, um henda fortreytin ikki var.
- At sokallaðu “skammstundargreiningarnar” í Hvítubók ikki byggja á haldgott búskaparfrøðiligt grundarlag. Greiningarnar byggja á ein hagfrøðiligan myndil, sum ikki kann brúkast til at siga nakað um grundbygnaðin í føroyska búskapinum ella um ávirkanina av ógvusligum broytingum í búskaparliga umhvørvinum, sum fund av oljuinntøkum ella burturtøka av ríkisveitingini eru dømi um.

Ætlanin við hesum skjali er at vísa lesaranum á, at nógvar av teimum niðurstøðum, fólk vanliga gera sær viðvíkjandi nógvum búskaparligum viðurskiftum, ikki eru so sjálvsagdar, sum fólk ofta halda. Men fyrst og fremst er meiningin at vísa á eina, í føroyskum samanhangi nýggja, uppfatan av og tilgongd til búskaparlig viðurskifti, sum gevur lesaranum møguleika fyri sjálvur at hugsa um búskaparlig viðurskifti frá einum nýggjum sjónarhorni.

**Ástøði um framleiðslu og umbýting av vørum og tænastum**

Til greiningar av broytingum í búskaparliga umhvørvinum, sum til dømis burturtøka av ríkisveitingini, og fjarstundarávirkanini av tílíkum, er neyðugt at hava serskilda útgreining av framleiðslupartinum og eftirspurningspartinum av búskapinum, og hvussu atferðin hjá borgarunum á hesum báðum síðunum verður samskipað. Hetta er neyðugt, bæði fyri at fáa eina rætta uppfatan av, hvussu beinagrindin í føroyska búskapinum sær út, og fyri at fáa rættari forsagnir viðvíkjandi ávísum týðandi broytingum í búskaparliga umhvørvinum.

### Nýggjur myndil av búskapinum

Vit fara tí at hyggja at báðum pørtunum av realbúskaparliga fundamentinum í búskapinum hvør sær, nevniliga tøknuligu framleiðslumøguleikunum á aðrari síðuni og eftirspurninginum hjá brúkarunum á hinari síðuni. Greiningarnar niðanfyri byggja á ein javnvágsmyndil, sum serskilt tekur hædd fyri framleiðslupartinum, eftirspurningspartinum og prísmekanismuni, sum gjøgnum marknaðirnar samskipar báðar síðurnar av búskapinum. Hetta gevur eina heilt nýggja mynd av, hvar vørurnar og tænasturnar, føroysku húsarhaldini hava til taks, koma frá, og hvussu avgjørt verður, hvussu nógv skal framleiðast av hvørjari. Við tí nýggja myndlinum ber haraftrat til at fáa nakrar heilt aðrar og rættari forsagnir um ávirkanina av ávísum broytingum í búskaparliga umhvørvinum, enn tær sum vanliga verða førdar fram í almenna kjakinum.

### Framleiðsluparturin

Framleiðsluorkan er grundvøllurin í føroyska búskapinum, og neyðugt er at fáa hesa sannroynd skilliga útgreinaða. Framleiðsluorkan er - saman við ynskjunum um nýtslu av teim vørum, búskapurin kann framleiða - beinagrindin í føroyska búskapinum, og neyðugt er at hava eina týðuliga mynd av, hvussu hendan sær út, áðrenn farið verður í gongd við at lýsa ávirkanirnar av broytingum í búskaparliga umhvørvinum.

Fyrst og mest grundleggjandi má skiljast ímillum framleiðsluorku og framleiðslu. Framleiðsluorkan av einum vørubólki er tann framleiðslu, sum er møgulig, um øll arbeiðsmegi og allur kapitalur í samfelagnum verða brúkt í tí sektorinum. Faktiska framleiðslan av eini vøru er tí altíð minni enn framleiðsluorkan. Hvussu stór framleiðsluorkan er, verður avgjørt av tøkari arbeiðsmegi, tøkum kapitalapparati og støðið á tí tøkni, ið er íløgd arbeiðsmegina og kapitalapparatið. Í tann mun framleiðslutøknin ikki verður fyri álvarsligum bakkasti eru framleiðslumøguleikarnir sostatt til staðar, hóast eftirspurningurin eftir framleiðsluni minkar.

Myndilin býtir allar vørur og tænastur upp í tríggjar bólkar:

- gjaldoyra,

- privatar heimamarknaðarvørur og
- almennar heimamarknaðarvørur.

Gjaldoyra er bólkaheiti fyri allar tær vørur, sum útflutningsvinnan framleiðir. Øll framleiðsla, sum útlendingar vilja gjalda fyri, er í veruleikanum umvegis framleiðsla av innflutningsvørum. Hetta kemst av, at vørur og tænastur, sum útlendingar gjalda fyri, gevur fremmant gjaldoyra, sum aftur kann brúkast til at keypa vørur til innflutnings. Sæð frá sjónarhorninum hjá føroyska húsarhaldinum er framleiðsla av vørum til útflutnings tí í veruleikanum bert umvegis framleiðsla av vørum til innflutnings.

Ríkisveitingin er í hesum samanhangi eisini framleiðsla av innflutningsvørum (hon kann alt eftir politiskari hugsjón síggjast sum framleiðsla av goodwill, sum danir keypa frá okkum, ella gjald fyri leigu av Føroyum, til dømis til hernaðarlig endamál). Munurin millum føroyska útflutningsframleiðslu og ríkisveitingina er, at eingir føroyskir framleiðslumiðlar eru neyðugir fyri at framleiða tey keypsrættindi til útlendskar vørur, sum ríkisveitingin er.

Fiskur og ríkisveiting geva ikki keypsrættindi til heimamarknaðarvørur, men bert til innflutningsvørur, t.e. bilar, vaskimaskinur osfr. Men ríkisveitingin gevur møguleika fyri at føroyskir framleiðslumiðlar, sum annars skuldu framleitt vørur til útflutnings fyri at gjalda fyri innflutningin, kunnu flytast yvir í framleiðslu av heimamarknaðarvørum. Tað vil siga, at ríkisveitingin ikki í sær sjálvum skapar størri framleiðsluorku av heimamarknaðarvørum, men hon gevur møguleika fyri, at størri partur av tøku arbeiðsmegini og tøka realkapitalinum verða gagnnýtt í heimamarknaðarvinnuni.

Heimamarknaðarvørur eru allar tær vørur og tænastur, sum av einari ella aðrari orsøk bert kunnu framleiðast í Føroyum. Tann avgerandi munurin millum innflutningsvørur og heimamarknaðarvørur er, at meðan framboðið av innflutningsvørum sæð frá føroyskum sjónarmiði er óavmarkað, er framboðið av heimamarknaðarvørum avmarkað av tøkum framleiðslumiðlum. Um vit til dømis finna olju, kunnu vit fáa fleiri innflutningsvørur uttan trupulleikar, tí ríkiligt er til av bilum, teldum osfr.

Oljuinntøkur geva hinvegin ikki í sær sjálvum fleiri røktarheimspláss ella aðrar vørur, sum bert kunnu framleiðast í Føroyum. Skulu vit hava fleiri heimamarknaðarvørur er neyðugt, at meira arbeiðsmegi og meira realkapitalur verða brúkt til framleiðslu av hesum vørum. Og av tí at nøgdin av arbeiðsmegi og realkapitali, sum kann veita føroyskar vørur og tænastur, ganga náttarvakt á Landssjúkrahúsum ella byggja barnagarðar í Runavík til dømis, er avmarkað, er tað her tann veruliga avmarkingin í framleiðsluni liggur.

Heimamarknaðarvørurnar kunnu býtast í tveir bólkar, privatar og almennar heimamarknaðarvørur. Privatu vørurnar eru nýbakað breyð

og dagbløð til dømis, og flest allar sølutænastur, so sum bilasølutænastur, teldutænastur osfr. Allar almennar vørur og tænastur eru heimamarknaðarvørur.

Sjálvsagt eru nógvar vørur, ið torført kann vera at bólka í ein ávísan bólk, húsasmíð og føroyskt tógv til dømis, men meðan roynt verður at fáa eitt yvirorðnað innlit í, hvussu búskapurin virkar, hevur hetta ikki so stóran týdning.

Tær tríggjar vørurnur vera framleiddar í fýra sektorum: Almenna heimamarknaðarvøran verður framleidd av einum almennum sektori, privata heimamarknaðarvøran verður framleidd av einum privatum heimamarknaðarsektori, og fremmant gjaldoyra, t.e. keypsrættindi til útlendskar vørur, verður framleitt av tveimum sektorum, einum vanligum framleiðslusektori, t.e. útflutningsvinnuni, sum krevur arbeiðsmegi og realkapital, og einum sektori, sum sæð frá føroyskum sjónarhorni framleiðir innflutningsvørur uttan nýtslu av arbeiðsmegi og realkapitali, t.e. ríkisveitingin og møguliga í framtíðini oljuvinnan.

### Eftirspurningsparturin

Virðisøkingin av framleiðsluni hjá eini fyritøku fer út til borgararnar sum inntøka frá útleigan av framleiðslumiðlum og løn fyri útint arbeiði. Aftrat hesum fær føroyski brúkarin nakað av gjaldoyra frá ríkisveitingini sum eitt ískoyti til inntøkuna. Samlaða inntøkan er so tann miðil, sum brúkarin hevur til at nøkta síni ynskir um nýtslu.

Eftirspurningurin hjá brúkarunum gevur framleiðslu av eini vøru ella tænastu búskaparligt virði. Til dømis skapar gjaldoyra í sær sjálvum ikki eftirspurning eftir vørum og tænastum. Gjaldoyra, eins og privata og almennu heimamarknaðarvørurnar, er ein vøra, sum verður eftirspurd.

Hvønn eftirspurning borgararnir hava, er ein spurningur um ynskir um vørur og tænastur, sum einki samband hevur við spurningin um, hvar borgararnir eru framleiðarar. Hvørja vøru borgararnir eru framleiðarar av, er ein spurningur um, hvar teirra arbeiðsmegi og kapitalur hava sínar komparativu fyrimunir sum framleiðslumiðlar. Ein sjómaður, sum arbeiðir við framleiðslu av gjaldoyra og ein tænastumaður, sum framleiðir almennar tænastur, kunnu hava júst sama eftirspurningsmynstur.

Tað eru sostatt ynskir hjá føroyska brúkaranum um nýtslu, sum skapa eftirspurning eftir vørum og tænastum í Føroyum. Eftirspurningurin hevur ikki uppruna á framleiðslupartinum í búskapinum, men uppstendur uttanfyri framleiðslusektorarnar. Eftirspurningurin eftir vørum og tænastum kemur sostatt ikki úr útlandinum gjøgnum nakrar ávísar sektorar ella vinnur, men frá føroysku brúkarunum, líkamikið í hvørjari vinnu, teir eru framleiðarar.

### Javnvágsmekanisman

Av tí at tey fægstu framleiða alt tað sjálvi, sum tey hava tørv á, brúka tey flestu partar av inntøkuni til at býta seg fram til tað úrval av vørum og tænastum, sum gevur teimum mest gagn. Hesin møguleiki fyri skilnaði millum borgaran sum eftirspyrjara og borgaran sum framleiðara er avgerandi neyðugur fyri arbeiðsdeilingina og harvið materiellu vælferðina. Í einum kapitalistiskum samfelag er tað tann sosiala skipanin, sum verður kallað “marknaðurin”, sum skapar henda møguleika, tí tað er her umbýti av vørum og tænastum fer fram. Um eingin marknaður var, har borgarin kundi selja sína framleiðslu og keypa aðrar vørur, var hann noyddur sjálvur at framleiða alt tað, hann hevði tørv á. Hetta hevði sjálvsagt ikki verður nøkur munadygg loysn, og júst tað er sjálvandi eisini orsøkin til at menniskja hevur ”uppfunnið” marknaðin.

Hvussu eftirspurningsparturin og framboðsparturin eru samskipaðar, er tí av avgerandi týdningi. Triðji partur av byggingini av myndlinum er tí ein serskild útgreining av, hvussu samskipanin millum framleiðslupartin og eftirspurningspartin fer fram á marknaðinum.

Hvør framleiðslusamanseting av teimum trimum vørunum verður framleidd og fer út til borgararnar til nýtslu verður avgjørt á marknaðunum. Fimm marknaðir eru í myndlinum: Ein fyri hvørja av teimum trimum vørunum, og ein fyri hvønn av teimum báðum framleiðslumiðlunum. Á marknaðunum fyri tær tríggjar vørurnar eru framleiðararnir seljarar og húsarhaldini keyparar. Á marknaðunum fyri framleiðslumiðlar eru tað hinvegin húsarhaldini, sum eru seljarar, meðan framleiðararnir eru keyparar.

Vilja brúkararnir hava meira av einari vørur, má arbeiðsmegi og kapitalur brúkast til framleiðsluna av vøruni (hetta er tó ikki galdandi, um samfelagið kann fáa atgongd til fleiri vørur við eini hækking í ríkisveitingini, størri oljuinntøkum ella líknandi). Tað merkir samstundis, at minni framleiðsla verður av øðrum vørum. Veruligi kostnaðurin av at fáa meira framleiðslu av til dømis gjaldoyra, er tí tann framleiðsla av almennum vørum ella privatum heimamarknaðarvørum, sum ikki er møgulig, tí arbeiðsmegin og kapitalurin verða brúkt til framleiðslu av gjaldoyra.

Framleiðsluparturin og brúkaraparturin samskifta ávikavist framleiðslukostnaðir og nýtsluynski gjøgnum marknaðirnar í skapi av prísum. Prísirnir eru tí tey tekin, sum framleiðararnir og brúkararnir brúka til at “samráða” seg fram til eina javnvág, har brúkararnir fáa tað samanseting av framleiðsluni, sum gevur teimum mest møguligt gagn burtur úr teim framleiðslumøguleikum, ið finnast í búskapinum. Úrslitið av hesum “samráðingum” verður so tann faktiska samansetingin av framleiðsluni, vit síggja í hagtølunum.

*Kassamynd av javnvágsmyndlinum*




Slettet: ¶
¶
¶
¶

Slettet: ¶
¶
¶
¶
¶
¶

Slettet: ¶
¶
¶
¶

Slettet: ¶
¶
¶
¶

Slettet: ¶

Slettet: ¶

Slettet: ¶

Slettet: ¶

Slettet: ¶

Slettet: ¶
-

Slettet: (

Slettet: )

Henda myndin av føroyska búskapinum sær sjálvsagt burtur frá einum ótali av viðurskiftum. Til dømis verður sæð burtur frá øllum inoptimalitetum í hesi greining, so sum monopolmegi. At síggja burtur frá tílíkum viðurskiftum er ráðiligt í hesum myndlinum, tí marknaðarligir inoptimalitetir í teim einstøku vinnugreinunum hava ikki stórvegis týdning, tá hugt verður eftir yvirorðnaða sektorbýtinum í búskapinum og skiftingar í hesum. Tað týdningarmikla er, at tað eru nóg mikið av grundleggjandi viðurskiftum við í myndlinum, soleiðis at vísast kann á nakrar samanhangir, sum fólk vanliga ikki geva sær far um.

Í øðrum samanhangum, sum til dømis tá hugt verður at teim einstøku vinnugreinunum innanfyri ein sektor, er avgerandi neyðugt fyri góðskuna av greiningunum, at hædd verður tikin fyri inoptimalitetum, sum kunnu vera á marknaðinum

**Uppfatan av búskapinum endurspegla í myndlinum**

Uppfatanin sýnd í hesum myndlinum av, hvørjir partar av búskaparliga umhvørvinum hava týdning fyri fjarstundargongdina í føroyska heildarbúskapinum, og hvussu hesir hanga saman, skilir seg grundleggjandi frá uppfatanini í hagfrøðiliga myndlinum í Hvítubók. Tí eru forsagnirnar um ávirkanina av broytingum í búskaparliga umhvørvinum á viðurskifti, ið hava týdning fyri hesar partar, eisini nógv øðrvísi (sí niðanfyri).

## Hvat avmarkar virksemið?

At greiða frá øllum teimum fyritreytum, ið eru gjørdar fyri at fáa fram eina greiða mynd av búskapinum, hevði tikið ov nógv pláss. Her skal tí bara greiðast frá tveimum høvuðssjónarmiðum. Í fyrsta lagi endurspeglar myndilin eina áskoðan um, at fyri at skilja, hvussu búskapurin virkar, er neyðugt at hyggja gjølla at, hvussu framleiðsluparturin og eftirspurningsparturin virka hvør sær, og hvussu tær eru samskipaðar. Tvær broytingar í búskaparliga umhvørvinum, sum hava somu eftirspurningsávirkan, og sum tí sambært hagfrøðiliga myndilin eru eins, kunnu hava ógvuliga ymiska ávirkan á fjarstundarjavnvágina í búskapinum, um broytingarnar hava upprunað á hvør sínari síðu av marknaðinum, ella hava upprunað í eini broyting í sjálvari marknaðarskipanini, t.e. í tí sosialu mekanismuni, sum samskipar framleiðslu- og brúkarsíðurnar.

Broytingar í faktisku nýtsluni og framleiðsluni kunnu standast bæði av broytingum í eftirspurningsmynstrinum og broytingum í framleiðsluorkuni. Her skulu vit bara viðgera ávirkanina av broytingum í framleiðsluorkuni. Hetta kemst fyrst og fremst av, at lutfalsligi eftirspurningurin hjá húsarhaldunum eftir teim ymsu vørubólkunum er meira støðugur enn orkan at framleiða vørurnar, men eisini tí tey mest aktuellu málini um broytingar í búskaparliga umhvørvinum, eru um broytingar á framleiðslupartinum. Sum greitt

verður frá niðanfyri eru tað haraftrat í Føroyum oftast broytingar á framleiðslupartinum, sum eru upphav til tey størstu krøvini um tillagingar av framleiðslumiðlunum millum vørubólkarnar, og harvið eisini til stóru konjukturskiftingarnar.

Haraftrat er tað soleiðis, at meðan framleiðslan kann skifta upp og niður yvir styttri tíðarskeið, sum fylgja av broytingum í eftirspurninginum, er manglandi eftirspurningur ikki nakar trupulleiki sæð yvir longri tíðarskeið. Ynskini um vørur og tænastur eru meira ella minni óavmarkað, so tað er ikki á eftirspurningspartinum at avmarkingar í virkseminum stava. Manglandi eftirspurningur kann tí bara vera ein trupulleiki yvir styttri tíðarskeið.

Yvir styttri tíðarskeið kann eftirspurningurin minka, soleiðis at partar av framleiðsluorkuna ikki vera nýttir. Hetta kann til dømis henda um prísirnir eru trekir at tillaga seg, soleiðis at prísteknini, húsarhaldini og fyritøkurnar arbeiða útfrá, nøkur tíðarskeið ikki eru tey røttu, kanska serliga aftan á eitt búskaparligt bakkast. Í einum tílíkum føri kunnu bæði prísir og lønir ofta vera ov høg, so at eftirspurningurin eftir vørum, tænastum og arbeiðsmegi er minni enn framleiðsluorkan kann bera.

Men sum frá líður falla prísirnir, soleiðis at eftirspurningurin aftur økist, og framleiðslustigið lagar seg aftur til framleiðsluorkuna. Tað vil siga, at búskapurin sjálvsagt kann vera fyri álvarsligum bakkasti, men hann fánar ikki burtur í einki, hóast framleiðslan minkar í eitt tíðarskeið. Hetta kemst av, at framleiðsluorkan virkar sum eitt akker, sum framleiðslan ikki kann flyta seg ov langt burtur frá, hvørki niður ella upp. Búskaparligi aktiviteturin í samfelagnum kann viðhvørt vera omanfyri og viðhvørt niðanfyri tað, sum búskaparligi bygnaðurin kann halda til, men í longdini svarar framleiðslan til fjarstundar framleiðsluorkuna.

Hinvegin er framleiðsluorkan avmarkað og tí eru tøknilig framstig ella afturstig ógvuliga avgerandi fyri búskaparligu gongdina yvir longri tíðarskeið. Støðugt vaksandi produktivitetur í framleiðsluni er stutt og greitt ein høvuðsfortreyt fyri støðugt hækkandi livistøði fyri einstaka borgaran.

### Einvegis eftirspurningsávirkan - ein illusjón

Í øðrum lagi endurspeglar myndilin eina áskoðan um, at uppfatanin av eini einvegis eftirspurningsávirkan frá nøkrum vinnum á allar aðrar vinnur er skeiv. Tá tað í Hvítubók verður staðfest, at eingin eftirspurningsávirkan er frá "*avleiddu vinnunum*" á útflutningsvinnurnar, "*tí fiskurin verður ikki seldur í Føroyum, men uttanlands*", er tað sjálvandi í ein ávísan mun rætt, tí sum vit hava víst á, eru tað ikki vinnurnar, sum eftirspyrja framleiðslu, men brúkararnir.

Men tað er skeivt, tá hetta verður brúkt til at siga, at eingin eftirspurningur er eftir framleiðsluni hjá útflutningsvinnuni í Føroyum, og útflutningsvinnan tí er óheft av, hvat hendir innanlands. Um

útflutningsvinnan selur fisk ella okkurt annað til útlendingar hevur nevniliga ikki so stóran týdning. Tað sum frá einum føroyskum sjónarhorni hevur týdning er, at útflutningsvinnan afturfyri sína framleiðslu fær útlendskt gjaldoyra, sum kann brúkast til at keypa útlendskt framleiddar vørur fyri. Føroyski brúkarin eftirspyr ikki fisk í nevniverdum nøgdum, men stórur eftirspurningur er eftir útlendskum vørum og tí eftir tí gjaldoyra, sum skal brúkast til at keypa vørurnar fyri.

Lívsgrundarlagið hjá útflutningsvinnuni er júst, at hon framleiðir eina vøru, nevniliga útlendskt gjaldoyra, sum brúkarin í Føroyum eftirspyr. Um útflutningsvinnan framleiddi eina vøru, sum føroysku húsarhaldini ikki eftirspurdu, var eingin meining í at hava eina útflutningsvinnu. At siga, at eingin eftirspurningur er í Føroyum eftir framleiðsluni hjá útflutningsvinnuni, er tí púra burturvið.

Í Hvítubók (s. 86) stendur at "*Talan er…ikki um ein fløktan samanhang í føroyska búskapinum, har allar vinnur hava stóra ávirkan á hvørja aðra, men heldur um ein lutfalsliga einfaldan bygnað, har ávirkanin gongur frá nøkrum vinnum til aðrar vinnur.*" Við at hyggja at vørustreymunum sæst, at hetta er skeivt. Stór ávirkan er frá øllum trimum sektorum, sum brúka arbeiðsmegi og kapital, á bæði seg sjálvar og á hinar báðar sektorarnar. Tey, sum arbeiða í privatu heimamarknaðarvinnuni, býta sína framleiðslu bæði við aðra privata heimamarknaðarframleiðslu og framleiðslu av hinum báðum vørunum, nevniliga almennum vørum og innflutningsvørum.

Tað sum hendir í føroyska búskapinum er ikki, at útflutningsvinnan og ríkisveitingin alla tíðina pumpa lív í hinar báðar sektorarnar. Útflutningsvinnan framleiðir eina vøru, nevniliga gjaldoyra. Eigararnir av gjaldoyraframleiðsluni, t.e. eigararnir av arbeiðsmegini og kapitalinum, sum verða brúkt í framleiðsluni, býta ein part av sínum parti av framleiðsluni um við vørur framleiddar í hinum báðum sektorunum.

Eingin letur sína framleiðslu frá sær uttan at fáa framleiðslu hjá onkrum øðrum í býti, og eingin fær framleiðslu hjá øðrum uttan at lata nakað av sínu egnu framleiðslu í býti. Um vit bert hyggja at gjaldoyrastreymum, verður hesin búskaparligi veruleiki fjaldur, tí at bara streymurin av vøruni gjaldoyra verður taldur við, meðan allir aðrir vørustreymar verða fjaldir. Hetta gevur eina skeiva mynd av búskapinum, har gjaldoyraframleiðararnir, t.e. útflutningsvinnan, er einasti framleiðari, meðan privata og almenna heimamarknaðarvinnan bara taka ímóti framleiðsuni og skumpa hana ímillum sín.

Eftirspurningur er tí ikki ein tilgongd, sum hevur eina byrjan í útflutningsvinnuni ella ríkisveitingini og ein enda í almenna sektorinum ella privatu heimamarknaðarvinnuni. Heldur er tað ein framhaldandi tilgongd millum borgararnar sum brúkarar, t.e. eftirspyrjarar, og borgararnar sum framleiðarar.

Javnvágsmyndilin vísir sostatt, at serstaki leikluturin bæði leik og lærd í Føroyum vanliga tilluta gjaldoyrainntøkum er ikki rættur. Gjaldoyra kann býtast við innflutningsvørur, men hevur onga ávirkan á, hvussu nógv kann framleiðast av heimamarknaðarvørum. Heimamarknaðarframleiðsla er ikki avleitt virksemi av eftirspurningi, skapt av gjaldoyrainntøkum. Heimamarknaðarframleiðsla er skapt av einum ynski hjá borgarunum um vørur og tænastur, sum antin ikki kann framleiðast aðrastaðni enn í Føroyum, ella sum tað er bíligast at framleiða her.

Ikki er neyðugt við gjaldoyrainntøkum fyri at fáa í lag framleiðslu av heimamarknaðarvørum. Vit hava tørv á gjaldoyraframleiðslu at býta við innflutningsvørur fyri, ikki fyri at halda lív í heimamarknaðinum, tí vit kunnu fyri ein stóran part liva av at býta heimamarknaðarvørur fyri heimamarknaðarvørur.

Orsøkin til at vit hava eina útflutningsvinnu er, at vit hava komparativar fyrimunir í hesum vinnum. Tað vil siga at tað er nógv effektivari hjá føroyingum at framleiða fiskavørur, selja tær og keypa bilar, frystiskáp osfr. ístaðin, heldur enn sjálvi at framleiða allar tær vørurnar og tænasturnar, vit hava brúk fyri. Men hetta er ein spurningur um at brúka tøku framleiðslumiðlarnar effektivt, ikki um at vøran gjaldoyra hevur nakrar framleiðsluskapandi eginleikar, sum aðrar vørur ikki hava, og vit tí skulu hava so nógv av henni sum gjørligt.

### Framboð og eftirspurningur

Í tekningini av javnvágsmyndlinum sæst, at tað sum heldur lív í føroyska búskapinum, er útboðið av framleiðslumiðlum hjá húsarhaldunum, og eftirspurningurin hjá húsarhaldunum eftir tí lidnu framleiðsluni. Húsarhaldini útbjóða framleiðslumiðlar út til fyritøkurnar, sum eftirspyrja teir, tí teir eru neyðugur í framleiðsluni av vørum og tænastum. Vørurnar og tænasturnar, sum fyritøkurnar framleiða, fara aftur til húsarhaldini sum gjald fyri framleiðslumiðlarnar. Húsarhaldini brúka so sín part av framleiðsluni til at býta um vørur og tænastur við onnur húsarhald á marknaðinum, til tey hava fingið tað samanseting av vørum og tænastum, sum gevur teimum mest møguligt gagn.

At vit brúka pengaseðlar at avgreiða keyp og sølu við, hevur einki við framleiðslu og eftirspurning at gera, men er bara ein spurningur um at lætta um umbýtingina av framleiðslumiðlum og framleiðslu av teim ymsu vørunum millum framleiðararnar og húsarhaldini. Fyri húsarhaldið merkja fleiri pengaseðlar møguleikar til nýtslu av fleiri vørum og tænastum, men fyri samfelagið sum heild er tað sama bara galdandi, um pengaseðlarnir eru gávur av útlendskum gjaldoyra, t.e. rætturin til útlendskar vørur og tænastur, sum ikki skal gjaldast við framleiðslu hjá føroyskum framleiðslumiðlum.

At meira peningur kemur í umfar, merkir ikki av sær sjálvum, at fleiri

vørur og tænastur eru til taks til brúkararnar. Skulu vit sum samfelag fáa fleiri vørur og tænastur, mugu antin meira arbeiðsmegi og realkapitalur til arbeiðis, sum kunnu framleiða hesar vørur og tænastur, ella mugu verandi framleiðslumiðlar gerast meira produktivir. Sæð frá hesum sjónarmiði er fyrimunurin við ríkisveitingini, at danir geva okkum ræðisrætt yvir nøkrum av framleiðslumiðlunum hjá teimum, soleiðis at tøka nøgdin av framleiðslumiðlum veksur, uttan at hesir framleiðslumiðlar krevja part av síni ella okkara framleiðslu afturfyri.

Tað, sum samanlagt er tøkt til nýtslu hjá føroysku húsarhaldunum, er tað, sum tøku framleiðslumiðlarnir framleiða. Haraftrat koma tær nøgdir av keypikraft til innflutningsvørur, sum gjaldoyragávur geva. Givið at gjaldoyragávurnar hava eina ávísa stødd, antin tær koma úr Danmark ella upp úr havinum, fæst bara meira av eini vøru, um minni verður framleitt av eini aðrari vøru. Skulu tøku framleiðslumiðlarnir framleiða meira av einari vøru, mugu teir framleiða minni av onkrari aðrari vøru, líkamikið hvussu nógvir pengaseðlar koma í umfar aftrat.

Frá einum samfelagsligum sjónarhorni ber tí til at siga, at pengaseðlar ikki ”keypa” nakað. Teir lætta umbýtingina av framleiðslu millum húsarhaldini, men framleiða ikki vørur og tænastur sjálvir. Vert er tó at minna á, at tað at lætta umbýting av vørum og tænastum er ein tænasta í sær sjálvum, sum kann økja um arbeiðsdeilingina og tí eisini produktivitetin.

**Ávirkan av broytingum í búskaparliga umhvørvinum**

Alt eftir, hvat fyribrigdi ætlanin er at kanna, ber til at gera útgreiningar, har búskapurin, sum var skitseraður omanfyri, verður fyri broytingum í búskaparumhvørvinum, ið líkjast teimum, veruliga henda í búskapinum.

Er ætlanin at kanna ávirkanina av eini minking í ríkisveitingini ber til í myndlinum at taka burtur gjaldoyragávuna og síðan hyggja at, hvussu nýggja javnvágin í búskapinum sær út aftan á, at allar tillagingar eru farnar fram. Hetta er tað, sum varð gjørt við sokallaðu íslendsku kanningini í samband við Hvítubókararbeiðið. Eisini ber til at lata í myndlinum henda smærri, óregluligar broytingar í framleiðsluni av gjaldoyra. Tá hava vit ein konjukturmyndil við skiftingum í útflutningsvinnuni, sum upphav til konjukturarnar.

Niðanfyri skulu vit bara heilt stutt, við omanfyri nevnda myndlinum í huga, umhugsa ávirkanirnar av ymsum sløgum av uttaneftir komandi broytingum av búskaparliga umhvørvinum. Metingarnar um ávirkanina av teim ymsu umhvørvisbroytingunum eru ógvuliga ófullfíggjaðar, og skulu tí bara síggjast sum ein ávísing á nakrar møguleikar fyri skilagóðum greiningum av búskaparligum viðurskiftum, tá búskaparfrøðiliga grundarlagið er upp á pláss.

**Skiftingar í framleiðsluvirðinum**

## Skiftingar í framleiðslumøguleikunum

Tá framleiðslumøguleikarnir í eini vinnu vaksa í mun til framleiðslumøguleikarnar í øðrum vinnum, soleiðis at ein eind av vøruni kann framleiðast við færri framleiðslumiðlum enn áður, vilja brúkararnir oftast hava meira av hesi vøruni, men eisini meira av øðrum vørum. Tað vil siga at teir vilja hava framleiðslumiðlar fluttar úr vinnuni, har frambrotið er hent, yvir í aðrar vinnur, soleiðis at vinningurin av frambrotinum verður skiftur á allar vørurnar.

Eitt frambrot í framleiðsluni av einum av teimum trimum vørunum, vit framleiða í Føroyum, førir tí oftast til, at brúkararnir vilja hava meira av hesi vøruni, men samstundis vilja teir hava nakað av framleiðslumiðlum fluttar yvir í framleiðslu av hinum vørunum, soleiðis at meira fæst av øllum vørunum, heldur enn bara ein øking í nýtsluni av tí einu vøruni. Niðanfyri vísa vit á hesa útjavning í samband við møguliga framleiðslu av gjaldoyra gjøgnum oljuvinnuna. Greiningin av ávirkanini av eini minking av ríkisveitingini vísir á somu útjavningargongd við broyttum fortekni, nevniliga ávirkanina, tá framleiðslumøguleikarnir av eini vøru gerast verri, soleiðis at fleiri framleiðslumiðlar skulu til at framleiða eina eind av vøruni.

Brúkararnir vilja oftast hava eina ávísa javnvág í nýtsluni av teimum trimum vørunum. Um býtið av framleiðsluni millum vørubólkarnar verður forskotið tí framleiðslumøguleikarnir av hvørjari eind í teim ymsu vørubólkunum verður forskotið, vísa brúkararnir við sínum eftirspurningi, at teir vilja hava lutfalsliga býtið av framleiðsluni rættað uppaftur. Hesi boð verða send til vinnulívið gjøgnum prísirnar á marknaðunum. Býtið av framleiðsluni millum vørubólkarnar verður so rættað upp aftur við, at vinnulívið gjøgnum prísirnar á marknaðunum verður eggjað til at flyta framleiðslumiðlar úr framleiðslu av vøruni ella vørunum, har framleiðslumøguleikarnir fyri hvørja eind av framleiðslumiðlum eru vorðnir lutfalsliga góðir, til framleiðslu av vøruni ella vørunum, har framleiðslumøguleikarnir fyri hvørja eind eru vorðnir verri. Vert er at minnast til at hetta er ein mynd av einum bólki av vørum, ikki ein mynd av einum marknaði fyri eina einstaka vøru. Í ávísum førum kann gongdin vera hinvegin á einstøkum marknaðum sum marknaðurin fyri fartelefonir er eitt dømi um.

Tað vil siga, at verður búskaparliga umhvørvið fyri broytingum, er tað helst ein nýggj samanseting av framleiðsluni, sum gevur húsarhaldunum mest gagn. Í einum marknaðarbúskapi brúka húsarhaldini og fyritøkurnar marknaðarmekanismuna til at flyta javnvágina millum framleiðslu av teim ymsu vørunum til ta nýggju leguna, sum gevur húsarhaldunum mest gagn. Í tann mun politisku myndugleikarnir mótarbeiða flyting av arbeiðsmegi og realkapitali yvir í ávísar vinnur, tá marknaðarkreftirnar stremba tann vegin, forða myndugleikarnir sostatt fyri, at húsarhaldini fáa fult gagn burtur úr

broyttu framleiðslumøguleikunum.

Eitt aktuelt dømi um hesa búskaparmekanismu og hvussu hon verður forðað í at virka, er at finna í núverandi konjukturstøðu. Helst er eingin ivi um, at upprunaliga broytingin í búskaparumhvørvinum, sum hevur ført til stóru framgongdina seinastu árini er frambrotið í framleiðsluni av gjaldoyra, sum kom, tá fiskastovnarnir komu fyri seg aftur, og prísirnir hækkaðu munandi.

Við sínum eftirspurningi vísa brúkararnir heilt greitt, at teir vilja fordeila ein part av vinninginum í gjaldoyraframleiðsluni yvir á framleiðslu av heimamarknaðarvørum, men enn er henda nýggja javnvág ikki íkomin. Eitt gjaldsjavnaavlop upp á fleiri hundrað milliónir, samstundis sum ein stórur eftirspurningur eftir barnagarðsplássum, røktarheimsplássum og íbúðum av øllum slag ikki verður nøktaður, vísir, at vit framleiða meira gjaldoyra enn tørvur er á í løtuni, samstundis sum framleiðslan av heimamarknaðarvørum og tænastum er alt ov lítil.

Hetta skyldast í hvussu so er partvíst førda búskaparpolitikkinum. Orsakað av studningi av ymsum slag til framleiðslumiðlar í gjaldoyraframleiðslu, er truplari og harvið dýrari enn neyðugt hjá teimum, ið vilja nøkta eftirspurningin eftir heimamarknaðarvørum, at fáa framleiðslumiðlar til framleiðsluna. Við at forða framleiðslumiðlum í at flyta frá gjaldoyraframleiðslu yvir í framleiðslu av heimamarknaðarvørum, forðar búskaparpolitikkurin vinnulívinum at framleiða tað útboð av heimamarknaðarvørum, brúkararnir eftirspyrja. Hægri prísvøkstur enn neyðugt er ein sjálvsøgd fylgja.

Í tann mun prísvøksturin innanlands verður hildin at vera ov høgur, hava myndugleikarnir sostatt sjálvir verið við til at skapt henda trupulleika. Ístaðin fyri at umhugsa fíggjarpolitisk tiltøk, sum skulu minka um samlaðu keypiorkuna og harvið eftirspurningin og prísvøksturin innanlands, skuldu myndugleikarnir heldur tikið burtur tær forðingar, sum gera tað truplari enn neyðugt hjá vinnulívinum at flyta framleiðslumiðlar frá framleiðslu av gjaldoyra yvir í framleiðslu av heimamarknaðarvørum, soleiðis at brúkararnir fingu tað samanseting av nýtsluni, ið gevur teimum mest gagn. Í veruleikanum er verandi politikkur eitt tekin um manglandi álit á, at húsarhaldini og fyritøkurnar við prísmekanismuni sum amboð eru før fyri at finna fram til skilabestu samansetingina av framleiðsluni.

## Óstøðug framleiðsla

Hyggja vit at teim fýra framleiðslusektorunum í føroyska búskapinum, so er tað ikki rætt, at útflutningsvinnan og ríkisveitingin eru beinini, føroyski búskapurin stendur á, meðan almenni sektorurin og privata heimamarknaðarvinnan eru byrðarnar, hesi beinini skulu bera. Allir fýra sektorar eru eitt bein hjá búskapinum at standa á.

Vit kunnu ikki vera nakran av teim trimum bólkunum av vørum, sum teir fýra sektorarnir framleiða, fyriuttan, um vit ætla at hava eina framtíð her á klettunum. Ikki ber til at liva í Føroyum uttan tær innfluttu vørurnar, sum útflutningsvinnan og ríkisveitingin skaffa okkum. Ikki ber til at liva her uttan vegir, tunlar, sjúkrahús, skúlar osfr., sum almenni sektorurin framleiðir til borgararnar. Heldur ikki ber til at vera fyriuttan sølutænasturnar, fíggjartænasturnar, tíðindatænasturnar osfr., sum privata heimamarknaðarvinnan framleiðir, skal tað vera liviligt í Føroyum.

Frá einum eitt sindur broyttum sjónarhorni ber til at siga, at føroyski búskapurin bert hevur tvey bein at standa á. Tey bæði beinini eru framleiðsluorkan, sum býr í arbeiðsmegini og realkapitalinum á aðrari síðuni, líkamikið hvør vinnan er, og ríkisveitingin og aðrar rentur av ogn, vit eiga uttanlands, á hinari síðuni.

Orsøkin til at fólk flest halda útflutningsvinnuna vera serliga týdningarmikla er helst, at tey hava sæð, hvat hendir, tá framleiðsluvirðið í útflutningsvinnuni svíkur, antin tað er orsakað av vánaligum fiskiskapi ella vánaligum prísum á fiski. Búskapurin verður fyri bakkasti, sum merkist um alt landið.

Støðan hevði ikki verið annaðleiðis, um framleiðsluvirðið á einum av hinum báðum vørubólkunum minkaði almikið. Hevði framleiðslan av til dømis privatum heimamarknaðarvørum verið líka óstøðug, høvdu vit eisini upplivað stórur konjukturskiftingar, hóast framleiðslan av gjaldoyra var støðug.

Orsøkin til, at skiftingar í konjukturunum eru nógv heftar at gongdini í útflutningsvinnuni og serliga fiskivinnuni, er ikki, at “vit liva av fiskivinnuni”, men at framleiðslan av gjaldoyra í fiskivinnuni er ein so stórur partur av føroysku framleiðsluni og av kendum orsøkum er so sera óstøðug. Tí er “beinið”, sum framleiðir gjaldoyra nógv meira óstútt enn hini beinini.

**Minking av ríkisveitingini**

### Ríkisveitingin og búskaparlig tillaging

Javnvágsmyndilin vísir, at ríkisveitingin er ein partur av framleiðsluorkuni hjá føroyska búskapinum. Vit kunnu hugsað okkum, at aftrat útflutningsvinnuni eiga Føroyar eina fyritøku í Danmark, sum framleiðir gjaldoyra til føroyska samfelagið. Broytingar í ríkisveitingini eru tí broytingar í framleiðsluorkuni av gjaldoyra, t.e. nakað sum hevur sín uppruna á framleiðslupartinum í búskapinum.

Eins og er galdandi fyri aðrar uttaneftir komandi broytingar í framleiðslupartinum av búskapinum, ger ein møgulig broyting í ríkisveitingini, t.e. í framleiðsluni av gjaldoyra, at samansetingin av framleiðsluni má endurskoðast. Og sum greitt var frá omanfyri er tað marknaðarmekanisman, ella “samráðingar” gjøgnum marknaðin, sum

er besti háttur at syrgja fyri, at arbeiðsmegi og kapitalur verða fordeild millum vinnurnar soleiðis, at húsarhaldini fáa sum mest gagn burtur úr nýggju støðuni.

Lat okkum fyrst viðgera ávirkanina av at taka ríkisveitingina við í myndilin. Ofta verðurført fram, at ríkisveitingin ger, at almenni sektorurin er størri, enn hann hevði verið, um eingin ríkisveiting var. Hetta er rætt, men einki negativt er í hesum, heldur tvørturímóti. At almenni sektorurin veksur lutfalsliga av at fáa ríkisveiting, er bara ein fylgja av einum mynstri, sum ger seg galdandi í flestu londum, nevniliga at tá samfelagið verður ríkari, vilja húsarhaldini hava lutfalsliga fleiri almennar tænastur.

Í hesum sambandi er umráðandi at telja rætt upp. Tað er nýtslan hjá húsarhaldunum, sum hevur týdning, ikki hvussu nógv arbeiðsmegi og kapitalur er í hvørjari vinnu. Tá talt verður upp, hvussu lutfallið er millum nýtslu av teimum trimum vørubólkunum, innflutningsvørur, privatar heimamarknaðarvørur og almennar heimamarknaðarvørur, skal nýtslan av ríkisveitingini teljast sum nýtsla av gjaldoyra, t.e. keyp av innflutningsvørum.

Tað einasta ríkisveitingin ger, er nevniliga at rinda fyri ein part av innflutninginum, soleiðis at ikki er neyðugt at hava ein so stóran part av tøku føroysku arbeiðsmegini í gjaldoyraframleiðandi sektorinum. Fyrimunurin við ríkisveitingini er júst, at hon ger virðismikla arbeiðsmegi og kapital tøka til at framleiða heimamarknaðarvørur. At ríkisveitingin førir til, at Føroyar hava størri almennan sektor, enn vit høvdu havt uttan ríkisveiting, er tí bara ein tillaging sum er hend fyri at fult gagn skal fáast burtur úr ríkisveitingini.

Tað sum hendir, tá eitt samfelag fær eina gjaldoyragávu, sum ríkisveitingin er eitt dømi um, er at húsarhaldini fáa við sínum eftirspurningi gjøgnum marknaðin syrgt fyri, at ein partur av gjaldoyragávunum verður vekslaður til heimamarknaðarvørur. Hetta hendir við at framleiðslumiðlar vera fluttir úr útflutningsvinnuni til heimamarknaðarvinnuna.

Øktar inntøkur føra til øktan eftirspurning bæði eftir gjaldoyravørum og heimamarknaðarvørum. Um øktu inntøkurnar skyldast øktari ríkisveiting er eingin trupulleiki at nøkta økta eftirspurningin eftir gjaldoyravørum. Ríkisveitingin er ein gjaldoyragáva, sum kann brúkast til at keypa burtur av einum óavmarkaðum framboði av innflutningsvørum. Av tí at framboðið á heimsmarknaðinum ikki hevur trupulleikar við at nøkta økingini í føroyska eftirspurninginum hækka prísirnir á gjaldoyravørum ikki.

Hinvegin kann økti eftirspurningurin eftir heimamarknaðarvørum bara nøktast, um fleiri framleiðslumiðlar verða brúktir til at framleiða hesar vørur. Økti eftirspurningurin eftir heimamarknaðarvørum kann ikki nøktast við verandi býtið av framleiðslumiðlum. Av tí at framboðið ikki uttan víðari kann fylgja við økta eftirspurninginum hækka prísirnir á heimamarknaðarvørum. Hetta førir í øðrum umfari til, at

fyritøkur í heimamarknaðarvinnum kunnu draga at sær fleiri framleiðslumiðlar við at bjóða betri sømdir. Nýggja javnvágin vil tí vera eyðkent av at prísirnir á heimamarknaðarvørum eru lutfalsliga hægri enn áður.

Siga vit nú at ríkisveitingin minkar, er ikki trupult at hugsa sær til, hvat ávirkanin verður á búskaparligu javnvágina. Minkar ríkisveitingin, minkar "ókeypis" tilførslan av innflutningsvørum og neyðugt verður at brúka ein størri part av avmarkaðu nøgdini av framleiðslumiðlum til at framleiða vørur, sum kunnu brúkast til at geva í býti fyri innflutningsvørur. Henda tillaging hendir eftir sama leisti sum av ríkisveitingini, men øvugtan veg.

Minni inntøka merkir minni eftirspurning eftir bæði innflutningsvørum og heimamarknaðarvørum. Prísirnir á innflutningsvørum broytist ikki nevnivert av hesi orsøk, tí eftirspurningurin eftir bilum og teldum á heimsmarknaðinum minkar ikki nevnivert bara av tí, at føroyski eftirspurningurin eftir hesum vørum minkar.

Hinvegin eru tað bara føroyingar, sum eftirspyrja føroyskar heimamarknaðarvørur, so tá eftirspurningurin lækkar, mugu prísirnir á heimamarknaðarvørum eisini lækka, í hvussu so er lutfalsliga. Hetta førir eftir eina tillagingartíð til, at fyritøkurnar fara at leggja seg eftir at framleiða gjaldoyravørur, og býtið av framleiðslumiðlum millum teir tríggjar sektorarnar fer tí at broytast soleiðis at lutfalsliga størri partur av framleiðslumiðlunum arbeiðir í gjaldoyraframleiðslu. Endaliga úrslitið verður tí ein nýggj javnvág við færri innflutningsvørum og færri heimamarknaðarvørum, bæði privatum og almennum, til taks hjá húsarhaldunum.

### Íslendska kanningin

Íslendska kanningin, sum verður umrødd í Hvítubók, byggir á ein javnvágsmyndil fyri íslendska búskapin, sum í sambandi við Hvítubók bleiv tillagaður eitt sindur til føroysk viðurskifti.

Sjálvt um íslendski myndilin er rættuliga einfaldur, og ikki er bygdur beinleiðis eftir eini mynd av føroyska búskapinum, er hann áhugaverdur, tí hann er einasta roynd at seta tøl á fjarstundarárinini av burturtøku av ríkisveitingini.

Grundleggjandi munurin millum greiningina í íslendsku kanningini og greiningina bygda á javnvágsmyndilin í hesum skjali er, at íslendsku kanningini var tað almenna sett til at vera líka stórt uttan ríkisveiting, sum við ríkisveiting.

Fortreytin um at tann almenni sektorurin skal vera líka stórur í einum búskapi uttan ríkisveiting, sum við ríkisveiting er órímilig, tí hon ger, at møguleikarnir hjá borgarunum fyri vali av framleiðslusamanseting verða skerdir munandi. Av tí sama verður missurin í gagnið, tá ríkisveitingin verður tikin burtur í myndlinum, størri enn hann hevði

verið, um tað ikki varð kravt, at tað almenna framhaldandi hevur somu støðd.

Yvir longri tíðarskeið eru tað ynskini hjá borgarunum, sum avgera, hvussu lutfallið skal vera millum framleiðslu av innflutningsvørum, privatum heimamarknaðarvørum og almennum heimamarknaðarvørum. Tað eru tí borgararnir, ið avgera støddina á almenna sektorinum, og teir fara ikki at finna seg í at støddin á tí almenna verður ásett uttanífrá, tá teir kunnu fáa størri gagn við at broyta lutfallið millum almenna og privata sektorin. Tá føroyski búskapurin minkar sum fylgja av burturtøku av ríkisveitingini, fara borgararnir tí at krevja, at almenni sektorurin eisini minkar, soleiðis at ikki øll minkingin í nýtslu skal vera burtur úr kurvini við privatum vørum.

Um kravið um fasta støðd á almenna sektorinum verður slept, verður minkingin í gagni, sum fylgja av at nýtslan minkar, tá ríkisveitingin fellur burtur, minni. Hetta kemst av, at tá hava borgararnir møguleika fyri at deila minkingina av nýtslunu millum bæði privatar og almennar vørur og tænastur, heldur enn bert at minka nýtsluna av privatum vørum og tænastum. Á henda hátt kunnu borgararnir velja frá tær vørur, sum geva minst gagn, heldur enn at verða noydd til at velja frá vørur úr einum ávísum vørubólki.

Ikki ber til við bara einum ástøðiligum myndli at seta tøl á, hvussu nógv hægri gagnið er, tá til ber at tillaga støddina á almenna sektorinum. Til hetta endamál krevst, at ein koyring verður gjørd við íslendska myndlinum, har støddin á almenna sektorinum ikki er fastsett uttanífrá, men verður ásett av ynskjunum hjá borgarunum.

Men hóast hetta er tað av týdningi at vísa á, at fortreytin um fasta støðd av almenna sektorinum, tá restin av búskapinum minkar, er búskaparliga óheppin og sæð yvir longri tíð helst eisini politiskt ógjørlig at verja, tí ein tílík fortreyt minkar meira um gagnið hjá borgarunum enn neyðugt er.

### Ríkisveitingin og landskassin

Viðvíkjandi gjaldoyrastreymum vísir myndilin, at tað týdningarmikla við ríkisveitingini er, at hon gevur okkum møguleika at keypa fleiri útlendskar vørur, enn vit annars høvdu havt møguleika fyri. Ríkisveitingin er í veruleikanum framleiðsla av innflutningsvørum, sum vit fáa frá dønum, tað vil siga uttan at vit brúka arbeiðsmegi og realkapital upp á hesa framleiðsluna, og tí er ríkisveitingin ein øking í framleiðsluorkuni av innflutningsvørum.

Føroysku húsarhaldini vilja hava ein part av økta ríkidøminum í skapi av heimamarknaðarvørum, og gjøgnum prísmekanismuna kemur hetta í lag á tann hátt, at ein partur av tí arbeiðsmegi og tí kapitali, sum annars hevði farið til framleiðslu av gjaldoyra, verður fluttur í framleiðslu av heimamarknaðarvørum. Tað vil siga at ríkisveitingin frígevur ein part av framleiðslumiðlunum, sum annars skuldu farið til

at framleiða gjaldoyra til framleiðslu av heimamarknaðarvørum. Men um ríkisveitingin kemur inn í landið gjøgnum landskassan ella onkran annan almennan kassa er ikki so týdningarmikið.

Hetta merkir, at útmeldingarnar, um at ríkisveitingin nú er so og so nógv prosent av inntøkunum hjá landskassanum, eru meiningsleysar frá einum búskaparfrøðiligum sjónarhorni. Um ríkisveitingin fór beinleiðis út til borgararnar, og landskassin hareftir skattaði borgararnar harðari fyri at fíggja sínar útreiðslur, hevði ríkisveitingin verið 0% av inntøkunum hjá landskassanum, men búskaparligu útlitini fyri fullveldinum høvdu ikki blivið betri av tí orsøk. At tað ber til soleiðis at manipulera við hugtakinum um, hvussu stórur partur ríkisveitingin er av inntøkunum hjá landskassanum, ger sjálvandi hugtakið meiningsleyst.

Tað sum hevur týdning er, hvussu nógv ríkisveitingin økir um framleiðsluorkuna og harvið eisini nýtslumøguleikarnar hjá føroysku húsarhaldunum. Tí má ríkisveitingin sammetast við BTÚ, sum er eitt mát fyri framleiðsluorkuna hjá tøku arbeiðsmegini og realkapitalinum í Føroyum. Á henda hátt sæst, hvussu nógv ríkisveitingin økir framleiðslumøguleikarnar og harvið eisini nýtslumøguleikarnar, og tí eisini hvønn týdning ríkisveitingin hevur fyri føroyska búskapin.

### Ríkisveitingin og Skiftisgrunnurin

Eitt týðandi politiskt mál í sambandi við kjakið um ríkisveitingina, er ætlaði Skiftisgrunnurin hjá landsstýrinum. Grunnurin er sambært landsstýrið sjálvt og fjølmiðlarnar ein hornasteinur í fullveldisætlanini. Hetta hevur skapt nógv stríð um grunnin. Landsstýrið stendur ógvuliga fast við grunnin, meðan andstøðan og donsku myndugleikarnir ikki vilja síggja hann. Stríð hevur eisini tikið seg upp, um hvussu nógvir pengar skulu í grunnin. Landsstýrið sigur sjálvt, at umleið 6 milliardir krónur skulu í grunnin. Hetta er vorðið eitt gandakent tal, soleiðis at tað liggur í luftini, at fáa vit 6 milliardir í Skiftisgrunnin, kunnu Føroyar taka fullveldið, meðan koma ikki 6 milliardir í grunnin, hava Føroyar ikki ráð til at taka fullveldið.

Javnvágsmyndilin vísir á, at búskaparligi týdningurin, ið verður givin Skiftisgrunninum, er ein hvørvisjón. Hvørt vit hava Skiftisgrunn ella ikki, og hvussu nógvir peningur er í honum hevur í sær sjálvum onga ávirkan á búskaparligu útlitini hjá føroyska búskapinum.

Á sama hátt er tað framleiðslumøguleikarnir sum hava tann avgerandi týdningin fyri vælferðina hjá føroyingum yvir longri tíðarskeið, meðan týdningurin av nøkrum milliardum krónum meira ella minni á bók hvørvur skjótt, sum tíðin gongur.

Hitt er ein spurningur um fígging av tillagingini til eina lægri framleiðsluorku og tí eisini lægri nýtslu. Um hægri nýtsla í eitt styttri tíðarskeið verður fíggjað við uppsparing ella lántøku hevur ikki so stóran týdning í hesum samanhangi. Í báðum førum er tað samlaða framleiðslan sum frá líður, sum skal uppihalda nýtsluni, tá

samanumkemur. Fíggingin er ein spurningur um, hvørt vit skulu spara fyrst og brúka aftaná, ella um vit skulu brúka fyrst og spara aftaná.

**Oljuinntøkur**

## Oljan og heimamarknaðurin

Vit hava víst á, at fyri at fáa fult gagn av øktu framleiðslumøguleikunum, sum ein oljuvinna ella ríkisveiting skapa, er neyðugt at marknaðarkreftirnar fáa loyvi til at flyta framleiðsluorku úr framleiðslu av innflutningsvøruni yvir í framleiðslu av heimamarknaðarvørunum. Men økta framleiðsluorkan hevur eina ávirkan, sum ger møguleikarnar fyri øktum gagni enn størri. Framleiðslan av heimamarknaðarvørum kann økjast, ikki bara tí at vit kunnu flyta arbeiðsmegi úr framleiðsu av innflutningsvøruni yvir í framleiðslu av heimamarknaðarvøruni, men eisini tí at økti vælstandurin, ið økta framleiðsluorkan gevur, fer at tiltrekkja meira arbeiðsmegi úr útlondum, bæði føroyingar og onnur.

Hetta merkir, at økt framleiðsluorka í framleiðsluni av innflutningsvøruni fer at hava við sær ikki bara flyting av framleiðslu innanfyri karmarnar av verandi framleiðsluorku, men fer eisini at føra til økta framleiðsluorku í heimamarknaðarvinnuni, tí framleiðslumiðlarnir vera fleiri. Økta framleiðlsuorkan í heimamarknaðarvinnuni fer eisini at hava við sær, at príslegan í heimamarknaðarvinnuni ikki hækkar so nógv, sum hon hevði gjørt, um økta framleiðslan av heimamarknaðarvørum skuldi hent innan fyri verandi framleiðsluorku.

Umráðandi er at vera greiður yvir, at økta virksemi í heimamarknaðarvinnuni ikki kemur frá eftirspurningspartinum, men kemur av at framleiðsluorkan økist. Inflatión er ein fylgja av øktu framleiðsluni av gjaldoyra, og harav fylgjandi økta trýstinum á heimamarknaðarvinnuna. Um hetta trýstið ikki verður mótsvara av tilflyting av fólki og harav størri framleiðslu í heimamarknaðarvinnuni, møguliga orsakað av politiskum tiltøkum, kann trýstið ikki møtast av størri framleiðslu og verður staðfest í hægri inflatión enn neyðugt ístaðin. Politiska uppgávan er tí ikki at trýsta eftirspurningin niður, men at lata vera við at trýsta framboðið av heimamarknaðarvørum niður, soleiðis at eftirspurningurin kann verða nøktaður.

Til dømis er politiska kravið um at oljuvinann skal arbeiða um føroyskan keikant í veruleikanum eitt krav um, at arbeiðsmegi, sum møguliga størri brúk er fyri í heimamarknaðarvinnuni, skal arbeiða í útflutningsvinnuni. Halda myndugleikarnir fast við hetta kravið, verður torførari enn neyðugt hjá privatu heimamarknaðarvinnuni at fáa arbeiðsmegi, við hægri prísvøkstri enn neyðugt sum ein náttúrlig fylgja.

Frá einum realbúskaparligum sjónarmiði eru bæði ríkisveitingin og oljuinntøkur krøv hjá føroyingum upp á útlendskar vørur, hóast ávísar

politiskar bindingar liggja á ríkisveitingini, sum ikki liggja á møguligum oljuinntøkum. Tað vil siga, at frá einum realbúskaparligum sjónarmiði eru oljuinntøkur at sammeta við ríkisveitingina, tí bæði eru ein posi av gjaldoyra, sum vit ikki hava havt fyri neyðini at brúka føroyska arbeiðsmegi og kapital upp á at fáa fatur í.

Oljuvinnan framleiðir altso somu vøru sum "gamla" útflutningsvinnan og ríkisveitingin, nevniliga gjaldoyra, sum kann brúkast til at keypa vørur til innflutnings fyri. Finna vit olju, er sostatt eingin orsøk til at hava nógv fólk í útflutningsvinnuni, til dømis við at krevja at alt virksemi skal um føroyskan keikant. Oljan framleiðir gjaldoyra, sum arbeiðsmegin annars noyðist at framleiða, og tí er møguleiki fyri at flyta arbeiðsmegi og realkapital yvir í heimamarknaðarvinnuna, so nógv sum annars liggur á láni í samfelagnum kann gerast. At fáa hesa flyting av framleiðslumiðlum í lag er ein av styrkjunum hjá marknaðarmekanismuni, men sjálvandi bara um hon fær loyvi til at útinna hesa uppgávu.

### Oljan og landskassin

Ført hevur verið fram, at realavkastið av tilfeingisinntøkum úr oljuvinnuni kunnu vera eitt eyka fíggjarpolitiskt amboð hjá myndugleikunum. Men oljuinntøkur geva ikki landskassanum nakað fíggjarpolitiskt amboð, sum hann ikki hevur frammanundan. Ríkisveitingin úr Danmark hevur ført til, at Føroyar hava ein størri almennan sektor, enn hann hevði verið uttan ríkisveitingar og harvið skapt nakrar automatiskar stabilisatorar, sum eru størri enn teir annars høvdu verið. Men ríkisveitingin hevur ikki givið myndugleikunum betri møguleika at reka aktivan fíggjarpolitikk, enn teir høvdu frammanudan. Tað sum er galdandi fyri ríkisveitingina í hesum sambandi, er eisini galdandi fyri oljuinntøkur. At halda, at oljuinntøkur hava týdning fyri møguleikarnar at reka konjukturpolitikk er aftur ein peningalig hvørvisjón.

Fyri konjukturstýringina hevur tað ongan týdning, um fíggjarpolitikkur verður rikin við lántøku ella minni uppsparing. Oljuinntøkur bøta sjálvandi um kredittvirðið hjá landinum, og gera tað harvið lættari og møguliga bíligari at læna pening, men tað er ein spurningur, sum ikki hevur nakran serligan týdning, treytað av at tað almenna ikki er ógvuliga skuldarbundið frammanundan, sum tað almenna í Føroyum var fyrst í 90unum.

Tað sum hevur týdning er, at oljuinntøkur eru ein stór øking í framleiðsluorkuni av innflutningsvørum, og tí fara at broyta vinnulívsbygnaðin í føroyska búskapinum, yvir ímóti eini størri heimamarknaðarvinnu og minni traditionellari útflutningsvinnu. Bæði eru innflutningsvørur, ið detta niður av himni (ella koma upp úr havinum) beint til borgararnar, tí tær ikki brúka føroyska arbeiðsmegi og kapital og soleiðis ikki minka um framleiðslumøguleikarnar í

øðrum vinnum.

Frá einum realbúskaparligum sjónarmiði hava hvørki ríkisveiting ella oljuinntøkur nakað samband við landskassan. Landskassin í sær sjálvum er bert sigarkassin, sum umsitur gjaldoyrainntøkurnar. Í síðsta enda eru tað altíð borgararnir, ið avgera, hvat gjaldoyrainntøkurnar vera brúktar til. Tað vil siga at landskassin, í hvussu so er sæð yvir longri tíðarskeið, hvørki kann ella skal goyma peningin, fyri at halda prísleguni í heimamarknaðarvinnuni niðri, soleiðis at "gamla" útflutningsvinnan ikki minkar.

Ríkisveiting og oljuinntøkur skulu og fara at føra til flyting av framleiðsluorku úr útflutningsvinnuni yvir í heimamarknaðarvinnuna, soleiðis at framleiðslan passar við mynstrið í eftirspurninginum hjá brúkarunum. Fáa møguligar gjaldoyragávur bara loyvi til at økja um framboðið av innflutningsvørum er ein stórur partur av vinninginum við gávunum burtur, og tá er lítil meining í at fáa ríkisveiting ella at leita eftir olju.

Tí eiga politikarar og almennir myndugleikar ikki at brúka møguligar oljupengar til fíggjarpolitisk endamál. Teir skulu heldur syrgja fyri at maksimera realavkastið av oljupengunum, fáa tað út til borgararnar og so lata marknaðarkreftirnar, t.e. framleiðslukreftirnar og ynskini hjá borgarunum, um at avgera, hvørjar avleiðingar hetta fær fyri vinnulívsbygnaðin, t.e. býtið av tøku arbeiðsmegini og realkapitalinum millum "gomlu" útflutningsvinnuna og heimamarknaðarvinnuna.

**Hvat skapar búskaparligu vælferðina?**

## Framleiðslumiðlarnir

Omanfyri er greitt frá, at búskaparliga vælferðin hjá húsarhaldunum er grundað á, hvussu væl samfelagið, t.e. tað privata og tað almenna, er ført fyri at veita teimum tær vørur og tænastur, tey vilja hava. Tað eru framleiðslumiðlarnar, sum skulu veita húsarhaldunum hesar vørur og tænastur. Viðgerðin av framleiðslumiðlunum er tí ein aðalspurningur í praktiskum búskaparpolitikki.

Umframt vanligu framleiðslumiðlarnar, sum eru arbeiðsmegi og kapitalur, hava vit í Føroyum týðandi nøgdir av einum triðja framleiðslumiðli, nevniliga náttúrutilfeingi. Búskaparliga vælferðin í Føroyum verður skapt við at hesir tríggir framleiðslumiðlar framleiða vørur, sum gevur føroysku húsarhaldunum gagn.

## Skipan av framleiðsluni

Hvussu framleiðslan verður skipað hevur avgerandi týdning fyri vælferðina. Av tí at nøgdin av tøkum framleiðslumiðlum er avmarkað, meðan eftirspurningurin eftir vørum og tænastum, sum geva gagn, er óavmarkaður, er neyðugt at framleiðslan verður skipað soleiðis, at hvør eind av framleiðslumiðlunum gevur mest møguligt gagn, t.e.

framleiðir mest møguligt av teimum vørum, sum geva húsarhaldunum gagn. Í myndlinum framlagdur í hesum skjali eru vørurnar, sum geva húsarhaldunum gagn, býttar í tríggjar bólkar, nevniliga privatar heimamarknaðarvørur, almennar heimamarknaðarvørur og gjaldoyra, t.e. innflutningsvørur.

Tilfeingisrentan er fastlæst í framleiðslu av gjaldoyra, og hendan kann sostatt bara brúkast til at skaffa innflutningsvørur. Um húsarhaldini og framleiðarar gjøgnum samskipanina á marknaðinum verða samd um, at samansetingin av samlaðu framleiðsluni skal broytast, mugu arbeiðsmegin og kapitalurin tí bera tillagingina. Skal samansetingin til dømis broytast soleiðis, at meira skal framleiðast av gjaldoyra og minni av heimamarknaðarvørum, mugu arbeiðsmegi og kapitalur flyta úr heimamarknaðarvinnuni yvir í útflutningsvinnuna. Vilja brúkararnir hinvegin hava fleiri heimamarknaðarvørur og færri innflutningsvørur, mugu arbeiðsmegi og kapitalur flyta úr útflutningsvinnuni yvir í heimamarknaðarvinnuna.

Spurningurin, ið vinnulívið, sum lænir framleiðslumiðlar at framleiða vørur og tænastur við, alla tíðin setur sær sjálvum er tí: Vil brúkarin gjalda mest fyri eitt sindur meira av heimamarknaðarvørum ella fyri eitt sindur meira av gjaldoyra, t.e. innflutningsvørum. Svarið fæst við at hyggja at prísunum á marknaðunum, og útfrá hesum prísteknum verða arbeiðsmegin og kapitalurin býtt millum heimamarknaðarframleiðslu og gjaldoyraframleiðslu.

Tað eru arbeiðsmegin og kapitalurin í fiskivinnuni, oljuvinnuni, tí almenna, privatu heimamarknaðarvinnuni osfr, saman við tilfeingisrentunum, sum eiga lívið í føroyingum, ikki fiskivinnan ella nøkur onnur vinna í sær sjálvum. Tað týdningarmikla er tí, at okkara framleiðslumiðlar altíð eru har, teir geva húsarhaldunum størst gagn, t.e. størst møguligt framboð av teimum vørum og tænastum, húsarhaldini vilja hava.

Viðvíkjandi gjaldoyrainntøkum hevur tað ongan týdning, um útflutningsvinnan framleiðir neyðuga gjaldoyra í fiskivinnuni, alivinnuni, oljuvinnuni ella onkra aðrastaðni. Tað sum hevur týdning er, at nøgdin av gjaldoyra, brúkararnir vilja gjalda fyri við mistum heimamarknaðarvørum, verður framleidd við minst møguligari nýtslu av framleiðslumiðlum, soleiðis at sum mest verður tøkt til heimamarknaðarframleiðslu. Um vit eru ein “fiskivinnutjóð”, “oljustatur” ella okkurt annað er í hesum sambandi ongan týdning.

Í hesum sambandi er vert at minnast til, at tilfeingisrenturnar frá náttúrutilfeingjunum geva okkum búskaparligt gagn, t.e. uttan nýtslu av arbeiðsmegi og kapitali. Og sum oljuvinnan vísir okkum, er ikki neyðugt, at vit brúka føroyskar framleiðslumiðlar fyri at fáa tilfeingisrentu frá einum tilfeingi. Tí er bert neyðugt við gjaldoyraframleiðslu við hjálp av føroyskari arbeiðsmegi og kapitali í tann mun, borgararnir vilja hava fleiri innflutningsvørur, enn tilfeingisrenturnar kunnu gjalda.

### Studningur minkar um vælferðina

Vegna studningspolitikkin vera framleiðslumiðlarnir ikki gagnnýttir best møguligt. Við studningum broyta myndugleikarnir tey prístekin, sum skulu samskipa ynskini hjá húsarhaldunum um vørur og tænastur á aðrari síðuni og framleiðslumøguleikarnar hjá vinnulívinum á hinari síðuni. Tí verður samansetingin av framleiðsluni ikki tann, sum føroysku húsarhaldunum vilja hava, til skaða fyri vælferðina.

Fyrst og fremst avlagar studningurin býtið av framleiðsluni millum gjaldoyraframleiðslu og framleiðslu av heimamarknaðarvørum soleiðis, at meira verður framleitt av gjaldoyra og minni av heimamarknaðarvørum, enn brúkararnir vilja hava. Í øðrum lagið forðar studningurin eini tillaging av framleiðsluni av gjaldoyra til tær vinnur, har mest gjaldoyra fæst fyri fægst framleiðslumiðlar.

Tað vil siga, at studningurin avlagar bæði valið millum gjaldoyraframleiðslu og heimamarknaðarframleiðslu, og valið um, hvussu gjaldoyra verður veitt á bíligasta hátt. Bæði gera, at meira enn neyðugt av framleiðslumiðlum verður brúkt í gjaldoyraframleiðslu. Av tí sama er minni av heimamarknaðarframleiðslu tøkt enn tað kundi verið, til skaða fyri búskaparligu vælferðina hjá føroysku húsarhaldunum.

Fyri at føroysku húsarhaldini skulu fáa størst møguliga búskaparliga vælferð er tað tí av alra størsta týdningi, at tað almenna ikki ávirkar býtið av framleiðslumiðlunum yvir móti ávísum vinnum við sínum búskaparpolitikki. Tað almenna eigur ikki at hjúkla um ávísar útflutningsvinnur ella nakrar aðrar vinnur. Uppgávan er at síggja framleiðslumiðlarnar sum eina heild og hjúkla um teir sum heild, soleiðis at hesir eru so nógvir, effektivir og fleksiblir sum gjørligt. Býtið av framleiðsluni millum vinnugreinarnar eiga vinnulívið og húsarhaldini sjálvi finna út av gjøgnum marknaðarmekanismuna.

Búskaparpolitikkurin er í dag sostatt tann beint øvugti av tí, hann skal vera, fyri at húsarhaldini skulu fáa sum mest vælferð burtur úr tøku framleiðslumiðlunum. Búskaparpolitikkurin roynir at fáa mest møguligt av framleiðslumiðlum at vera í ávísum útflutningsvinnum, meðan endamálið eigur at vera tað øvugta: So lítið av framleiðslumiðlum sum gjørligt eigur at brúkast til at skaffa tær gjaldoyrainntøkur, brúkararnir vilja hava, soleiðis at sum mest verður tøkt til at framleiða heimamarknaðarvørur. Í einum studningsfríum búskapi hevði hetta komið í lag av sær sjálvum.

**Samandráttur av javnvágsmyndli**

### Nýggj tilgongd til búskapargreiningar

Júst sum handverkarin brúkar ymisk amboð, alt eftir hvør uppgávan er, er neyðugt at búskaparfrøðingar brúka ymsar myndlar, alt eftir hvørji viðurskifti, ætlanin er at greina. Er ætlanin til dømis at fáa eina hóming av, hvussu inntøkurnar hjá landskassanum broytast, um

eitthvørt skattaprosent verður broytt, ella hvussu íløgustøðið broytist við broytingum í rentustøðinum, eru hagfrøðiligir myndlar møguliga hentasta amboðið.

Men er ætlanin at greina, hvussu býtið av framleiðslumiðlunum millum teir ymsu sektorarnar í búskapinum broytist við serstakum broytingum í realbúskaparliga umhvørvinum, til dømis við skerjing av ríkisveiting ella við nýggjum oljuvirksemi, er neyðugt við javnvágsmyndlum, ið serskilt lýsa hesi viðurskifti. Tí er avgerandi neyðugt, at sæð verður burtur frá hagfrøðiliga myndlinum í Hvítubók, og at útgangsstøði verður tikið í javnvágsmyndlum við haldgóðum búskaparfrøðiligum grundbygnaði.

### Búskaparligar niðurstøður

Hetta skjal hevur víst á eitt dømi um, hvussu grundbygnaðurin í einum tílíkum myndli fyri Føroyar kann síggja út. Havast má í huga, at fyri mestan part kann grundbygnaðurin ikki í sær sjálvum brúkast til djúptøknar greiningar av serstøkum viðurskiftum. Hann gevur bara nakrar fastar haldgóðar búskaparfrøðiligar karmar um meira nágreiniligar lýsingar. Alt eftir, hvat slag av broytingum í búskaparliga umhvørvinum, hugsað verður um, má grundbygnaðurin tillagast fyri at geva myndlinum so mikið av yvirbygnaði, at nýtiligar niðurstøður kunnu fáast burturúr.

Skjalið vísir bara heilt stutt á nøkur dømi um, hvussu grundbygnaðurin kann tillagast, so hann kann brúkast til greiningar av serstøkum viðurskiftum. Enn er grundbygnaðurin langt frá liðugur og tillagingarnar til serstakar greiningar nóg illa byrjaðar, so lítið annað enn nakrar høvuðsniðurstøður kunnu fáast burturúr.

Sæð yvir longri tíð eru realu framleiðslumøguleikarnir avgerandi fyri livistøðið í landinum. Tað mest grundleggjandi og tí eisini tað mest áhugaverda við broytingum í búskaparliga umhvørvinum, sum minkingar í ríkisveitingini og fund av olju eru dømi um, er, at framleiðsluorkan í føroyska búskapinum broytist. Tað vil siga at sjálvt skapið á búskaparligu skipanini broytist. At samlaði eftirspurningurin innanfyri verandi búskaparbygnað skiftir upp ella niður, hevur minni týdning í hesum sambandi.

Neyðugt er tí við búskaparfrøði, sum serstakt lýsir framleiðsluviðurskiftini í búskapinum. Hetta fær okkum yvir á ein nýggjan leikvøll, har realbúskaparlig viðurskifti, so sum tøk arbeiðsmegi og tøkni standa í fremstu røð. Hagfrøðiligar uppgerðir av peningastreymum eiga ongan leiklut í slíkum greiningum.

### Niðurstøður um politiskar atgerðir

Meginparturin av niðurstøðunum um politiskar atgerðir, ið fáast burtur úr viðgerðini av javnvágsmyndlinum, byggja á hetta gjøgnumgangandi evnið: Privata heimamarknaðarsektorurin, almenni sektorurin og útflutningssektorurin brúka allir burtur av somu

avmarkaðu nøgd av arbeiðsmegi og kapitali. Flyta framleiðslumiðlar úr einum sektori yvir í ein annan, annaðhvørt orsakað av marknaðarkreftum ella av politiskum tiltøkum, minkar framleiðslan í tí sektorurin, sum missir framleiðslumiðlar. Tí ræður um at framleiðslan verður skipað soleiðis, at ein javnvág verður funnin, har húsarhaldini fáa so stórt gagn sum gjørligt burtur úr hvørjum arbeiðstíma hjá arbeiðsmegini og realkapitalinum. Tað er hesa javnvág, samskipanin millum keypara og seljara á einum fríum marknaði støðugt roynir at fáa í lag.

Virkar marknaðarmekanisman, t.e. at samskipanin á marknaðinum millum húsarhaldini og fyritøkurnar leiðir til úrslit, ið geva húsarhaldunum mest møguligt gagn burtur úr tøku framleiðslumiðlunum, er tað sostatt beinleiðis til skaða fyri vælferðina hjá borgarunum, um myndugleikarnir skeiklað samansetingina av framleiðsluni við at geva stuðul til framleiðslu av ávísum vørum.

Trekleikar í tillagingini til skiftingarnar orsakað av, at marknaðarmekanisman ikki virkar nóg skjótt, soleiðis at tillagingin í prísteknunum gongur seint, kunnu yvir styttri tíðarskeið skapa arbeiðsloysi fyri bæði arbeiðsmegi og realkapital. Hesum ber møguliga til at mótvirka við konjukturjavnandi politikki. Um myndugleikarnir vita, at broytingarnar í búskaparliga umhvørvinum eru meira skiftandi, sum við fram- og afturgongd í fiskivinnuni til dømis, kann tá vera ynskiligt at mótvirka ávirkanini av hesum broytingum.

Men um myndugleikarnir skulu vera tryggir við, at teir bøta um støðuna, heldur enn at gera hana verri, er neyðugt at teir eru vísir í, at skiftingarnar føra til inoptimalitetir, til dømis orsakað av trekleikum í prísteknunum. Politikarar og almennir myndugleikar mugu altso tryggja sær, at teir ikki mótvirka eini gagnligari, um enn truplari, tillaging av framleiðslusamansetingini. Haraftrat er neyðugt við neyvari vitan um, hvussu fíggjarpolitisk tiltøk ávirka búskaparliga umhvørvið hjá húsarhaldunum.

Mest týðandi niðurstøða viðvíkjandi núverandi búskaparligu støðu í Føroyum er tó henda: Tá stórar einstakar broytingar eru í búskaparliga umhvørvinum, eitt nú tá olja verður funnin, er avgerandi neyðugt fyri vælferðina, at ynskini hjá húsarhaldunum um broytta samanseting av framleiðsluni verða gingin á møti. Politikarar og almennir myndugleikar eiga ikki at mótvirka tí flyting av framleiðslumiðlum millum framleiðslusektorarnar, sum húsarhald og fyritøkur samráða seg til gjøgnum marknaðin. Studningurin til útvaldar vinnur er størsti búskaparligi trupulleiki í Føroyum í dag. Verður sami politikkur rikin, um ríkisveitingin verður tikin burtur ella ein møgulig oljuvinna kemur í gongd á føroyskum øki, verður trupulleikin enn størri.

**Hvítabók**

Í Hvítubók verður skilt millum bráðfeingis og varandi árin (altjóða ensku heitini eru ”short run effects” og ”long run effects”). Í hvør sínum parti verða ávikavist bráðfeingis og varandi árin viðgjørd, og skilt verður ímillum tey amboð, sum verða brúkt til at lýsa árinini. Skammstundarmyndilin verður brúktur til at lýsa bráðfeingis árin, meðan fjarstundarmyndil verður brúktur til at lýsa varandi árin.

Tað er grundarlagið undir skammstundarmyndlinum, sum vit skulu viðgera her. Ikki Hvítubók sum heild, men ta grundfatan, sum kemur til sjóndar í lýsingini av bráðfeingisárinunum, og sum eisini kemur til sjóndar í stórum parti av kjakinum, sum er um føroyskan búskap.

**Myndil av búskapinum**

Skammstundarmyndilin verður nágreiniliga lýstur í kapitli 6 í Fylgibindi 1 í Hvítubók, so her skal bert gerast ein stuttur samandráttur.

Í Hvítubók verður ein myndil av nøkrum grundleggjandi viðurskiftum og samanhangum í føroyska búskapinum settur upp. Myndilin er í høvuðsheitum bygdur útfrá hagtølum um føroyska búskapin árini 1960 og frameftir. Í uppbygging líkist hann nakað danska myndlinum ADAM, sum er ein myndil, ið mest verður brúktur til at gera forsagnir um konjunkturgongdina.

Hvítabók sigur soleiðis: ”*Støddin á almenna sektorinum er ein politisk avgerð og ávirkast sostatt ikki av eftirspurninginum av avleiddu vinnunum. Samsvarandi framleiða primeru vinnurnar vørur og tænastur til útflutnings og ávirkast tí heldur ikki av eftirspurningi av avleiddu vinnunum*”.

Myndilin býtir altso føroyska búskapin upp í tríggjar partar. Ymsar búskaparligar eindir verða bólkaðar eftir, hvat tað er, sum avgerð teirra eftirspurningsávirkan á aðrar eindir í búskapinum. Fyrsti partur eru vinnur, ið framleiða vørur og tænastur til útflutnings. Hesar eru flokkaður saman, tí at tær í myndlinum hava tað til felags, at tær eru lítið tengdar at innlendska eftirspurninginum. Vinnurnar í hesum bólkinum eru í høvuðsheitum fiskivinnan, alivinnan og flakavinnan. Ávísar smærri vinnur, til dømis skipasmiðjur, verða eisini roknaðar upp í henda bólkin.

Næsti parturin er almenni sektorurin. Við í almenna sektorinum eru landskassin og kommunurnar. Hesi eru í einum bólki fyri seg av tí at eftirspurningsávirkanin frá landskassanum og kommunum á restina av búskapinum sambært myndilin er ein politisk avgerð og er sostatt ikki heft at eftirspurningsávirkan frá restini av búskapinum.

Triði parturin er tað, sum verður kallað ”*avleiddar vinnur*”. Við í hesum bólkinum eru vinnur, sum sambært myndilin liva av at framleiða vørur og tænastur til innlendska eftirspurningin. Hesar vinnur eru ”*avleiddar*” skilt á tann hátt, at meðan tær onga eftirspurningsávirkan hava á hinar báðar bólkarnar, verða tær sjálvar hildnar á lívi av eftirspurningi frá útflutningsvinnuni og almenna

sektorinum.

### Uppfatan av búskapinum

Sambært myndilin eru gjaldoyrainntøkur lívsgrundarlagið hjá føroyska búskapinum. Keldurnar til gjaldoyrainntøkurnar eru tvær, nevniliga danski statskassin og útflutningurin.

Upprunin til alt virksemið í landinum er, at fyrst verður útlendskt gjaldoyra fingið til høldar, annaðhvørt við at útflutningsvinnan selur sína framleiðslu, ella við at landskassin fær ríkisveiting. Síðan skapa útflutningsvinnan og landskassin eftirspurning eftir vørum og tænastum innanlands við at brúka útlendska gjaldoyra upp á keyp av vørum og tænastum í Føroyum.

Gjaldoyrainntøkurnar skapa síðani enn meira virksemi innanlands gjøgnum ringávirkanir. Hetta virkar á tann hátt, at ein partur av inntøkunum hjá teim ”*avleiddu vinnunum*” frá sølu av vørum og tænastum til tað almenna og útflutningsvinnuna aftur verður brúktur til at skapa eftirspurning, sum so aftur skapar framleiðslu, sum aftur skapar eftirspurning osfr.

Henda gongd heldur fram, men í minni og minni vavi, til at enda eingin eftirspurningsávirkan av upprunaligu gjaldoyrainntøkunum er longur. Fyri at nakað virksemi skal vera í “*avleiddu vinnunum*”, er tí neyðugt, at eftirspurningsskapandi gjaldoyra alla tíðina streymar inn í landið.

**Kassamynd av skammstundarmyndlinum í Hvítubók**



**Ávirkan av broytingum í búskaparliga umhvørvinum**

## Minking í ríkisveitingini

"*Fruminntøkurnar*" eru sambært Hvítubók tann parturin av gjaldoyrastreyminum inn í landið, sum tað almenna fær fatur á, antin beinleiðis gjøgnum ríkisveiting ella óbeinleiðis gjøgnum skatta- og avgjaldsinntøkur frá virksemi í vinnulívinum, sum útflutningsvinnan hevur sítt í gongd heldur enn tað almenna sjálvt.

"*Fruminntøkurnar*" eru grundarlagið undir øllum forsagnum í Hvítubók um minkingina av ríkisveitingini. Ein minking í ríkisveitingini og harvið "*fruminntøkunum*" upp á 100 milliónir krónur førir orsakað av ringávirkanum til (sum virka øvugt, tá talan er um minking av ríkisveitingini), at neyðugt er við sparingum upp á í meðal 300 milliónir krónur, alt eftir hvar spart verður.

Um gjaldoyrastreymurin frá ríkisveitingini minkar ella fellur burtur, er tað sostatt sambært myndilin avgerandi neyðugt, at gjaldoyrastreymurin frá útflutningsvinnuni inn í búskapin økist samsvarandi, soleiðis at "*avleiddu vinnunum*" kann vera lív lagað.

Av tí at hetta kann taka langa tíð, er tað sambært somu tankagongd neyðugt, um ríkisveitingin skal burtur, at hava ein grunn við útlendskum gjaldoyra, sum kann brúkast til at pumpa fremmant gjaldoyra inn í landskassan. Hesin grunnurin skal vera við til at halda lív í tí almenna og í "*avleiddu vinnunum*" gjøgnum eftirspurningsskapandi virksemi, meðan nýggjar keldur til gjaldoyrainntøkur vera funnar.

## Oljuinntøkur

Møguligar oljuinntøkur hava somu ávirkan í hagfrøðiliga myndlinum sum verandi gjaldoyrainntøkur. Koma tær frá útlendskum oljufeløgum er tær at sammeta við gjaldoyrainntøkur frá ríkisveitingini, tí tær fara beinleiðis í landskassan. Koma tær í frá føroyskum oljufeløgum eru tær inntøkur frá útflutningi hjá føroyska vinnulívinum, og tær vera tá at sammeta við gjaldoyrainntøkur frá verandi "*primervinnum*", t.e. serliga fiskivinnan og alivinnan. Fyri at skilja, hvørja ávirkan møguligar oljuinntøkur hava á búskapin er tí bara neyðugt at fylgja somu tankagongd sum omanfyri, men við skatta- og avgjaldsinntøkum frá útlendsku oljufeløgunum løgdum aftrat ríkisveitingini, og skatta- og avgjaldsinntøkum frá føroyskum oljufeløgum løgdum aftrat inntøkunum frá verandi útflutningsvinnum.

Tað serliga við oljuinntøkum í mun til verandi gjaldoyrainntøkur er, at upphæddirnar talan er um, kunnu vera nógv størri, enn vit eru von við. Tí fær landskassin eina búskaparliga stýringsuppgávu viðvíkjandi møguligum oljuinntøkum.

Uppgávan hjá tí almenna verður at syrgja fyri, at ikki ov stórt trýst

verður frá nýggju gjaldoyrakelduni inn í landskassan og víðari inn í búskapin. Tað vil siga, at ístaðin fyri at leiða inntøkurnar frá oljuni víðari inn í búskapin á sama hátt sum við ríkisveitingini, eigur tað almenna at leiða ein part av inntøkunum í ein kassa uttanfyri búskapin. Hetta fyri ikki at skapa inflatión og aðrar skaðiligar ávirkanir, sum kunnu oyðileggja kappingarførið hjá útflutningsvinnuni. Henda goymslan av gjaldoyra kann so brúkast, tá inntøkurnar frá oljukeldunum byrjað at minka.

**Søgan um 100 millónir, sum framvegis eru 100 millónir**

Sambært Hvítubók, er einki vinnuligt virksemi, uttan so at primervinnurnar og almenna nýtslan av ríkisveitingini seta tað í gongd. Soleiðis koma allar landsins inntøkur antin frá ríkisveiting ella einari primervinnu og tí virksemi, hesi seta í gongd.

Hvítabók sigur 100 milliónir í ríkisveiting skapa nýggja framleiðslu gjøgnum ringávirkanir í landinum fyri 300 milliónir, sum ikki hevði verið uttan hesar 100 miljónirnar. Tað vil siga, at ríkisveitingin ikki bara leggur 1 milliard eftir seg, men at almenna nýtslan av henni trífaldar virðið á ríkisveitingini.

Sannleikin er minni fantastiskur enn so. 100 milliónir krónur í gjaldoyragávu frá einum fremmandum landi geva einki annað enn møguleikan til at hava útreiðslur mótvegis útlondum, t.e. innflutning, fyri 100 milliónir krónur, uttan at brúka framleiðsluorku í útflutningsvirksemi.

100 milliónir í ríkisveiting geva møguleika fyri, at framleiðsluorka, sum annars skuldi farið til at framleiða útflutningsvirði fyri 100 milliónir, fer í staðin til at framleiða heimamarknaðarvørur, t.e. framvegis fyri einar 100 milliónir, bara av øðrum vørum og tænastum enn annars hevði verið. Einki undur er hent. Tær 100 milliónirnar vit fingu í gjaldoyragávu, eru framvegis bara verdar 100 milliónir í innflutningsvørum. Tíverri, kann mann freistast til at siga.

Gjaldoyrainntøkur hjá útflutningsvinnuni kunnu á sama hátt brúkast til at keypa vørur og tænastur úr útlondum fyri. Men á sama hátt sum við ríkisveitingini kunnu gjaldoyrainntøkur frá útflutningi bara brúkast til hetta eina endamálið, og tær veksa heldur ikki í virði gjøgnum at skapa "*avleidda*" framleiðslu.

Tað er ikki soleiðis, at flyting av framleiðslumiðlum yvir í útflutningsvinnuna við hjálp av ymsum politiskum tiltøkum bæði gevur størri útflutning og størri heimamarknaðarframleiðslu. Gjaldoyrainntøkur duga ikki gand. Tær kunnu ikki skapa aðrar vørur. Tað er ikki soleiðis, at jú fleiri framleiðslumiðlar vit flyta yvir í framleiðslu av útflutningi, jú fleiri heimamarknaðarvørur fáa vit eisini.

Tvørturímóti hevur framleiðsla til útflutnings tann eginleika, at hon brúkar framleiðslumiðlar, sum so ikki samstundis kunnu brúkast í heimamarknaðarvinnunum. Tað vil siga, at jú fleiri framleiðslumiðlar vit brúka upp á framleiðslu til útflutnings, jú færri framleiðslumiðlar

vera eftir til heimamarknaðarframleiðslu.

**Hagfrøði ella búskaparfrøði, ikki bæði**

Tey, ið vilja byggja myndlar av føroyska búskapinum hava ein grundleggjandi trupulleika: Tað finnast heilt einfalt ikki hagtøl í Føroyum fyri tey flestu grundleggjandi viðurskifti, sum nútímans búskaparfrøði sigur hava týdning fyri, hvussu búskapurin sær út og uppførir seg. Myndlabyggjarar, ið vilja gera myndlar av føroyska búskapinum eru tí noyddir at velja: Hagfrøði ella búskaparfrøði, ikki bæði.

Annar møguleikin er at siga sum so, at tað er ikki, hvat búskaparfrøðin sigur okkum, men hvat vit hava tøl fyri, sum hevur týdning. Tað inniber so, at búskaparfrøðin verður slept í myndlabyggingini og tøku hagtølini taka yvir sum leiðbeinarar fyri, hvussu myndilin skal síggja út.

Hetta er fylgda mannagongdin í Hvítubók. Fyrimunurin er, at á henda hátt ber til at gera ein myndil, sum setur tøl á sínar forsagnir. Kostnaðurin er, at tað einasta, myndilin kann, er at geva forsagnir um hagtalsliga reglusemi í teimum fyriliggjandi tølunum. Myndilin sigur í veruleikanum einki um undirliggjandi búskaparbygnaðin ella atvoldarsambandið (kausalitetin) í forsagnunum. Frágreiðingarnar um, hvat tað er tølini siga, vera so at siga lagdar aftrat aftaná, soleiðis at tær passa sum frægast við tað, sum myndilin kemur út við.

Grundleggjandi er skammstundarmyndlinum í Hvítubók altso ikki ein búskaparfrøðiligur myndil, tí tað er ikki búskaparfrøðiligt ástøði, sum hevur verið leiðbeinandi fyri myndlabyggingina. Ístaðin eru tøku hagtølini sjóðað saman soleiðis, at tey út frá avmarkaða hagtalsgrundarlagnum geva frægast møguliga forsagnirnar. Frágreiðingin um "*fruminntøkurnar*" er so bara ein frágreiðing, sum passar toluliga væl saman við teimum forsagnum, myndilin kemur við.

Aftrat tí, at hagfrøðiligir myndlar ikki kunnu siga nakað um atvoldarsambond, er ein annar trupulleiki, at forsagnirnar kunnu bara brúkast, um hagfrøðiliga reglusemi í tíðarskeiðnum, forsagnirnar verða gjørdar um, er tað sama sum reglusemi í tíðarskeiðnum, myndilin er bygdur á. Men búskapurin broytist støðugt. Sjálvt við teimum lutfalsliga smáu broytingunum, sum alla tíðina fara fram í búskapinum, kunnu hagfrøðiligir myndlar bara brúkast til at gera forsagnir heilt stutt fram í tíð.

Men um til dømis ríkisveitingin fellur burtur, ella um vit finna olju, verður føroyski búskapurin fundamentalt broyttur, og vit fáa í veruleikanum ein nýggjan føroyskan búskap, ið brýtur nógv frá tí gamla. Ein myndil gjørdur eftir hagfrøðiligum reglusemi í føroyska búskapinum, sum var áðrenn broytingarnar, er sostatt ikki nýtiligur til at gera forsagnir um gongdina í hesum nýggja búskapi.

Hin valmøguleikin í samband við myndlabyggingina er at halda fast við búskaparfrøðina. Tá er tað, hvat búskaparfrøðin sigur okkum, ikki

hvat vit hava tøl fyri, sum leiðbeinir. Hetta er mannagongdin í hesi frágreiðingini. Fyrimunurin er, at vit tá hava logiskt vælgrundaðar og samanhangandi frágreiðingar um, hvussu búskapurin sær út, og hvat ávirkan – eisini stórar - broytingar í búskaparliga umhvørvinum hava á búskapin. Kostnaðurin er, at vit ikki kunnu seta tøl á tey fyribrigdi, vit tosa um. Talan verður tá bara um, at “hetta fer upp og hatta fer niður.”

Við avmarkaðu tøku hagtølunum um føroyska búskapin er neyðugt at velja, hvør mannagongd skal fylgjast í myndlabyggingini. Til ber ikki at fáa bæði í posa og sekk. Tað ber væl til at gera tveir myndlar, ein av hvørjum slag, men tá er neyðugt at vera klárur yvir, hvat hvør myndil kann, og serliga hvat teir ikki kunnu.

**Niðurstøða**

Hagfrøðiligi myndilin samsvarar væl við vanligu hugsanina um, at “*vit liva av útflutningsvinnuni*” og ríkisveitingini, ella sagt á annan hátt, at “*føroyski búskapurin hevur bara eitt bein at standa á*” (tvey um ríkisveitingin verður tald við).

Grundleggjandi vísir myndilin eina uppfatan av føroyska búskapinum sum ein heild í trimum pørtum. Fyrsti parturin, vit kunnu kalla hann tann ”heimagangandi” partin, livir av hinum báðum pørtunum. Hesir báðir seinnu eru ”forsyrgjarin”, sum arbeiðir úti fyri at skaffa pening til lívsins uppihald hjá sær sjálvum og tí heimagangandi, og tann ríki gubbin, sum regluliga spaðir til, tí tann heimagangandi parturin er so dýrur í drift, at forsyrgjarin hevur trupult við at halda tørn.

Um henda myndin av búskapinum var røtt, høvdu tey, sum vilja hava studning til fiskivinnu, flakavirkir, arbeiðsfólk, ið fara uttanlands at arbeiða, osfr. havt góða grund til tess. Myndilin sigur í veruleikanum, at jú fleiri føroyingar arbeiða við at skaffa gjaldoyra til landið, jú fleiri føroyingar kunnu fáa arbeiði í heimamarknaðarvinnuni.

Men búskaparfrøðin sigur okkum, at henda uppfatan av, hvussu føroyski búskapurin er háttaður, er ikki røtt. Til dømis byggir søgan um “*fruminntøkurnar*” á misfatan av hagfrøðiligum samanhangum og manglandi vitan um grundleggjandi búskaparfrøði. Hendan misfatanin er samstundis grundarsteinurin undir stórum parti av niðurstøðunum í Hvítubók.

Hagfrøðiligi myndilin er so at siga á skeivum leikvølli í samband við greiningar av nógvum broytingum í búskaparliga umhvørvinum, so sum burturtøka av ríkisveitingini ella fund av oljuinntøkum. Er endamálið at meta um konjukturgongdina næsta árið ella at meta um ávirkanina av einum fíggjarpolitiskum tiltaki, eru hagfrøðiligir myndlar kanska besta amboðið at brúka, og kunnu teir vera eitt hent amboð hjá fíggjarpolitisku myndugleikunum. Men forsagnirnar myndilin gevur viðvíkjandi broytingum í búskaparliga umhvørvinum av tí slag, sum burturtøka av ríkisveitingini er eitt dømi um, eru skeivar.

Til ber ikki at byggja slíkar greiningar á hagfrøðiligar myndlar, sum lítið og einki hald hava í búskaparfrøðini. Fyri at fáa eina rætta mynd av, hvussu føroyski búskapurin er háttaður og tillagar seg broytingar í búskaparliga umhvørvinum, er avgerandi neyðugt at seta myndlabyggingina á haldgott ástøðiligt grundarlag.